# Heilsu- og innlendismálaráðið

**Løgtingið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 5. januar 2018 |
| Mál nr.: | 17/00573-16 |
| Málsviðgjørt: | MHR |

**Løgtingsmál nr. xx/2017: Uppskot til løgtingslóg um ættleiðing**

**Uppskot til**

**Løgtingslóg
um
ættleiðing
(Ættleiðingarlógin)**

## Kapittul 1

## Treytir fyri ættleiðing

**§ 1.** Tilsøgn um ættleiðing verður givin við loyvi útflýggjaðum av Familjufyrisitingini.
*Stk. 2.* Verður barn frá øðrum landi ættleitt, hevur loyvið virknað frá tí degi, at barnið kemur til Føroyar. Um royndartíð er knýtt at ættleiðingini, hevur loyvið tó ikki virknað fyrr enn royndartíðin er av. Familjufyrisitingin kann frávíkja ásetingini í 2. pkt., um serligar umstøður gera seg galdandi.

**§ 2.** Ættleiðing kann bert loyvast, um mett verður grundað á greining av málinum, at ættleiðingin er til barnsins besta, og ynski er um, at barnið verður fostrað upp hjá ættleiðara ella er vorðið fostrað upp hjá ættleiðara, ella um onnur serlig orsøk er til ættleiðingina.

**§ 3**. Loyvi at ættleiða kann bert latast tí, ið er fyltur 25 ár. Tá ið serlig viðurskifti tala fyri tí, kann loyvi tó gevast tí, ið er fyltur 18 ár.

**§ 4.** Er tann, ið ynskist ættleiddur, undir 18 ár, kann ættleiðing bert loyvast, um umsøkjarin er góðkendur sum ættleiðari, sbr. § 26.
*Stk. 2.* Góðkenning verður tó ikki kravd í samband við ættleiðing av barni hjá hjúnafelaga ella hjá samlivara ella sambært reglum ásettum av landsstýrismanninum í førum, har tað er tættur skyldskapur ella annað serligt tilknýti ímillum ættleiðara og tað ættleidda barnið ella foreldrini hjá barninum.

*Gift og samlivandi*

**§ 5.** Tann, ið er giftur ella samlivandi, kann burtursæð frá teimum førunum, ið

eru nevnd í § 6, stk. 2, bert ættleiða saman við sínum hjúnafelaga ella samlivara, tó undantikið um hjúnafelagin ella samlivarin er horvin ella orsakað av sinnissjúku, evnaveikleika ella líknandi standi ikki er førur fyri at virka skynsamt. Tó kann tann eini hjúnafelagin ella samlivarin við samtykki frá hinum ættleiða barnið hjá hesum.
*Stk. 2.* Bert hjún og samlivandi kunnu ættleiða saman.

*Stjúkbarnaættleiðing*

**§ 6.** Ein hjúnafelagi kann ættleiða barnið hjá hinum hjúnafelaganum. Somuleiðis kann ein samlivari ættleiða barnið hjá hinum samlivaranum.
*Stk. 2.* Stjúkbarnaættleiðing er eisini møgulig, tá ið talan er um barn hjá einum fyrrverandi hjúnafelaga ella samlivara. Er hjúnabandið endað orsakað av hjúnaskilnaði ella ógildan av hjúnarbandinum, ella er talan um endað samlív, kann stjúkbarnaættleiðing bert loyvast, um tann, ið ynskist ættleiddur, er myndigur.

*Samtykki*

**§ 7.** Er tann, ið ynskist ættleiddur, fyltur 12 ár, eigur loyvi ikki at verða givið uttan samtykki er fingið frá hesum, uttan so er, at útvegan av samtykki verður mett at vera til skaða fyri barni.
*Stk. 2.* Samtykki skal latast við persónligari uppmøting á Familjufyrisitingini ella hjá øðrum myndugleika ella stovni, ið eru góðkendir sambært § 9, stk. 1. Innan barnið gevur sítt samtykki, skal ein samrøða vera við barnið um ættleiðingina, og barnið skal kunnast um týdningin av ættleiðingini.
*Stk. 3.* Er barnið yngri enn 12 ár, skulu skjalfestast upplýsingar um sjónarmiðið hjá barninum um ta ætlaðu ættleiðingina í tann mun, búnaðarstøðið hjá barninum og umstøðurnar í málinum tala fyri tí. Tá avgerð verður tikin skal atlit takast til sjónarmiðini hjá barninum í mun til ta ætlaðu ættleiðingina í størst møguligan mun.

**§ 8**. Ættleiðing av einum persóni, ið er yngri enn 18 ár og er ómyndigur, krevur samtykki frá foreldrunum.
*Stk. 2.* Um tað eina foreldrið ikki hevur lut í foreldramyndugleikanum, er horvið ella orsakað av sinnissjúku, evnaveikleika ella líknandi standi ikki er ført fyri at virka skynsamt, verður bert samtykki frá hinum foreldrinum kravt.
*Stk. 3.* Um tað, sum stendur í stk. 2, er galdandi fyri bæði foreldur, verður samtykki kravt frá verjanum.

**§ 9.** Samtykki sambært § 8 skal vera skrivligt og skal latast í samband við persónliga uppmøting á Familjufyrisitingini ella hjá øðrum myndugleika ella stovni, ið eru góðkendir til hetta av landsstýrismanninum.
*Stk. 2.* Samtykki kann ikki verða móttikið fyrrenn 3 mánaðir eftir, at barnið er føtt, undantikið um talan er um heilt serlig viðurskifti.
*Stk.3.* Innan samtykki verður móttikið, skulu foreldrini ella verjin verða vorðin vegleidd um rættarvirknaðin av ættleiðingini og samtykkinum.
*Stk. 4.* Samtykki kann latast til, at barnið verður ættleitt av tí, sum verður tilnevndur av einum myndugleika ella stovni, sum hevur heimild til at arbeiða við ættleiðing av børnum.
*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin ella tann, sum landsstýrismaðurin heimilar til tess, kann avgera, at samtykki, ið er givið hjá útlendskum myndugleika ella stovni,verður javnstillað við samtykki givið hjá einum føroyskum myndugleika ella stovni. Frávik kann í so fall gevast frá ásetingunum í stk. 1-3.

*Afturtøka av samtykki og manglandi samtykki*

**§ 10.** Verður eitt samtykki, ið er givið sambært § 9, afturtikið, kann ættleiðingarloyvi hóast hetta latast, um afturtøkan ikki er rímiliga grundað við atliti til barnsins besta.
*Stk. 2.* Hóast tað ikki er møguligt at fáa samtykki sambært § 8, stk. 1, kann

ættleiðingarloyvi í heilt serligum førum latast, um atlitið til barnsins besta avgerandi talar fyri hesum. Er barnið umsorganaryvirtikið krevst samtykki frá Høvuðsbarnaverndarnevndini.

**§ 11**. Familjufyrisitingin kann við áheitan frá Høvuðsbarnaverndarnevndini loyva, at eitt barn, sum er umsorganaryvirtikið, seinni verður burturættleitt, hóast samtykki sambært § 8 ikki verður fingið til vega. Loyvi kann bert latast sambært treytunum í § 10, stk. 2.

**§ 12**. Tekur Familjufyrisitingin avgerð sambært §§ 10 ella 11, hóast samtykki til ættleiðingina sambært § 8, stk. 1 ikki kann fáast til vega frá foreldrunum, verða barnið, foreldrini, foreldramyndugleikaánarin, um hesin er ein annar enn foreldrini, verjin og tann, ið søkir um ættleiðing, kunnaði um hetta.
*Stk. 2.* Ein avgerð sum nevnd í stk. 1 skal vera skrivlig. Familjufyrisitingin skal útflýggja avgerðina til tey avvarðandi persónliga ella boða teimum frá avgerðini. Avgerðin skal eisini innihalda kunning um rættin til at fáa avgerðina roynda av dómstólinum og um freistina fyri hesum, sbr. stk. 3.
*Stk. 3.* Innan 14 dagar eftir at ein avgerð, sum nevnd í stk. 1, er móttikin ella fráboðað, kann málið krevjast lagt fyri rættin. Familjufyrisitingin kann, tá ið serligar umstøður tala fyri hesum, áseta eina longri freist, ella innan freistin fer, leingja hana.
*Stk. 4.* Móttekur Familjufyrisitingin umbøn um, at avgerðin verður roynd av rættinum, leggur Familjufyrisitingin málið fyri rættin sambært ásetingunum í rættargangslógini kapittul 43 b, uttan so er, at ættleiðingarloyvið er givið aftaná at freistin í stk. 3 er farin.
*Stk. 5.* Verður avgerðin hjá Familjufyrisitingini staðfest, um at ættleiðingarloyvi sambært §§ 10 og 11 skal gevast, ella avgerð rætturin, at ættleiðingarloyvi kann gevast, kann Familjufyrisitingin ikki geva ættleiðingarloyvi fyrr enn kærufreistin er farin, og kæra ikki er byrjað, innan kærufreistin er farin. Tað sama ger seg galdandi í mun til kærumál, um rætturin burturvísir at royna avgerðina, sbr. rættargangslógini § 475 b, stk. 4.

**§ 13.** Hevur Familjufyrisitingin avgjørt at síggja burtur frá, at samtykki til ættleiðing ikki er fingið til vega og barnið býr hjá tí, ið søkir um ættleiðing, kann foreldramyndugleikaánarin ikki taka barnið úr heiminum hjá umsøkjaranum, meðan málið um ættleiðing verður viðgjørt. Tað sama ger seg galdandi, um Høvuðsbarnaverndarnevndin hevur givið samtykki sambært § 10, stk. 2,2. pkt. ella um umbøn er sett fram sambært § 11.

*Váttan*

**§ 14.** Frá foreldrum, hvørs samtykki ikki krevst sambært § 8, stk. 1-2, skal váttan fáast til vega, innan avgerð kann takast, undantikið um tað verður mett at skaða barnið ella viðføra eina órímiliga seinkan av málinum.

*Persónar undir verjumáli*

**§ 15.** Tann, sum er undir verjumáli sambært verjumálslógini § 5 ella er undir verjumáli við frátøku av tí rættarliga virkisførinum, sbr. § 6 í verjumálslógini, kann ikki ættleiðast, uttan so er, at váttan er fingin til vega frá verjanum.

*Mótveiting fyri at geva samtykki*

**§ 16.** Tilsøgn um ættleiðing kann ikki latast, um onkur, ið skal geva samtykki til ættleiðingina, veitir ella fær gjald ella annað slag av mótveiting, íroknað gjald fyri mista arbeiðsinntøku. Familjufyrisitingin kann krevja allar upplýsingar frá einhvørjum, ið hevur vitan um viðurskifti viðvíkjandi móttøku ella veitan av gjaldi o.a., sum nevnd í pkt. 1.
*Stk.2.* Verður gjald veitt ættleiðingarforeldri, kann ættleiðingarloyvið gerast treytað av, at gjaldið heilt ella lutvíst verður nýtt til barnsins besta.

## Kapittul 2
## Rættarvirknaður av ættleiðing

**§ 17.** Við tilsøgn um ættleiðing íkoma somu rættarligu viðurskifti millum ættleiðara og barn, ið er ættleitt, sum millum foreldur og egið barn. Ættleitt barn og tess lívsarvingar arva og verða arvaði av ættleiðara og tess ætt eins og egið barn. Samstundis detta tey rættarligu viðurskiftini millum tað ættleidda barnið og upprunaforeldrini burtur.
*Stk. 2.* Við tilsøgn um stjúkbarnaættleiðing sambært § 6 fær tann ættleiddi í mun til hjúnafelagarnar, fyrrverandi hjúnafelagar, samlivandi ella fyrrverandi samlivandi somu rættarligu viðurskifti, sum var viðkomandi teirra felags barn.
*Stk. 3.* Í mun til navnið hjá ættleidda barninum eru ásetingarnar í løgtingslóg um fólkanøvn galdandi.

## Kapittul 3.
## Úrgildissetan av ættleiðing

**§ 18**. Kærunevndin í almanna-, familju-, og heilsumálum kann ógilda eina ættleiðing, tá ið tann ættleiddi og ættleiðarin eru samdir um, at ættleiðingin skal ógildast.
*Stk.2.* Er tað ættleidda barnið yngri enn 18 ár, kann ættleiðingin ógildast sbrt. stk. 1, um upprunaforeldrini hjá ættleidda barninum eru samd um tað og mett verður, at tað er best fyri barnið, at ættleiðingin verður ógildað.
*Stk. 3.* Er barnið fylt 12 ár, er tað ikki møguligt at ógilda ættleiðingina, um samtykki ikki er fingið frá barninum. Samtykki skal latast við persónligari uppmøting á Familjufyrisitingini ella hjá øðrum myndugleika ella stovni, ið eru góðkendir til hetta sambært § 9, stk. 1. Innan barnið gevur sítt samtykki, skal ein samrøða vera við barnið um úrgildissetanina av ættleiðingini eins og barnið skal kunnast um týdningin av úrgildissetanini av ættleiðingini.
*Stk. 4.* Er barnið yngri enn 12 ár, skulu skjalfestast upplýsingar um sjónarmiðið hjá barninum um ta ætlaðu úrgildissetanina av ættleiðingini í tann mun, búnaðarstøðið hjá barninum og umstøðurnar í málinum tala fyri tí. Tá avgerð verður tikin skal atlit takast til sjónarmiðini hjá barninum í mun til ta ætlaðu úrgildissetanina av ættleiðingini í størst møguligan mun.
*Stk. 5.* Kærunevndin í almanna-, familju-, og heilsumálum kann taka avgerð um at ógilda ættleiðingina, um upprunaforeldur søkja um tað, ættleiðararnir eru deyðir, og tað verður mett, at úrgildissetan er best fyri barnið.

**§ 19.** Sambært málskravi kann ættleiðing ógildast við dómi, um ættleiðari hevur framt grovt misbrot mótvegis barninum ella í avgerandi mun hevur misrøkt skyldur, ið eru álagdar ættleiðara við ættleiðingini, ella um ógildan verður mett at vera av stórum týdningi fyri tað ættleidda barnið.
*Stk. 2.* Barnið leggur mál um úrgildissetan fyri dómstólin. Um barnið er ómyndigt ella ikki er ført fyri at virka skynsamt orsakað av sinnissjúku, evnaveikleika ella líknandi standi, verður málið lagt fyri rættin av verjanum hjá barninum, uppruna pápanum ella uppruna mammuni hjá barninum ella av landsstýrismanninum ella tí, sum hann heimilar til tess.

**§ 20.** Hava hjún ella samlivandi í felag ættleitt barn er bert møguligt at ógilda ættleiðingina fyri bæði.
*Stk.2.* Í teimum førunum nevnd í § 19, stk. 1, kann úrgildissetan fremjast, sjálvt um tær har nevndu umstøðurnar bert gera seg galdandi fyri tann eina ættleiðaran.

**§ 21.** Er ikki møguligt sambært vanligu ásetingunum í rættargangslógini at ávísa nakað varnarting, har mál um úrgildissetan av ættleiðing kann takast upp, avger danski løgmálaráðharrin hvønn rætt, málið skal leggjast fyri.

*Rættarvirknaður av nýggjari ættleiðing*

**§ 22.** Við nýggjari ættleiðing verður eldra ættleiðingin sett úr gildi, sbr. tó § 17, stk. 2.

*Rættarvirknaður av úrgildissetan*

**§ 23.** Verður ein ættleiðing ógildað dettur rættarvirknaðurin av ættleiðingini millum tað ættleidda barnið og ættleiðara og ættina hjá hesum burtur. Um serlig viðurskifti tala fyri tí, kann rætturin í samband við úrgildissetan sambært § 19 avgera, at ættleiðari skal gjalda uppihaldspening fyri barnið.

*Stk.2.* Verður ættleiðingin sett úr gildi sambært § 18, stk. 2 ella stk. 5, íkoma tey rættarligu viðurskiftini millum barnið og uppruna ættina aftur.

*Stk.3.* Í teimum førum, ið nevnd eru í § 19, kann rætturin við atliti til orsøkina til úrgildissetanina, aldurin hjá barninum og umstøðurnar annars avgera, at rættarligu viðurskiftini millum ættleidda barnið og uppruna ættina skulu íafturkoma.

*Stk.4.* Er ættleiðingin sett úr gildi fyri persón, ið er fyltur 18 ár, kann Kærunevndin í almanna-, familju-, og heilsumálum ella rætturin sambært umbøn frá tí ættleidda avgera, at rættarligu viðurskiftini millum ættleidda og uppruna ættina íafturkoma, um uppruna foreldrini samtykkja hetta. Um bert tann eini av uppruna foreldrunum samtykkir sambært pkt. 1, kann verða avgjørt at rættarligu viðurskiftini íafturkoma í mun til ættina hjá hesum.

*Stk. 5.* Annars íafturkemur ongin rættarvirknaður í mun til uppruna ættina.

*Samtykki og váttan*

**§ 24**. Innan ættleiðing verður ógildað sambært § 19, skal rætturin í størsta mun innheinta váttanir frá teimum persónum, hvørs samtykki ella váttan krevst í samband við tilsøgn um ættleiðingarloyvi. Rætturin kann tó avgera, tá ið serligar umstøður tala fyri tí, og spurningur ikki er um rættarligu viðurskiftini í mun til uppruna ættina skulu íafturkoma, at ein tílík váttan ikki skal innheintast.

## Kapittul 4
## Ymiskar ásetingar

**§ 25.** Landsstýrismaðurin kann áseta reglar um, hvussu mál skulu viðgerast sambært hesari lóg, íroknað
1) góðkenning sum ættleiðari,
2) viðgerð av ættleiðingarmálum, íroknað innihaldið av umsóknum um ættleiðing o.a.,
3) latan av samtykki til ættleiðing, sbr. §§ 7 og 9,
4) viðgerðina hjá Familjufyrisitingini um mál um ættleiðing uttan samtykki, sbr. § 10, og
5) viðgerð av málum, um hvørt ein ættleiðingargongd kann halda fram.

*Samráð og ógildan av góðkenning*

**§ 26.** Landsstýrismaðurin stovnar eitt samráð, ið letur Familjufyrisitingini tilmæli at nýta til avgerð hjá Familjufyrisitingini, hvørt ein umsøkjari kann góðkennast sum ættleiðari, sbr. § 4. Familjufyrisitingin syrgir fyri at fáa upplýsingar um umstøðurnar hjá umsøkjara til vega, ið liggja til grund fyri tilmælinum hjá samráðnum. Samráðið kann undir málinum heita á Familjufyrisitingina um at innheinta fleiri upplýsingar, innan samráðið letur tilmælið.

*Stk. 2.* Familjufyrisitingin kann avgera, at góðkenningin til at ættleiða dettur burtur, um treytirnar fyri at fáa eina góðkenning sum ættleiðari ikki eru til staðar longur, ella um umsøkjari annars ikki verður mettur at vera egnaður sum ættleiðari.

*Stk. 3.* Samráðið er sett saman av trimum limum. Einum løgfrøðingi, einum lækna og einum við einari sosialari útbúgving.

*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin tilnevnir limirnar og varalimirnar, og verða hesir tilnevndir í upp til fýra ár í senn.

*Stk. 5.* Tilmælini hjá samráðnum verða førd inn í eina gerðabók. Er semja í samráðnum um, at umsóknin ikki skal gangast á møti, verður ein stutt grundgeving fyri hesum førd inn í gerðabókina. Eru limirnir ikki samdir,

verða tær ymsu grundgevingarnar førdar inn í gerðabókina.

*Ættleiðingarfyrireikandi skeið*

**§ 27.** Luttøka í einum ættleiðingarfyrireikandi skeiði er ein treyt fyri at persónar, ið ikki hava ættleitt eitt barn áður, kunnu góðkennast sum ættleiðarar.
Stk. 2. Familjufyrisitingin kann sambært reglum ásettum av landsstýrismanninum avgera, at persónar, ið fyrr hava ættleitt eitt barn, skulu luttaka á einum ættleiðingarfyrireikandi skeiði fyri at kunna verða góðkend av nýggjum til at ættleiða, um mett verður, at tørvur er á hesum.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglar um fylgjandi:
1) Innihaldið av skeiðunum, ið eru nevnd í stk. 1 og 2 og,
2) Hvussu skeiðini, ið nevnd eru í stk. 1 og 2 skulu leggjast til rættis.

*Ættleiðingarráðgeving*

**§ 28.** Við tilsøgn um ættleiðing, ið er fevnt av kravinum um, at umsøkjari skal vera góðkendur sum ættleiðari sbr. § 4, skal ættleiðari móttaka ættleiðingarráðgeving beint innan og beint eftir, at barnið, ið skal ættleiðast, hevur fingið uppihald hjá ættleiðarunum í Føroyum. Hetta er tó ikki galdandi, um ættleiðarin orsakað av atliti til barnið ikki hevur møguleika at móttaka ráðgeving.
*Stk. 2.* Ein ættleiðari, ið er fevndur av stk. 1, og sum hevur bústað í Føroyum, kann biðja um meira ættleiðingarráðgeving í samband við ættleiðingina.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglar um fylgjandi:
1) Hvussu ráðgevingin sambært stk. 1 og 2 skal leggjast til rættis.
2) Undir hvørjum umstøðum ættleiðari sambært stk. 1, 2. pkt. ikki skal móttaka ráðgeving.

*Samstarvsavtala millum Føroyar og Danmark*

**§ 29.** Landsstýrismaðurin kann gera eina avtalu við danskar myndugleikar um viðurskiftini millum reglarnar í Føroyum og í Danmark um ættleiðing. Avtalan fær gildi í Føroyum, eftir at avtalan er kunngjørd í Kunngerðablaðnum.

*Fremmandir ríkisborgarar*

**§ 30.** Við sáttmála við fremmandan stat kann avgerast, at ríkisborgarar í tí fremmanda statinum bert kunnu ættleiða ella verða ættleiddir í Føroyum undir ávísum treytum, sum ásettar í millumlandasáttmálum.
*Stk. 2.* Samsvarandi avgerðir kunnu takast í mun til úrgildissetan av einari ættleiðing, tá ið ættleiðarin er fremmandur ríkisborgari.

**§ 31.** Í mun til ávísar tilskilaðar fremmandar statir kann verða avgjørt, at danskir ríkisborgarar bert undir ávísum treytum kunnu ættleiða ella verða ættleiddir í tilskilaða statinum.
*Stk. 2.* Á sama hátt kann avgerast, at ógildan av einari ættleiðing í fremmandum stati, ikki fær virknað her í ríkinum, um ættleiðari er danskur ríkisborgari.

*Lógarval og viðurkenning av útlendskum avgerðum*

**§ 32.** Tann ið hevur bústað í Føroyum, kann bert ættleiða sambært reglunum í hesari løgtingslóg.
*Stk. 2.* Óansæð stk. 1 verða útlendskar ættleiðingaravgerðir viðurkendar í Føroyum, tá ið ættleiðing av barni til Føroya verður framd í samsvari við Haagersáttmálan frá 29. maj 1993 um verju av børnum og um samstarv viðvíkjandi altjóða ættleiðing. Landsstýrismaðurin kann umframt hetta áseta reglur um, at aðrar útlendskar ættleiðingaravgerðir skulu viðurkennast í Føroyum.

**§ 33.** Tann, sum hevur bústað í útlandinum, kann bert ættleiða eftir

reglunum sambært hesari løgtingslóg, um umsøkjarin, hjúnafelagin ella samlivarin er danskur ríkisborgari, og ættleiðing orsakað av hesum ikki kann fremjast í tí landinum, har umsøkjarin býr, og um eitt føroyskt ættleiðingarloyvi fær gildi í bústaðarlandinum.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann annars loyva ættleiðing, um málið hevur serligt tilknýti til Føroyar.
*Stk. 3.* Stk. 1 og 2 verða ikki nýttar til ættleiðingar, ið eru fevndar av Haagersáttmálanum frá 29. maj 1993 um verju av børnum og um samstarv viðvíkjandi altjóða ættleiðing.

*Sentralmyndugleiki sambært Haagersáttmálanum*

**§ 34.** Landsstýrismaðurin tilnevnir ein sentralmyndugleika, ið skal varða av teimum uppgávum og skyldum, sum hann sambært Haagersáttmálanum frá 29. maj 1993 um verju av børnum og um samstarv viðvíkjandi altjóða ættleiðingum skal varða av.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglar um virkið hjá sentralmyndugleikanum.

## Kapittul 5
## Hjálp til ættleiðing

**§ 35.** Ein góðkendur ættleiðari skal vera tilmeldaður einum felagsskapi, ið hevur loyvi at veita ættleiðingarhjálp viðvíkjandi børnum, ið ikki hava bústað í Føroyum, fyri at kunna ættleiða eitt barn, ið ikki hevur bústað í Føroyum, Danmark ella í Grønlandi.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um hetta og um møguleikan til at kunna frávíkja stk. 1, tá ið ein góðkendur ættleiðari hevur ein serligan kunnleika til barnið ella til tey avvarðandi hjá barninum frammanundan, ella um serligar umstøður annars gera seg galdandi.

**§ 36.** Hjálp at knýta samband millum persónar, ið ynskja at ættleiða, og eitt barn, við tí endamáli at fremja ættleiðing og annars at veita ættleiðingarhjálp, kann bert fremjast av landsstýrismanninum, Familjufyrisitingini, Kærunevndini í almanna-, familju-, og heilsumálum og felagsskapum, ið eru nevndir í § 35.
*Stk. 2.* Ásetingin í stk. 1 fevnir tó ikki um løgfrøðisliga hjálp og líknandi í samband við áheitan á teir nevndu myndugleikarnar ella til at útvega upplýsingar, ið krevjast frá hesum.

*Greiping millum barn og ættleiðara*

**§ 37.** Tá ið eitt barn er ávíst til ein góðkendan ættleiðara við atliti til ættleiðing, tekur Sentralmyndugleikin skjótast møguligt støðu til, um ættleiðingargongdin kann halda fram.
*Stk. 2.* Er barnið, ið er ávíst, ikki fevnt av góðkenningini hjá ættleiðara sum ættleiðari, ella er ivi um hetta, verður metingin sambært stk. 1 gjørd av Familjufyrisitingini eftir tilmæli frá samráðnum.

*Innsavning av upplýsingum o.a.*

**§ 38.** Sentralmyndugleikin savnar inn upplýsingar viðvíkjandi einari ættleiðingargongd frá ættleiðarunum, tá ið ættleiðingarhjálpin er veitt av einum felagsskapi, ið veitir hjálp til ættleiðing.

**§ 39.** Sentralmyndugleikin kann biðja Familjufyrisitingina og Kærunevndina í almanna-, familju-, og heilsumálum um ummæli viðvíkjandi ítøkiligum ella yvirskipaðum viðurskiftum av týdningi í mun til eftirlitið við einum felagsskapi, ið veitir ættleiðingarhjálp.
*Stk. 2.* Familjufyrisitingin og Kærunevndin í almanna-, familju-, og heilsumálum skulu fráboða Sentralmyndugleikanum um øll viðurskifti, ið sambært metingini hjá Kærunevndini ella Familjufyrisitingini hava ella kunnu hava týdning fyri eftirlitið við einum felagskapi, ið veitir ættleiðingarhjálp.

## Kapittul 6
## Revsing

**§ 40.** Brot á § 36 verður revsað við sekt ella fongsli í upp til 4 mánaðir.
*Stk. 2.* Á sama hátt verður tann revsaður, ið sum millummaður veitir gjald fyri at fáa samtykki til ættleiðing til vega.
*Stk. 3.* Revsiábyrgd kann áleggjast feløgum og øðrum løgfrøðisligum persónum sambært reglunum í revsilógini kapittul 5.

## Kapittul 7
## Kæra

**§ 41.** Avgerðir tiknar sambært hesi løgtingslóg av Familjufyrisitingini, kunnu kærast til Kærunevndina í almanna-, familju-, og heilsumálum. Hetta er tó ikki galdandi fyri avgerðir tiknar sambært §§ 10 og 11, ið kunnu leggjast fyri rættin, sbrt. § 12.
*Stk. 2.* Málsviðgerðin í málum viðgjørd sambært §§ 10 og 11 kann kærast til Kærunevndina í almanna-, familju-, og heilsumálum.
Stk.3. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um viðgerðina av kærum.

## Kapittul 9
## Ígildissetan o.a.

**§ 42.** Henda løgtingslóg kemur í gildi Ólavsøkudag 2018, sbr. tó stk. 2-6.
*Stk. 2.* § 5, stk. 1 er ikki galdandi fyri umsókn um ættleiðing, sum er latin inn av einum umsøkjara, ið innan ígildiskomuna av løgtingslógini hevur ein samlivara, og sum í samband við ígildiskomuna ikki er liðugt viðgjørd. Fyri slíkar umsóknir er tann higartil galdandi ásetingin í § 5, stk. 1 í anordning nr. 1169 frá 25. november 2006 om ikrafttræden for Færøerne af lov om adoption galdandi.
*Stk. 3.* Kravið í § 27, stk. 1, um at persónar, ið áður ikki hava ættleitt eitt barn, skulu luttaka á einum ættleiðingarfyrirekandi skeiði, sum treyt fyri at kunna ættleiða eitt barn, er ikki galdandi fyri umsókn, sum er latin inn innan ígildiskomuna av lógini, og sum í samband við ígildiskomuna ikki er liðugt viðgjørd.
*Stk. 4.* Kravið í § 27, stk. 2, um at Familjufyrisitingin sambært reglum ásettum av landsstýrismanninum kann avgera, at persónar, ið áður hava ættleitt eitt barn, skulu luttaka á einum ættleiðingarfyrireikandi skeiði, fyri at kunna verða góðkendir av nýggjum til at ættleiða eitt barn, er ikki galdandi fyri umsókn um ættleiðing, sum er latin inn innan ígildiskomuna av lógini, og sum í samband við ígildiskomuna av lógini ikki er liðugt viðgjørd.
*Stk. 5.* Familjufyrisitingin kann fram til tann 1. november 2018 gera undantak frá kravinum í § 28, stk. 1 um ættleiðingarráðgeving beint innan, at barnið, ið skal ættleiðast, hevur fingið uppihald hjá ættleiðarunum í Føroyum.
*Stk. 6.* Kravið um ættleiðingarráðgeving beint aftaná at barnið, ið skal ættleiðast, hevur fingið uppihald hjá ættleiðarunum í Føroyum, er galdandi, tá ið barnið hevur fingið uppihald hjá ættleiðarunum seinni enn tríggjar mánaðir innan ígildiskomuna hjá lógini.

**§ 43.** Kapittul 2 er galdandi fyri:
1) ættleiðingar, ið eru stovnaðar tann 1. januar 1957 ella seinni
2) ættleiðingar, ið eru stovnaðar innan 1. januar 1957, tá ið tað sambært § 48, stk. 2, er givið ættleiðingarloyvinum rættarvirknað sambært kap. 2 og
3) ættleiðingin er stovnað innan 1. januar 1957, tá ið tað sambært § 27, stk. 2 í lóg nr. 140 frá 25. maj 1956 um ættleiðing er givið ættleiðingarloyvinum rættarvirknað eftir § 13, sbr. § 12 í nevndu lóg.
*Stk. 2.* Hóast stk. 1, nr. 1 er ásetingin í § 13, stk. 2,2. pkt. í lóg nr. 140 frá 25. maj 1956 um ættleiðing galdandi fyri ættleiðingarloyvi, har tað er ásett, at arvarætturin hjá barninum til uppruna ættina varðveitist, ið eru latin innan ígildiskomuna av anordning nr. 1169 frá

25. november 2006 om ikrafttræden for Færøerne af lov om adoption.

**§ 44.** Kapittul 3 er eisini galdandi fyri ættleiðingar, ið eru stovnaðar innan ígildiskomuna av anordning nr. 1169 frá 25. november 2006 om ikrafttræden for Færøerne af lov om adoption.

**§ 45.** Fyri ættleiðingar, sum eru stovnaðar innan 1. januar 1957, og sum ikki eru fevndar av § 46, stk. 1, nr. 2 ella 3, er lóg nr. 87 frá 26. mars 1923 um ættleiðing galdandi, tó undantikið § 13, stk. 2, og §§ 18-24 í anordning nr. 1169 frá 25. november 2006 om ikrafttræden for Færøerne af lov om adoption.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann, tá ið umstøðurnar tala fyri hesum, geva einari ættleiðing, ið er stovnað innan 1. januar 1957, rættarvirknað eftir kap. 2 í hesari lógini.

**§ 46.** Samstundis, sum hendan lógin kemur í gildi, fer úr gildi Anordning nr. 1169 frá 25. november 2006 om ikraftræden for Færøerne om lov om adoption.

**Kapittul 1. Almennar viðmerkingar**

**Innihaldsyvirlit**

1.1. Orsøk til uppskotið
1.2. Endamálið við uppskotinum
1.3. Fylgiuppskot og skipanin av lógaruppskotinum, málnýtsla og frøðiheiti o.a
1.4. Galdandi lóggáva
1.4.1. Føroyskan av galdandi ættleiðingarlóggávu
1.4.1.1. Galdandi lóggáva
1.4.1.2. Hugsanin hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum
1.4.1.3. Tilmælda skipanin
1.4.2. Heimild til at gera avtalu við danskar myndugleikar viðvíkjandi fremmandaættleiðing
1.4.2.1. Galdandi lóggáva
1.4.2.1.1. Fremmandaættleiðing
1.4.2.1.1.1. Innanlanda fremmandaættleiðing
1.4.2.1.1.2. Altjóða fremmandaættleiðing
1.4.2.1.2. Eftirlit við ættleiðingarøkinum
1.4.2.2 Hugsanin hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum
1.4.2.3. Tilmælda skipanin
1.4.3. Ráðgeving og stuðul til familjuna í samband við fremmandaættleiðing
1.4.3.1. Galdandi lóggáva
1.4.3.1.1.Haagersáttmálin
1.4.3.1.2. Galdandi innanlanda lóggáva um ráðgeving
1.4.3.2. Hugsanin hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum
1.4.3.2.1. Forkanningin
1.4.3.2.2. Ráðgeving beint áðrenn og aftaná, at barnið, ið verður ættleitt, kemur at búgva hjá ættleiðara – og onnur ráðgeving
1.4.3.3. Tilmælda skipanin
1.4.3.3.1. Forkanningin
1.4.3.3.2. Ráðgeving beint áðrenn og aftaná, at barnið, ið verður ættleitt, kemur at búgva hjá ættleiðara – og onnur ráðgeving
1.4.4. Samlivandi fáa høvi at ættleiða
1.4.4.1. Galdandi lóggáva
1.4.4.2. Hugsanin hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum
1.4.4.3. Tilmælda skipanin
1.4.5. Nútímansgerð av frøðimáli (terminologi)
1.4.5.1. Galdandi lóggáva
1.4.5.2. Hugsanin hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum
1.4.5.3. Tilmælda skipanin
1.4.6. Eftirlitið við ættleiðingarmiðlandi felagsskapum
1.4.6.1. Galdandi lóggáva
1.4.6.2. Hugsanin hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum
1.4.6.3. Tilmælda skipanin
1.4.7. Loyvi til framhald av ættleiðingartilgongd – góðkenning av greipingaruppskoti
1.4.7.1. Galdandi lóggáva
1.4.7.1.1. Góðkenning av greipingaruppskoti
1.4.7.1.2. Góðkenningarkarmurin
1.4.7.2. Hugsanin hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum

1.4.7.2.1. Góðkenning av greipingaruppskoti
1.4.7.2.2. Góðkenningarkarmurin
1.4.7.3. Tilmælda skipanin
1.4.7.3.1. Góðkenning av greipingaruppskoti
1.4.7.3.2. Góðkenningarkarmurin
1.4.8. Treytirnar fyri at endurstovna rættarstøðuna við uppruna-ættina hjá ættleidda, ið er fyltur 18 ár.
1.4.8.1. Galdandi lóggáva
1.4.8.2. Hugsanin hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum
1.4.8.3. Tilmælda skipanin
1.4.9. Gildiskoma av ættleiðingarloyvi
1.4.9.1. Galdandi lóggáva
1.4.9.2. Hugsanin hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum
1.4.9.3. Tilmælda skipanin
1.4.5. Samandráttur av nýskipanini
1.4.6. Ummæli og ummælisskjal

## 1.1. Orsøkir til uppskotið

Á vári 2017 samtykti Løgtingið, at persóns-, húsfólka-, og arvarætturin skal yvirtakast sum føroyskt málsøki á Ólavsøkudegi 2018. Yvirtøkan av málsøkinum viðførir, at føroyskir myndugleikar fáa tað lóggevandi og útinnandi valdið í Føroyum innan málsøkið.

Ættleiðingarlóggávan er ein partur av málsøkinum persóns-, húsfólka-, og arvarættur. Við einari yvirtøku heldur galdandi lóggáva á økinum fram at vera í gildi, inntil hon verður broytt ella sett úr gildi av Løgtinginum. Nevnast skal í hesum sambandi, at lóggávumálið í galdandi lóggávu á málsøkinum er danskt.

Ættleiðingarlógin varð samtykt í 2006 og er síðani ígildiskomuna bert broytt í einstøkum støðum og byggir stórt sæð á donsku ættleiðingarskipanina, ið varð innførd ávíkavíst 1. oktober 1972 og 1. januar 2000. Ættleiðingarreglarnar í ávíkavist Føroyum og Danmark samsvara yvirskipað við hvørja aðra. Tó eru nógvar lógarbroytingar framdar í Danmark, ið ikki eru settar í gildi í Føroyum, ella sum í samband við ígildiskomuna eru tillagaðar serligum føroyskum viðurskiftum. Síðani ættleiðingarlógin varð sett í gildi fyri Føroyar, er vitanin innan fremmandaættleiðing økt, eins og familjumynstrini eru broytt.

Ættleiðingarlógin tørvar sostatt at verða tillagað føroyska málinum, umframt eina dagføring og nútímansgerð á ymsum økjum. Millum annað verður ynskt at tryggja teimum herbúgvandi ættleiðingarfamiljunum neyðuga stuðulin og ráðgevingina í mun til ættleiðing – hetta fyri at tryggja góðar ættleiðingargongdir fyri børnini.

Landsstýriskvinnan metir, at tað er av alstórum týdningi at tryggja eina vælvirkandi ættleiðingarskipan í Føroyum til frama fyri ættleidd børn og ættleiðarar, og at núverandi skipan verður ment fyri betri at lúka krøv, ið eru ásett í altjóða ásetingum í mun til altjóða ættleiðing, sum Føroyar eru fevndar av. Grundleggjandi aðalreglan í samband við fremmandaættleiðing verður framhaldandi, eftir at málsøkið er yvirtikið, at børn fyrst og fremst skulu hjálpast í tí familjuni, sum tey búgva hjá og í tí landinum, sum tey búgva í. Altjóða ættleiðing er sostatt síðsta loysnin hjá barninum at fáa eina familju.

Í samband við samráðingarnar millum Føroyar og Danmark í mun til yvirtøkuna av ættleiðingarøkinum, varð og er tað semja um, at galdandi rættarstøða í mun til fremmandaættleiðing verður varðveitt eftir yvirtøkuna. Hetta bæði fyri at tryggja, at tey børn, ið verða heimtikin til Føroyar, eru frígivin til ættleiðing á lógligan hátt, umframt at góðkendir ættleiðarar, ið búgva í Føroyum og bíða eftir at fáa barn í boði, ikki vera ávirkaðir av yvirtøkuni. Og samstundis at tryggja, at nýggir umsøkjarar búsitandi í Føroyum framhaldandi hava møguleika at fremmandaættleiða. Viðmerkjast skal í tí sambandi, at Ríkisumboðið hevur upplýst, at seinastu 5 árini eru umleið fýra børn heimtikin hvørt ár til Føroya, og í dag eru umleið 120 ættleidd børn í Føroyum, ið enn ikki eru fylt 18 ár.

## 1.2. Endamálið við uppskotinum

Tað yvirskipaða endamálið við lógaruppskotinum er at tryggja, at yvirtøkan av ættleiðingarlóggávuni ikki fær neiligan týdning fyri rættarstøðuna hjá borgarum í Føroyum. Endamálið er sostatt at tryggja støðuna fyri ættleiðarar, ið bíða eftir at fáa barn í boði og at tryggja framtíðar ættleiðingar í mun til fremmandaættleiðing. Harumframt at framtíðartryggja og styrkja altjóða ættleiðingarmiðlan til Føroyar, stuðla neyðugum støðufesti í ættleiðingarskipanini í mun til fremmandaættleiðing og samstundis økja trygdina í mun til tær fremmandaættleiðingar, ið verða framdar. Uppskotið skal tískil eisini vera við til at tryggja góðar treytir fyri tey ættleiddu børnini, ið koma til Føroyar. Endamálið er eisini at varðveita flytiføri millum Føroyar, Danmark og Grønland í mun til fremmandaættleiðing.

Fyri at røkka hesum endamálum er neyðugt við einum samstarvi millum føroyskar og danskar myndugleikar í mun til fremmandaættleiðing eftir yvirtøkuna av ættleiðingarlóggávuni. Fyri at eitt samstarv skal lata seg gera má heimild fyri hesum fáast til vega. Viðmerkjast skal, at sjálvt um Føroyar yvirtekur málsøkið, er Danmark sambært Haagersáttmálanum framhaldandi álagt at føra eftirlit við viðgerðini hjá føroyskum myndugleikum í mun til altjóða ættleiðingar. Tískil verður skotið upp í hesum lógaruppskoti, at heimild til at Føroyar kunnu gera avtalu við danskar myndugleikar í mun til fremmandaættleiðing verður fingin til vega.

Lógaruppskotið hevur harumframt sum endamál at menna økið fyri betri at lúka krøv, ið eru ásett í altjóða ásetingum í mun til altjóða ættleiðing, sum Føroyar eru fevndar av, og sostatt tryggja herbúgvandi ættleiðingarfamiljum neyðuga stuðulin í mun til fremmandaættleiðing við atliti til at stuðla góðum ættleiðingargongdum til barnsins besta. Fyri at røkka hesum endamáli verður skotið upp, at krav um ættleiðingarfyrireikandi skeið í samband við góðkenningargongdina sum ættleiðari skal ásetast lógini. Krav um ráðgeving beint áðrenn og beint aftaná, at eitt ættleitt barn fær uppihald hjá ættleiðarunum í samband við fremmandaættleiðing skal ásetast í lógini. Harumframt skal ásetast í lógini at ættleiðarar hava møguleika at fáa sjálvbodna ráðgeving í samband við fremmandaættleiðing.

Endamálið við lógaruppskotinum er eisini yvirskipað at dagføra ættleiðingarlóggávuna soleiðis, at ásetingarnar verða meira tíðarhóskandi bæði frøðimálsliga og innihaldsliga. Millum annað við atliti til samfelagsgongdina í mun til familjumynstur verður skotið upp í lógaruppskotinum, at samlivandi pør kunnu ættleiða saman á jøvnum føti við hjún, íroknað at ættleiða barnið hjá samlivara (stjúkbarnaættleiðing). Sambært lógaruppskotinum kunnu samlivandi pør sostatt ættleiða saman, tá ið tey hava livað saman í einum hjúnabandslíknandi parlagi í eina ávísa tíð. Samstundis verður kravt, at samlivandi pør skulu ættleiða saman, tá ið treytirnar fyri hesum eru loknar. Fyri samlivandi pør, ið ikki lúka treytirnar fyri at ættleiða saman, vil tað framhaldandi vera møguligt, at annar av teimum samlivandi søkir um

góðkenning sum einaættleiðari. Í hesum førum vil sama siðvenja sum higartil vera galdandi, ið er, at tann samlivandi í útgangsstøðinum skal lúka tey objektivu krøvini, ið krevjast lokin í mun til góðkenning sum ættleiðari.

At enda er endamálið við lógaruppskotinum eisini, at galdandi ættleiðingarlóg skal vera á føroyskum máli. Fyri at røkka hesum endamáli verður mælt til í lógaruppskotinum, at galdandi ættleiðingarlóg verður flutt yvir í løgtingslóg og í tí sambandi umsett til føroyskt.

### 1.3. Fylgiuppskot og skipanin av lógaruppskotinum, málnýtsla og frøðiheiti o.a.

Sum avleiðing av uppskotinum í hesum lógaruppskoti um, at ógift samlivandi kunnu og skulu ættleiða saman, verður samstundis sett fram eitt fylgiuppskot til broyting í anordning nr. 228 frá 15. mars 2007 om ikrafttræden for Færøerne af lov om forældremyndighed og samvær, sum broytt við § 11 i løgtingslóg nr. 78 frá 29. mai 2017 um broyting í ymiskum lógum á málsøkinum persóns-, húsfólka- og arvarætti.

Lógaruppskotið er skipað soleiðis, at tá ið víst verður til fylgjandi lógir, skal tað skiljast soleiðis:

- Ættleiðingarlógin: Her verður víst til galdandi ættleiðingarlóg, ið er galdandi í Føroyum. Nevniliga anordning nr. 1169 frá 25. november 2006 for Færøerne, sum broytt við anordning nr. 398 frá 20. april 2010 og við løgtingslóg nr. 78 frá 29. mai 2017 um broyting í ymiskum lógum á málsøkinum persóns-, húsfólka- og arvarætti (Myndugleikaflyting orsakað av yvirtøku av málsøkinum).

- Góðkenningarkunngerðin: Her verður víst til kunngerð galdandi í Føroyum, nevniliga bekendtgørelse nr. 1607 af 12. december 2016 for Færøerne om godkendelse som adoptant.

- Ættleiðingarkunngerðin: Her verður víst til kunngerð galdandi í Føroyum, nevniliga bekendtgørelse nr. 287 af 26. marts 2007 for Færøerne om adoption.

- Danska ættleiðingarlógin: Her verður víst til galdandi ættleiðingarlóg í Danmark, ið eitur bekendtgørelse nr. 1821 af 23. december 2015 af adoptionsloven.

- Danska ættleiðingarkunngerðin: Her verður víst til galdandi ættleiðingarkunngerð í Danmark, nevniliga bekendtgørelse nr. 1863 af 23. december 2015 om adoption.

- Haagersáttmálin: Her verður víst til Haagersáttmálan frá 29. mai 1993 om beskyttelse af børn og om samarbejde med hensyn til internationale adoptioner.

Harumframt skulu fylgjandi myndugleikar í lógaruppskotinum skiljast soleiðis:

- Gigni: Ein deild undir Heilsutrygd, ið er ein almennur stovnur, stovnsettur við lóg undir Heilsu- og innlendismálaráðnum. Gigni veitir heilsufrøðiligar tænastur til børn og ung og í hesum sambandi eru ymisk tilboð til familjur sum ættleiða børn. Eitt nú bjóðar Gigni at skipa fyri mammubólkum, eisini fyri tey sum bíða eftir barni, heimavitjan áðrenn farið verður eftir barninum, at koma á heimavitjan beinanvegin eftir heimtøku av barninum

- Sentralmyndugleikin: Er tann myndugleiki, ið sambært Haagersáttmálanum er tilnevndur sum sentralmyndugleiki í mun til at røkja skyldurnar, ið eru álagdar sambært Haagersáttmálanum. Ankestyrelsen, ið er ein danskur almennur myndugleiki, er tilnevndur sentralmyndugleiki fyri Føroyar, Danmark og Grønland.

- Ankestyrelsen: Er ein danskur  almennur myndugleiki og røkir aftrat sínum uppgávum sum sentralmyndugleiki aðrar uppgávur. Eitt nú er Ankestyrelsen kærumyndugleiki í mun til avgerðir um stjúkbarnaættleiðingar og familjuættleiðingar. Ankestyrelsen skipar og bjóðar eisini ættleiðingarfyrireikandi skeið og ættleiðingarráðgeving. Ankestyrelsen ger eisini avtalu við ættleiðingarmiðlandi felagsskapir um meira nágreinaðar heimildartreytir. Harumframt førir Ankestyrelsen eftirlit við ættleiðingarmiðlandi felagsskapum. Aftaná yvirtøkuna kunnu avgerðir um ættleiðing tiknar í Føroyum kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum.
- Adoptionsnævnet: Er ein danskur almennur myndugleiki, ið miðlar børn leysgivin til ættleiðing í Føroyum ella í Danmark, eins og viðger kærumál viðvíkjandi góðkenning sum ættleiðari. Harumframt hevur Adoptionsnævnet eftirlit við viðgerðini av málum um góðkenning sum ættleiðari, tilnevnir serkønar barnalæknar, ið kunnu vegleiða ættleiðarar í samband við, at ættleiðari hevur fingið barn í boði og savnar og miðlar eisini vitan um ættleiðing. Aftaná yvirtøkuna kunnu avgerðir viðvíkjandi góðkenning sum ættleiðari tiknar í Føroyum kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum

- DIA: Er tann ættleiðingarmiðlandi felagsskapurin, ið av danska statinum hevur góðkenning til at miðla útlendsk børn til Føroyar. DIA hevur heimating í Danmark og stendur fyri “Danish International Adoption”.

- Samstarvsavtalan: Er avtalan, ið skal gerast millum føroyskar og danskar myndugleikar um fremmandaættleiðing sambært samstarvsavtalu millum føroyskar og danskar myndugleikar eftir yvirtøkuna av málsøkinum persóns-, húsfólka- og arvarætti dagfest 19. desember 2016.

- Ríkisumboðsmaðurin er tann almenni stovnurin í Føroyum, ið fram til yvirtøkudagin, t.e. á Ólavsøkudegi 2018, umsitur tað familjurættarliga økið.

- Familjufyrisitingin er sambært løgtingslóg nr. 78 frá 29. maj 2017 um broyting í ymiskum lógum á málsøkinum persóns- húsfólka, og arvarætti tann almenni myndugleikin, ið eftir yvirtøkuna av málsøkinum persóns-, húsfólka- og arvarætti á Ólavsøkudegi 2018, skal umsita tær uppgávur, ið í dag verða umsitnar av Ríkisumboðsmanninum í Føroyum.

- Statsforvaltningen: Er tann almenni stovnurin í Danmark, ið umsitur sama økið sum Ríkisumboðsmaðurin - og eftir yvirtøkuna - Familjufyrisitingin skal umsita.

- Útland: Er land uttanfyri danska ríkið

At enda er lógaruppskotið skipað soleiðis, at heitið Ríkisumboðsmaður verður brúkt, tá ið galdandi lóggáva verður lýst, og tá ið metingarnar hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum verða lýstar.

Heitið Familjufyrisitingin, verður brúkt, tá ið ítøkuligu uppskotini í serligu viðmerkingunum og uppskotini til loysn verða lýst.

Tá ið heitið Ankestyrelsen verður nýtt í lógaruppskotinum, verður ikki víst til virkið hjá Ankestyrelsen sum sentralmyndugleiki, men sum kærumyndugleiki o.a. í mun til danskar avgerðir. Somuleiðis, tá ið heitið Sentralmyndugleiki verður brúkt, vísir hetta til virkið hjá Ankestyrelsen sum sentralmyndugleiki.

**1.4. Galdandi lóggáva**
Ættleiðingarøkið er í dag reguleráð við ættleiðingarlógini, góðkenningarkunngerðini og ættleiðingarkunngerðini.

Ættleiðingarlóggávan inniheldur eitt nú allýsingar av teimum ymisku sløgunum av ættleiðing, t.e. stjúkbarnaættleiðing, familjuættleiðing og fremmandaættleiðing.

*Stjúkbarnaættleiðing* er ættleiðing, har umsøkjarin ættleiðir barnið hjá sínum hjúnafelaga.

*Familjuættleiðing* er vanliga eyðkend við, at talan er um eitt serstakt familjutilknýti millum umsøkjara og barnið, ið ynskist ættleitt. Tað framgondur av ættleiðingarkunngerðini § 2, stk. 1, nr. 2, litra a, at barnið antin skal vera barnabarn hjá umsøkjara ella bróður- ella systirsonur ella bróður- ella systirdóttur.

Umframt hetta er talan um familjuættleiðing, um talan er um eitt barn hjá foreldrum, sum umsøkjarin gjøgnum tættan og langtíðar kunnleika er serliga knýttur at, og barnið er undir 18 ár, smb. § 2, stk. 1, nr. 2, litra b í ættleiðingarkunngerðini. Ella um talan er um ættleiðing av einum barni, sum umsøkjari hevur eitt serligt tilknýti til smb. § 2, stk. 1, nr. 2, litra c í ættleiðingarkunngerðini. Henda áseting kann fevna um eitt nú fosturbarn.

*Fremmandaættleiðing* er ættleiðing, har umsøkjari ættleiðir eitt barn undir 18 ár, og har tað er ein treyt fyri ættleiðingina, at umsøkjari verður góðkendur sum ættleiðari smb. § 4 a, stk. 1 í galdandi ættleiðingarlóg. Aloftast er tað talan um ættleiðing av einum barni, ið umsøkjarin ikki kennir frammanundan. Tað kann tó eisini vera talan um, at umsøkjari kennir barnið ella foreldrini hjá tí, men at tilknýtið ikki er av slíkum slag, at tað lýkir treytirnar fyri, at familjuættleiðing kann fremjast.

Ein ættleiðing kann vera ávíkavist innanlanda ella altjóða. Ein innanlanda ættleiðing er ættleiðing av einum barni búsitandi í danska ríkinum. Ein altjóða ættleiðing er ættleiðing av einum barni við bústaði uttan fyri danska ríkið.

Harumframt ásetir galdandi ættleiðingarlóggáva treytirnar fyri tey ymisku sløgini av ættleiðing, íroknað treytir fyri ávíkavist sjálvbodnari ættleiðing, tvingsilsættleiðing, og innanlanda- og altjóða ættleiðing.

Galdandi ættleiðingarlóggáva ásetir eisini treytir fyri at verða góðkendur sum ættleiðari. Góðkenning sum ættleiðari er m.a. treytað av, at umsøkjari lýkir nøkur yvirskipaði og objektiv krøv, ið verða sett, og at ættleiðari sambært einari ítøkiligari meting verður mettur

egnaður at ættleiða eitt barn. Tey yvirskipaðu og objektivu krøvini eru krøv, ið verða sett umsøkjara í mun til aldur, samlív, heilsu-, bústaðar-, sosial- og fíggjarlig viðurskifti.

Galdandi ættleiðingarlóggáva ásetir eisini treytir fyri, at góðkenning sum ættleiðari verður ógildað.

Ættleiðingarlóggávan ásetir eisini treytir fyri burturættleiðing av børnum. Burturættleiðing er, tá ið foreldur burturættleiða barn sítt. Burturættleiðing kann vera ávíkavist sjálvboðin ella undir tvingsli.

Harumframt eru ásetingar um úrgildissetan av ættleiðing í ættleiðingarlógini. Eisini ásetir galdandi ættleiðingarlóggáva rættarvirknaðin av ættleiðing.

Ættleiðingarlóggávan ásetir reglar um miðling av børnum til ættleiðing og um eftirlit við ættleiðingarmiðlandi felagsskapum. Lógin hevur eisini ásetingar um revsing í samband við brot á forboðið um at veita ættleiðingarhjálp móti gjaldi, ella sum millummaður at veita gjald til tess at fáa samtykki til ættleiðing til vega.

Harumframt inniheldur galdandi ættleiðingarlóggáva reglar um kærur og kærumyndugleikar.

Galdandi lóg hevur verið fyri atfinningum, at tað yvirskipað verður veitt ov lítið av ráðgeving í mun til fremmandaættleiðing – íroknað, at tað ikki verður sett fram krav um ættleiðingarfyrireikandi skeið í samband við umsókn um góðkenning sum ættleiðari.

Á altjóða økinum er Føroyar ein partur av Haagersáttmálanum um altjóða ættleiðing, sí punkt 1.4.2.1.1.2 og 1.4.3.1.1.

### *1.4.1. Føroyskan av galdandi ættleiðingarlóggávu*

#### *1.4.1.1. Galdandi lóggáva*

Galdandi ættleiðingarlóggáva er á donskum. Lóggáva, ið er felags málsøki, er á donskum. Lóggáva, ið verður yvirtikin, er sostatt á donskum, inntil Løgtingið broytir lógina ella setur lógina úr gildi.

#### *1.4.1.2. Hugsanin hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum*

Galdandi ættleiðingarlóg er sostatt á donskum. Heilsu- og innlendismálaráðið metir, at galdandi ættleiðingarlóg skal vera á føroyskum. Um uppskot til broyting verður gjørt, vil hetta viðføra, at tann parturin av galdandi lóg, ið ikki verður broyttur, framhaldandi verður á donskum. Úrslitið av hesum vil vera ein lóg, ið er ávíkavist á føroyskum og donskum.

#### *1.4.1.3. Tilmælda skipanin*

Heilsu- og innlendismálaráðið mælir til, at málið verður framt, við at galdandi ættleiðingarlóg verður umsett til føroyskt og flutt yvir í eina nýggja løgtingslóg við omanfyrinevndu broytingum av galdandi ættleiðingarlóg. Ongar viðmerkingar eru tískil til uppskotið í mun til tann partin, ið bert er umsettur til føroyskt. Uppskotini til broytingar verða lýst nærri í viðmerkingunum. Viðmerkingarnar líkjast tískil viðmerkingum, ið verða gjørdar til broytingaruppskot.

Av tí at uppskotið leggur upp til, at lógin verður flutt yvir í eina nýggja løgtingslóg, koma lógargreinarnar í mun til galdandi ættleiðingarlóg at vera forskotnar og lógargreinar, ið ikki eru viðkomandi longur verða strikaðar. Av hesari orsøk er ein lógargreinslykil viðlagdur sum fylgiskjal.

### *1.4.2. Heimild til at gera avtalu við danskar myndugleikar viðvíkjandi fremmandaættleiðing*

#### *1.4.2.1. Galdandi lóggáva*

Ættleiðingarlógin ásetir sum nevnt í pkt. 1.4 treytirnar fyri ættleiðing og rættarvirknaðin av ættleiðing. Harumframt reglur um miðling av børnum til fremmandaættleiðing og um eftirlit við ættleiðingarmiðlandi felagsskapum.

Avgerðir um ættleiðing og um góðkenning sum ættleiðari verða í Føroyum tiknar av Ríkisumboðsmanninum smb. §§ 1 og 4 a, jf. § 25 a í ættleiðingarlógini.

Avgerðir hjá Rikisumboðsmanninum um ættleiðing kunnu sum útgangsstøði kærast til Ankestyrelsen, meðan avgerðir um góðkenning sum ættleiðari kunnu kærast til Adoptionsnævnet smb. § 25 b, og § 33 í ættleiðingarkunngerðini.

Aftaná yvirtøkuna kunnu avgerðir um ættleiðing kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum smb. § 43 í lógaruppskotinum, sí tær serligu viðmerkingarnar til § 43.

Í Danmark er tað Statsforvaltningen, ið tekur avgerðir um ættleiðing sbr. § 1 í donsku ættleiðingarlógini. Avgerðir hjá Statsforvaltningini um ættleiðing kunnu í útgangsstøðinum kærast til Ankestyrelsen sbrt. § 29 b, stk. 3 í donsku ættleiðingarlógini. Avgerðir um góðkenning sum ættleiðari verða tiknar av adoptónssamráðnum, og hesar avgerðir kunnu kærast til Adoptionsnævnet sbrt. § 25 a og § 25, b, stk. 3 í donsku ættleiðingarlógini.

Børne- og socialministeren kann sambært § 27 d, stk. 1 í ættleiðingarlógini og sambært § 30 í donsku ættleiðingarlógini lata einum privatum felagsskapi loyvi at veita ættleiðingarhjálp í mun til altjóða ættleiðing. Ættleiðingarhjálp fevnir millum annað um miðling av útlendskum børnum til ættleiðing í Føroyum og í Danmark. Sambært § 27 d, stk. 2 í ættleiðingarlógini hevur børne- og socialministeren eftirlit við einum felagsskapi, ið hevur fingið eitt tílíkt loyvi. Og sambært § 27, d, stk. 3 í ættleiðingarlógini kann børne- og socialministeren somuleiðis heimila Adoptionsnævnet at hava ftirlit við einum felagsskapi, ið hevur fingið eitt tílíkt loyvi. Sambært § 31 b í tí donsku ættleiðingarlógini hevur Ankestyrelsen eftirlit við einum felagsskapi, ið hevur fingið slíkt loyvi.

Børne- og socialministeren góðkennir harumframt sambært § 30 d, stk. 1 í tí donsku ættleiðingarlógini, frá hvørjum londum børn kunnu ættleiðast til Føroyar og Danmark - og kann taka avgerð um at steðga framhaldandi ættleiðing frá hesum londum. Ankestyrelsen góðkennir samstarvsfelagarnar hjá ættleiðingarmiðlandi felagsskapinum í londum, sum børne- og socialministeren hevur góðkent smb. § 30 d, stk. 2 í donsku ættleiðingarlógini.

Sum nevnt í pkt. 1.1 yvirtaka føroyskir myndugleikar ættleiðingarlóggávuna sum liður í yvirtøkuni av málsøkinum persóns-, húsfólka- og arvarættinum tann 29. juli 2018 sbrt. løgtingslóg nr. 69 frá 29. maj 2017 um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av málsøkinum persóns-, húsfólka- og arvarætti).

Sum liður í yvirtøkuni av málsøkinum persóns-, húsfólka- og arvarætti gjørdi Børne- og Socialministeriet í desember 2016 álitið "Færøernes overtagelse af sagsområdet person-, familie- og arveretten", ið inniheldur eina lýsing av ymiskum sjónarmiðum og avbjóðingum í samband við yvirtøkuna og uppskot til at loysa hesa avbjóðingar, millum annað á ættleiðingarøkinum.

Orsakað av hesum eru nakrar broytingar framdar av myndugleikabygnaðinum á ættleiðingarøkinum í Føroyum. Broytingarnar eru framdar við § 11 í løgtingslóg nr. 78 frá 29. mai 2017 um broyting í ymiskum lógum á málsøkinum persóns-, húsfólka- og arvarætti (myndugleikaflyting orsakað av yvirtøku av málsøkinum) og koma í gildi frá yvirtøkuni. Sambært hesum broytingum yvirtekur Familjufyrisitingin sum útgangsstøði uppgávurnar hjá Ríkisumboðsmanninum á ættleiðingarøkinum, og avgerðirnar hjá Familjufyrisitingini vilja kunna kærast til Kærunevndina í almenna-, familju- og heilsumálum. Landsstýrismaðurin yvirtekur uppgávurnar hjá børne- og socialministeren, burtursæð frá førleikanum til at viðgera kærumál, ið verður tillutað Kærunevndini í almenna-, familju- og heilsumálum.

Ættleiðingarreglarnar í ávíkavist Føroyum og Danmark samsvara yvirskipað við hvørja aðrar. Tó eru nógvar lógarbroytingar framdar í Danmark, ið ikki eru settar í gildi fyri Føroyar ella sum í samband við ígildiskomuna eru tillagaði serlig føroysk viðurskifti. Aftaná ígildiskomuna av hesum lógaruppskoti vilja reglarnar samsvara í størri mun.

Sambært § 27 a í ættleiðingarlógini og § 28 í donsku ættleiðingarlógini skal tann, ið hevur bústað í ávíkavist Føroyum ella í Danmark, ættleiða sambært reglunum í ættleiðingarlóggávuni í viðkomandi parti av ríkinum. Tað er sostatt bústaðurin hjá ættleiðingarumsøkjaranum, ið er avgerandi fyri, hvør lóggáva skal brúkast. Ættleiðingarlóggávan galdandi í Føroyum skal nýtast, um umsøkjarin hevur bústað í Føroyum, líkamikið um málið snýr seg um ættleiðing av einum barni, ið hevur bústað í Føroyum, í Danmark ella í útlandinum. Meðan tað í Danmark er tann galdandi lóggávan í Danmark, ið skal nýtast, um umsøkjarin hevur bústað í Danmark, líkamikið um málið snýr seg um ættleiðing av einum barni, ið hevur bústað í Føroyum, í Danmark ella í útlandinum.

#### *1.4.2.1.1. Fremmandaættleiðing*

Í samband við ættleiðing av einum barni, ið umsøkjarin ikki hevur familjutilknýti til (sokallað fremmandaættleiðing), tekur Ríkisumboðsmaðurin eftir tilmæli frá ættleiðingarsamráðnum avgerð, um umsøkjari kann góðkennast sum ættleiðari, tá umsøkjarin býr í Føroyum sbrt. § 4 a, jf. § 25 a í ættleiðingarlógini. Adoptiónssamráðið í Danmark tekur avgerðina, um umsøkjari býr í Danmark sbr. § 25 a í donsku ættleiðingarlógini.

Góðkenning sum ættleiðari kann nýtast antin til ættleiðing av einum barni, ið hevur bústað í Føroyum ella í Danmark (sokallað innanlanda ættleiðing, smb. pkt. 1.4.2.1.1.1.), ella til ættleiðing av einum barni, ið hevur bústað í einum øðrum landi enn Føroyar, Danmark og Grønland (sokallað altjóða ættleiðing smb. pkt. 1.4.2.1.1.2.).

Børn til innanlanda ættleiðing í Føroyum og í Danmark verða miðlaði av Adoptionsnævnet smb. § 31 í góðkenningarkunngerðini og § 64 í tí donsku ættleiðingarkunngerðini. Meðan DIA miðlar útlendsk børn til altjóða ættleiðing í Føroyum og í Danmark. DIA er einasti felagsskapurin, ið er góðkendur til at miðla útlendsk børn til ættleiðing í Føroyum og í Danmark smb. ávikavist § 27 d í ættleiðingarlógini og § 30 í tí donsku ættleiðingarlógini.

Eitt barn kann ikki ættleiðast sambært reglunum um fremmandaættleiðing, fyrr enn barnið er vorðið leysgivið til ættleiðing. Førleikin at leysgeva er í mun til innanlanda ættleiðing í Føroyum hjá Ríkisumboðsmanninum og í Danmark hjá Statsforvaltningini. Býr barnið í útlandinum, verður avgerð um leysgeving av barninum tikin av myndugleikunum í tí landinum, har barnið býr (altjóða ættleiðing). Í Føroyum er tað Ríkisumboðsmaðurin, ið tekur støðu til útlendsku leysgevingina smb. §§ 25 og § 26, stk. 1, í góðkenningarkunngerðini. Í Danmark er tað Ankestyrelsen ella Statsforvaltningin, ið tekur støðu til leysgevingina smb. § 31 a í donsku ættleiðingarlógini.

Galdandi rættarstøða sigur greitt, hvar umsókn um ættleiðing og umsókn um góðkenning sum ættleiðari skal latast inn. Ein umsøkjari kann sostatt ikki velja at søkja har, ið reglarnar um góðkenning eru serliga til fyrimuns fyri viðkomandi.

Góðkendir ættleiðarar standa á einum bíðilista til at ættleiða eitt barn. Tað eru felags bíðilistar fyri ættleiðarar góðkendir í ávikavist Føroyum og í Danmark til ættleiðing, bæði til innanlanda ættleiðing, har bíðilistin verður umsitin av Adoptionsnævnet, og til altjóða ættleiðing, har bíðilistin verður umsitin av DIA.

Ein góðkenning sum ættleiðari, ið er latin í einum parti av ríkinum, kann sostatt verða brúkt í einum øðrum parti av ríkinum. Um til dømis ein ættleiðingarumsøkjari, ið býr í Føroyum, er vorðin góðkendur sum ættleiðari í Føroyum og er komin á bíðilistan til innanlanda- ella altjóða ættleiðing, vil umsøkjarin varðveita sína góðkenning og sítt pláss á bíðilistanum, hóast umsøkjarin flytir til Danmarkar.

#### *1.4.2.1.1.1. Innanlanda fremmandaættleiðing*

Tá ið eitt barn við bústaði í Føroyum ella í Danmark verður leysgivið til innanlanda ættleiðing, verður góðkendur ættleiðari á viðkomandi bíðilista útvaldur at ættleiða barnið – hetta kallast ”greiping”.

Felags føroyski og danski bíðilistin til innanlanda ættleiðing inniber, at Adoptionsnævnet greipar børn, ið eru frígivin til innanlanda fremmandaættleiðing, við góðkendar umsøkjarar. Tó undantikið um leysgevingin er gjørd við atliti til, at barnið verður ættleitt av einum ávísum umsøkjara. Hetta ger seg galdandi bæði í mun til børn, ið verða leysgivin av Ríkisumboðsmanninum og av Statsforvaltningini í Danmark. Á sama hátt kunnu ættleiðingarumsøkjarar á bíðilistanum vera vorðnir góðkendir av Ríkisumboðmanninum ella av ættleiðingarsamráðnum í Danmark.

Útveljingin (greipingin) hjá Adoptionsnævnet av umsøkjarum til innanlanda fremmandaættleiðing verður gjørd sambært meting av, hvør umsøkjari er best egnaður at ættleiða tað ítøkiliga barnið, óansæð um umsøkjarin býr í Føroyum ella í Danmark smb. § 27, stk. 1 í kunngerð nr. 1864 frá 23. desember 2015 om forretningsordenen for Adoptionsnævnet.

***1.4.2.1.1.2. Altjóða fremmandaættleiðing***
Umveldisfyrivarnið fyri Føroyar viðvíkjandi Haagersáttmálanum varð tikið av við kunngerð nr. 6 frá 1. februar 2007.

Haagersáttmálin kom í gildi í Danmark 1.november 1997 sbrt. kunngerð nr. 125 frá 4. desember 1997. Sáttmálin er partvíst gjøgnumførdur í føroyskum rætti við ættleiðingarlógini. Í Danmark er sáttmálin gjøgnumførdur í donskum rætti við galdandi donsku ættleiðingarlóg.

Sambært Haagersáttmálanum grein 6 skal sentralmyndugleiki fyri sáttmálan veljast. Ankestyrelsen er vald til sentralmyndugleika í Danmark og er eisini vald sum sentralmyndugleiki í mun til Føroyar.

Haagersáttmálin inniheldur ásetingar um altjóða førleika í málum um altjóða ættleiðing og um viðurkenning og fullgerð av avgerðum um ættleiðing. Harumframt inniheldur sáttmálin ásetingar um altjóða samstarv um ættleiðing o.a.

Sáttmálin hevur til endamáls at tryggja, at altjóða ættleiðingar verða framdar til barnsins besta og við virðing fyri teimum grundleggjandi rættindunum, ið eru viðurkend í altjóða rætti. Tað snýr seg millum annað um at forða fyri barnaráni, sølu ella handli við børnum.

Sum sáttmálaland hava Føroyar og Danmark skyldu at tryggja, at allar ættleiðingar verða framdar í samsvari við meginreglarnar í sáttmálanum - óansæð um ættleiðingin er úr einum sáttmálalandi ella úr einum landi, ið ikki hevur bundið seg til sáttmálan.

Sambært § 30 d, stk. 1 í donsku ættleiðingarlógini avger børne- og socialministeren í hvørjum londum, ein ættleiðingarmiðlandi felagsskapur hevur loyvi at veita ættleiðingarhjálp, tvs.frá hvørjum londum børn kunna miðlast til ættleiðing í Føroyum og í Danmark. Somuleiðis er tað børne- og socialministeren, ið kann steðga ættleiðing frá ávísum londum.

Sambært stk. 2 í ásetingini er tað Ankestyrelsen, ið avger hvørjum myndugleikum, felagsskapum o.a. í londum, ið eru fevnd av stk. 1, ein ættleiðingarmiðlandi felagsskapur kann samstarva við um ættleiðingarhjálp og miðling av børnum til ættleiðing.

Børne- og socialministeren hevur givið DIA fulltrú at miðla børn við bústaði í útlandinum til altjóða ættleiðing til góðkendar ættleiðarar. DIA umsitur felags bíðilistar fyri ættleiðingarumsøkjarar, ið ynskja at ættleiða barn frá útlandinum, óansæð um umsøkjarin býr í Føroyum ella í Danmark.

***1.4.2.1.2. Eftirlit við ættleiðingarøkinum***
Sambært ættleiðingarlógini § 27 d, stk. 2 hevur børne- og socialministeren eftirlit við einum ættleiðingarmiðlandi felagsskapi. Somuleiðis kann børne- og socialministeren sambært ættleiðingarlógini § 27 d, stk. 3 heimila Adoptionsnævnet at føra eftirlit við einum ættleiðingarmiðlandi felagsskapi. Sambært § 31 b, stk. 1 í donsku ættleiðingarlógini er eftirlitið við ættleiðingarmiðlandi felagsskapi vorðið savnað eitt stað, nevnliga í Ankestyrelsen, ið førir leypandi og regluliga eftirlit við einum ættleiðingarmiðlandi felagsskapi. Í løtuni er tað bert DIA, ið er ættleiðingarmiðlandi felagsskapur í danska ríkinum. Eftirlitið við ættleiðingarmiðlandi felagsskapinum fevnir um teir yvirskipaðu fakligu førleikarnar, fíggjarligu- og fyriskipanarligu viðurskiftini, ásetan og uppkrevjing av gjøldum og viðgerð av ítøkiligum ættleiðingarmálum.

Ásetingarnar um eftirlitið hjá Ankestyrelsen við teimum ættleiðingarmiðlandi felagsskapunum varð í Danmark innført í donsku ættleiðingarlógina við lóg nr. 1740 frá 22. desember 2015 um eina nýggja ættleiðingarskipan o.a. Henda lóg er ikki sett í gildi fyri Føroyar. Í veruleikanum fevnir eftirlitið við virksemi hjá DIA í Danmark eisini um viðgerðina hjá DIA av ættleiðingarmálum viðvíkjandi Føroyum, tí viðgerðin av hesum málum í roynd og veru verður framd í Danmark.

Umframt hesum førir Adoptionsnævnet yvirskipað eftirlit við ættleiðingarøkinum í Føroyum og í Danmark. Hetta inniber eitt eftirlit við Ríkisumboðsmanninum og ættleiðingarsamráðunum. Adoptionsnævnet hevur harumframt til uppgávu at geva tilsøgn um yvirskipaði og ítøkilig viðurskifti, sum hevur týdning fyri eftirlitið hjá Ankestyrelsen við einum ættleiðingarmiðlandi felagsskapi smb. § 25 b, stk. 4 og stk. 6 í ættleiðingarlógini og §§ 22-25 í kunngerð om forretningsordenen for Adoptionsnævnet.

Ankestyrelsen kann í eftirlitsarbeiðnum við einum ættleiðingarmiðlandi felagsskapi nýta teir læknaligu førleikarnar í Adoptionsnævnet - til dømis við at biðja Adoptionsnævnet um at gjøgnumganga nøkur ættleiðingarmál við atliti til at lýsa trupulleikar og tema, sum eru tengd at eftirlitinum.

### *1.4.2.2 Hugsanin hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum*

Sum sæst í punkt 1.4.2.1.1 eru myndugleikar í Danmark við í viðgerðini av málum um fremmandaættleiðing, hóast ættleiðingarumsøkjarin er búsettur í Føroyum. Tað snýr seg í fyrstu syftu um greipingina av børnum hjá Adoptionsnævnet, ið eru frígivin til innanlanda fremmandaættleiðing. Um miðling hjá DIA av børnum við bústaði í útlandinum til góðkendar ættleiðarar, óansæð um hesir búgva í Føroyum ella í Danmark. Og eisini verða avgerðir um leysgeving av børnum til fremmandaættleiðing tiknar av myndugleikum í Føroyum ella í Danmark, óansæð um barnið verður ættleitt av einum ættleiðara búsitandi í Føroyum ella í Danmark.

Aftrat hesum kemur arbeiðið við málum um altjóða fremmandaættleiðing, ið verður framt av Ankestyrelsen sum sentralmyndugleiki sambært Haagersáttmálanum. Harumframt eru tað myndugleikar í Danmark, ið avgera, frá hvørjum londum børn kunnu ættleiðast til Føroyar og Danmark. Danskir myndugleikar kunnu eisini steðga ættleiðing frá ávísum londum og góðkenna samstarvsfelagar hjá tí ættleiðingarmiðlandi felagsskapinum í útlandinum.

Heilsu- og innlendismálaráðið metir, at føroyskir myndugleikar ikki innan yvirtøkuna kunnu náa at uppbyggja egna ættleiðingarskipan við innanlanda ættleiðingarmiðling, ið inniheldur ta nøktandi dygdina við rættartrygdini í hásæti. At uppbyggja egna skipan viðvíkjandi innanlanda ættleiðingarmiðling tekur tíð og tilfeingi. Viðmerkjast skal eisini, at hóast Føroyar yvirtekur ættleiðingarøkið, vil Ankestyrelsen, og tískil Danmark, framhaldandi sum sentralmyndugleiki sambært Haagersáttmálanum hava skyldu at føra eftirlit við viðgerðini hjá føroyskum myndugleikum av málum um altjóða ættleiðing.

Harumframt er tað umráðandi, at yvirtøkan av ættleiðingarlóggávuni ikki fær neiligan týdning fyri rættarstøðuna hjá borgarum, íroknað herbúgvandi persónum, ið eru góðkendir sum ættleiðarar, og sum í løtuni standa á bíðilista og bíða eftir at fá barn í boði.

Tað er semja ímillum Heilsu- og innlendismálaráðið og Børne- og Socialministeriet í Danmark um, at galdandi rættarstøða í mun til fremmandaættleiðing ynskist varðveitt eftir yvirtøkuna, soleiðis at Adoptionsnævnet framhaldandi skal greipa børn í mun til innanlanda ættleiðing, at Ankestyrelsen framhaldandi førir eftirlit við ættleiðingarmyndugleikum og ættleiðingarmiðlandi felagsskapum, at børne- og socialministeren framhaldandi avger, frá hvørjum londum børn kunnu ættleiðast til Føroyar og Danmarkar og framhaldandi kann steðga ættleiðing frá ávísum londum, at Ankestyrelsen framhaldandi skal góðkenna samstarvsfelagar hjá einum miðlandi felagsskapi í einum landi, sum børne- og socialministeren hevur góðkent, og at tann miðlandi ættleiðingarfelagsskapurin DIA framhaldandi kann miðla børn til ættleiðing til góðkendar ættleiðarar í Føroyum sbr. s. 68 í álitinum: Færøernes overtagelse af sagsområdet person-, familie- og arveretten. Hetta álit orðað av Børne- og Socialministeriet í desember 2016 inniheldur eina lýsing av ymiskum sjónarmiðum og avbjóðingum í samband við yvirtøkuna og uppskot til at loysa hesa avbjóðingar millum annað á ættleiðingarøkinum.

Heilsu- og innlendismálaráðið metir, at tað ikki er heimild í galdandi ættleiðingarlóg fyri at omanfyristandandi skipan til viðgerð av málum um fremmandaættleiðing kann halda fram eftir yvirtøkuna, tvs. eftir at Føroyar hevur yvirtikið ættleiðingarlóggávuna og viðgerðina av ættleiðingarmálum.

Tískil verður skotið upp í lógaruppskotinum, at heimild verður fingin til vega í ættleiðingarlógini til, at myndugleikar í Føroyum kunnu gera eina samstarvsavtalu við myndugleikar í Danmark um viðgerðina av málum um fremmandaættleiðing. Viðmerkjast skal, at í Danmark er uppskot lagt fram um, at danskir myndugleikar kunnu gera eina samstarvsavtalu við føroyskar myndugleikar um viðgerðina av málum um fremmandaættleiðing. Lógaruppskotið eitur nr. 11 FT 2017/2018 og hevur verið til 1. viðgerð í Fólkatinginum.

Henda heimild verður at nýta at áseta reglar, sambært hvørjum ættleiðingarmyndugleikarnir í einum parti av ríkinum aftaná yvirtøkuna kunnu viðgera eitt ættleiðingarmál, hóast málið hevur tilknýti til aðrar partar av ríkinum. Ættleiðingarmyndugleikar í Danmark skulu sostatt kunna viðgera eitt ættleiðingarmál, har ættleiðingarumsøkjararnir eru búsitandi í Føroyum.

Samstarvsavtalan skal eisini tryggja, at ein felagsskapur, ið er góðkendur til at miðla børn til altjóða ættleiðing sambært donsku ættleiðingarlógini, framhaldandi kann miðla børn til ættleiðing bæði til Føroyar og til Danmarkar. Eisini skal samstarvsavtalan tryggja, at Ankestyrelsen sum sentralmyndugleiki sambært Haagersáttmálanum framhaldandi skal føra eftirlit við virkseminum hjá felagsskapunum eisini í Føroyum. Ein samstarvsavtala skal eisini tryggja, at tað eru myndugleikar í Danmark, ið avgera, frá hvørjum londum børn kunnu ættleiðast til Føroyar og Danmarkar, sum kunnu steðga ættleiðing frá ávísum londum, og sum kunnu góðkenna samstarvsfelagar hjá ættleiðingarmiðlandi felagsskapum í útlandinum.

Fremmandaættleiðing er millum annað eyðkent við, at tað er vanligt, at tað ganga fleiri ár frá at umsókn um ættleiðing verður latin inn, til umsøkjari fær møguleika at ættleiða eitt barn. Sambært núverandi lóggávu millum ríkispartarnar, vil ein góðkendur umsøkjari, ið er á bíðilista til fremmandaættleiðing, hava høvi at flyta millum Føroyar og Danmark, uttan at hetta ávirkar góðkenningina ella støðuna á bíðilistanum. Harumframt vil ein góðkendur umsøkjari hava høvi at søkja um leingjan av góðkenningini har, ið viðkomandi býr, hóast tað er í einum øðrum parti av ríkinum enn upprunaliga.

Tískil fer at verða orðað í samstarvsavtaluni, at yvirtøkan av ættleiðingarlóggávuni ikki ávirkar galdandi skipan, har ein góðkenning sum ættleiðari, ið er givin í einum parti av ríkinum, eisini verður viðurkend í einum øðrum parti av ríkinum.

At enda verður orðað í samstarvsavtaluni, at avtalan bert verður galdandi, um tað framhaldandi verður samsvar millum lógarverkið viðvíkjandi fremmandaættleiðing í ávíkavist Føroyum og Danmark.

Aftrat samstarvsavtaluni vil Føroyar hava høvi at fáa vegleiðing frá viðkomandi donskum myndugleikum um spurningar viðvíkjandi ættleiðing, ið snúgva seg um viðurkenning av útlendskum skjølum. Eins og høvi verður at fáa ráðgeving viðvíkjandi innliti í útlendska lóggávu – til dømis í málum um stjúkbarna- og familjuættleiðing.

Samstarvsavtalan vil tryggja, at yvirtøkan av ættleiðingarlóggávuni ikki fær ávirkan á rættarstøðuna hjá borgarum. Avtalan vil tryggja ættleiðarar á bíðilista, komandi ættleiðarar innan fremmandaættleiðing, framtíðartryggja altjóða ættleiðingarmiðlan til Føroyar og tryggja neyðuga støðufestið í ættleiðingarskipanini. Harafturat verður tryggjað, at ættleiðing verður framd á fullgóðan og tryggan hátt.

***1.4.2.3. Tilmælda skipanin***

Skotið verður upp, at nýggj áseting verður orðað í ættleiðingarlógini sum § 29, ið gevur landsstýrismanninum heimild at gera samstarvsavtalu um lógarviðurskiftini millum Føroyar og Danmark innan ættleiðing. Samstundis skulu § 25 b í galdandi ættleiðingarlóg um heimildirnar hjá Adoptionsnævnet og § 27 d í galdandi ættleiðingarlóg um eitt nú eftirlit við teimum miðlandi felagsskapunum og krøvini til teir miðlandi felagsskapirnar strikast í ættleiðingarlógini, tí hetta skal regulerast í samstarvsavtaluni. Viðmerkjast skal eisini, at tað stendur í løgtingslóg nr. 69 frá 29. maj 2017 um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av málsøkinum persóns-, húsfólka- og arvarætti), at avgjørt er ikki at seta serstaka Ættleiðingarnevnd á stovn í Føroyum. Harafturímóti skal tað framganga av samstarvsavtaluni, at føroyskir myndugleikar hava møguleika at seta spurningar til danska Adoptionsnævnet, um ivamál eru.

Tílík samstarvsavtala skal vera karmur um samstarvið millum føroyskar og danskar myndugleikar innan fremmandalættleiðing eftir føroysku yvirtøkuna av ættleiðingarøkinum.

Samstarvsavtalan vil serliga áseta málsræði hjá myndugleikum og ættleiðingarmiðlandi felagsskapum, tá eitt ættleiðingarmál hevur tilknýti til fleiri ríkispartar.

Við atliti til altjóða fremmandaættleiðing vil samstarvið viðføra, at ein ættleiðingarmiðlandi felagsskapur fær høvi at miðla børn frá útlandinum til allar ríkispartar. Og at eftirlitið við felagsskapum verður framt av donskum myndugleikum, eins og danskir myndugleikar kunnu verða tiknir uppí málsviðgerð um góðkenning sum ættleiðari.

Tað fara framhaldandi at vera myndugleikar í Danmark, ið avgera, frá hvørjum londum børn kunnu ættleiðast til Føroyar og Danmark. Samstundis verða tað myndugleikar í Danmark, ið kunnu stegða ættleiðing frá ávísum londum.

Eisini verða tað framhaldandi myndugleikar í Danmark, ið skulu góðkenna samstarvsfelagar hjá ættleiðingarmiðlandi felagsskapum í teimum londum, ið felagsskapurin er góðkendur til at miðla børn til ættleiðing frá.

At enda skal í samstarvsavtaluni vera reglar um uppsøgn av avtaluni við ávísari tíðarfreist. Til dømis um verandi samsvar í lóggavuni á ættleiðingarøkinum dettur burtur, serliga í mun til góðkenning av ættleiðara, leysgeving av børnum til ættleiðing og greiping av børnum við ættleiðara.

Avtalað er við Børne- og Socialministeriet í Danmark, at Børne- og Socialministeriet leggur uppskot um fólkatingslóg fram, soleiðis at ásett verður í ættleiðingarlóggávuni við gildiskomu 29. juli 2018 ein áseting, ið svarar til uppskotið um áseting í ættleiðingarlógini § 25 c. Lógaruppskotið varð lagt fram 4. oktober 2017 sum lógaruppskot nr. 11 FT 2017/2018. Uppskotið hevur verið til 1. viðgerð í Fólkatinginum.

Havast skal í huga, at hóast Føroyar yvirtaka ættleiðingarøkið, so hevur Danmark skyldu sambært Haagersáttmálanum um altjóða ættleiðing at hava eftirlit við viðgerðini hjá føroyskum myndugleikum í mun til altjóða ættleiðing.

### *1.4.3. Ráðgeving og stuðul til familjuna í samband við fremmandaættleiðing*

#### *1.4.3.1. Galdandi lóggáva*

##### *1.4.3.1.1.Haagersáttmálin*

Í Haagersáttmálanum grein 5, litra b stendur, at móttakaraland áðrenn ættleiðingina skal tryggja sær, at komandi ættleiðarar hava fingið ráðgeving í tann mun, tað tørvar. Eisini stendur í sáttmálanum grein 9, litra c, at sentralmyndugleikin antin beinleiðis ella umvegis almennar myndugleikar ella góðkendar felagsskapir í landinum skal fremja neyðugu menningina av ráðgeving og stuðli eftir ættleiðing í viðkomandi landi.

Harumframt stendur í viðmerkingunum til grein 5, litra b, at móttakaralandið avger, hvør er skikkaður myndugleiki – tað kann antin vera ein rættarligur ella umsitingarligur myndugleiki ella sentralmyndugleikin sjálvur.

Sambært grein 5, litra b er ikki talan um beinleiðis foreldraútbúgving – ráðgevingin skal passa til slagið av ættleiðing, ið talan er um. Tørvur er ikki á somu ráðgeving við t.d. stjúkbarna- ella familjuættleiðing, har umsøkjarar og barnið longu kenna hvønn annan. Hetta samanborið við fremmandaættleiðing, har barnið vanliga hevur verið á stovni í eitt tíðarskeið og eisini kann hava eitt heilt øðrvísi mentanarligt upphav. Eisini er tørvurin á ráðgeving til ættleiðarar, ið áður hava ættleitt, væntandi avmarkaður.

Tann ráðgeving, ið skal veitast til komandi ættleiðarar, kann sambært orðaljóðinum í ásetingunum í sáttmálanum verða givin fram til tað mundið, tá ættleiðingin verður framd.

Grein 5, litra b skal síggjast í ljósinum av grein 9, litra c soleiðis, at sentralmyndugleikarnir í ymisku londunum antin beinleiðis ella umvegis almennar myndugleikar ella góðkendar felagsskapir ella stovnar í landinum skulu gera neyðug tiltøk at tryggja menningina av ráðgeving og stuðli eftir ættleiðing.

Í viðmerkingunum til sáttmálan fevnir hugtakið ráðgeving um bæði ráðgeving áðrenn og eftir ættleiðing. Ráðgevingaruppgávankann ikki veitast út til ávísar/tilvildarligar persónar ella ikki-góðkendar eindir – og menningin av ættleiðingarráðgeving skal fremjast eftir fastløgdum leið- og meginreglum, sum sentralmyndugleikin hevur ábyrgdina fyri at tryggja.

Í frágreiðingini til grein 9, litra c, verður dentur lagdur á týdningin av ráðgeving og stuðli eftir ættleiðingin er framd fyri at tryggja, at barnið fellur til í nýggja heiminum, og at ættleiðingin sum heild verður væleydnað.

Hvørki sáttmálin ella frágreiðingin lýsa nærri innihaldið í hugtøkunum ráðgeving og stuðul – íroknað hvør ráðgeving skal verða givin áðrenn og aftaná, at ættleiðingin er framd, og hvussu umfatandi ráðgevingin skal vera.

Ásetingarnar í grein 5 og 9 eru sera leysliga orðaðar, og tískil skulu londini sjálv hvør í sínum lagi neyvt áseta, hvat innihaldið í ráðgevingini skal vera. Havast skal í huga, at sáttmálin er gjørdur av 66 londum við ymiskari ættleiðingarlóggávu og siðvenju.

Eingin ivi er tó um, at sáttmálin leggur dent á týdningin, at ættleidd børn koma til vælfyrireikaðar familjur. Tískil er trupult at tulka sáttmálan øðrvísi enn, at sentralmyndugleikin skal tryggja sær, at umsøkjararnir hava fingið slíka ráðgeving, at tey eru klár at taka ímóti einum ættleiddum barni, og at ráðgevingin er framd áðrenn umsøkjararnir játta at taka ímóti einum ítøkiligum barni. Eisini hava sáttmálalondini bundið seg og hava skyldu til at menna nøktandi ráðgeving og stuðul í samband við ættleiðing.

Frágreiðingin til sáttmálan nevnir, at tað eigur at vera samsvar millum fyrireikingina av umsøkjarunum og ráðgevingina, ið ættleiðararnir fáa bjóðaða eftir ættleiðingina.

Sambært sáttmálanum eigur sentralmyndugleikin eftir ættleiðingina í minsta lagi hava tilboð um viðkomandi ráðgeving til ættleiðarar og ættleidd børn – eins og hava skipaða eftirútbúgving av sosialráðgevum, terapeutum, læknum, heilsufrøðingum, lærarum og øðrum fakbólkum, ið koma í samband við ættleidd. Staðfest verður, at góð ráðgeving av ættleiðarum aftaná ættleiðingina kann vera avgerandi at tryggja trivnaðin hjá ættleidda barninum og samstundis fyribyrgja trupulleikum í framtíðini hjá tí ættleidda. Eisini stendur, at upprunamentanin og sambandið hjá barninum við gevaralandið at seta dám á ráðgevingina, eftir at ættleiðingin er framd. Post Adoption Service (PAS) er altjóða heitið fyri vegleiðing, stuðul og ráðgeving, ið er ætla til ættleiðingarfamiljum og ættleiddum aftaná ættleiðingina. Føroyar/sentralmyndugleikin hevur skyldu til at styrkja hetta arbeiðið sambært Haagersáttmálanum, tí tað er týdningarmikið, at barnið varðveitir eitt tilknýti til sín mentanarliga uppruna.

#### *1.4.3.1.2. Galdandi innanlanda lóggáva um ráðgeving*

Tá Ríkisumboðsmaðurin fær eina umsókn um góðkenning sum ættleiðari, skal Ríkisumboðsmaðurin eftir galdandi rættarstøðu tryggja, at umsøkjararnir í samband við forkanningina hava fingið nøktandi ráðgeving. Hetta er sambært góðkenningarkunngerðini § 12, stk. 3.

Forkanning er heitið á kanningini, ið Ríkisumboðsmaðurin ger, tá hann fær umsókn um góðkenning sum ættleiðari, og sum avgerðin, um umsøkjari kann verða góðkendur at ættleiða, verður grundað á. Forkanningin kann í útgangsstøðinum býtast í tvey – fyrst verður kannað, um umsøkjararnir lúka tær yvirskipaðu og objektivu treytirnar fyri at verða góðkendir. Hesar treytir umfata krøv til samlívið hjá umsøkjarunum, aldur, heilsu-, bústaðar-, sosial- og fíggjarviðurskifti. Í øðrum lagi ger myndugleikin eina meting av persónliga og kensluliga

tilfeinginum hjá umsøkjarunum í mun til at veita umsorgan mótvegis einum ættleiddum barni. Tvs. um umsøkjarin hevur eginleikarnar at ættleiða eitt barn. Í praksis verður forkanningin framd soleiðis, at kanningin, um umsøkjararnir lúka tær yvirskipaðu og objektivu treytirnar, verður framd fyrst. Um so er, verður hildið fram við at kanna, um umsøkjararnir eru egnaðir at ættleiða.

Ráðgevingin og vegleiðingin hjá Ríkisumboðsmanninum verður veitt í størsta mun í samband við forkanningina. Hetta merkir, at ráðgevingin av umsøkjarunum er tengd at somu kanning, ið verður framd fyri at avgera, um umsøkjararnir skulu góðkennast at ættleiða.

Forkanningin skal staðfesta, hví umsøkjararnir ynskja at ættleiða, og hvat tey vænta sær av ættleiðingini og ættleidda barninum. Ráðgevingin skal tryggja, at umsøkjararnir fáa innlit í støðuna hjá ættleidda barninum, eins og vegleiða og fyrireika umsøkjararnar til avbjóðingarnar og trupulleikarnar, ið kunnu vera tengdir at eini ættleiðing.

Endamálið, við at tengja ráðgevingina og kanningartilgongdina saman, hevur verið at tryggja, at forkanningin hevur eitt ávíst viðkomandi innihald mótvegis umsøkjarunum, og at ráðgevingin verður laga til tørvin, ið umsøkjararnir hava.

Ráðgevingin verður í dag givin í samband við samrøður hjá ávíkavist Ríkisumboðsmanninum og á heimavitjan hjá umsøkjarunum av málsviðgeranum. Samrøðurnar hava m.a. til endamáls at tryggja, at umsøkjararnir veruliga fáa avklárað, um tey ynskja at ættleiða – og at tryggja, at tey skilja munin á at ættleiða og fáa eitt egið barn.

Ríkisumboðsmaðurin hevur gjørt ein faldara, sum verður latin persónum, ið umhugsa at ættleiða. Í faldaranum verður greitt frá teimum yvirskipaðu reglunum í samband við góðkenning sum ættleiðari, og hvussu forkanningin er skipað v.m. Sostatt lýsir faldarin ta formligu góðkenningartilgongdina. Faldari er ikki gjørdur um avbjóðingar og trupulleikar, ið kunnu vera tengdir at ættleiðing.

Tá eitt barn kemur í uppskot, ið liggur innan góðkenningarkarmin hjá umsøkjara, verður ikki veitt nøkur ráðgeving í tí sambandinum. Um barnið er uttanfyri góðkenningarkarmin hjá umsøkjara, hevur umsøkjari møguleika at seta seg í samband við barnalæknar, ið eru tilnevndir av Adoptionsnævnet, og sum kunnu vegleiða umsøkjara, sbr. § 20, stk. 3 í góðkenningarkunngerðini. Ynskir umsøkjarin at søkja um at fáa víðkað góðkenningina til ítøkuliga barnið, verður umsøkjarin kallaður til fundar hjá Ríkisumboðsmanninum. Málið verður tá umrøtt, íroknað heilsuviðurskiftini hjá barninum og týdningin av hesum sambært barnalækna hjá Adoptionsnævnet. Endamálið við fundinum er at tryggja, at umsøkjararnir kunnu taka eina so væl grundaða avgerð sum gjørligt.

Tá eitt ættleitt barn er heimtikið, skal Ríkisumboðsmaðurin bjóða ættleiðarunum vegleiðing og heimavitjan eftir, at barnið er heimtikið smb. góðkenningarkunngerðini § 35, stk. 1. Vegleiðingin kann vera umvegis telefon. Endamálið við vitjanini og/ella telefonisku vegleiðingini er at veita ættleiðarunum ráðgeving viðvíkjandi spurningum um tilknýti og t.d. viðurskifti kring mat og svøvn. Málsviðgerin kann eisini vísa ættleiðarunum á viðkomandi stuðulsmøguleikar og námsfrøðiliga hjálp, um tørvur er á hesum. Ríkisumboðsmaðurin skal eisini gera uppfylgjandi frágreiðingar um barnið eftir heimtøkuna. Tað er gevaralandið, ið krevur tílíkar frágreiðingar. Talið av uppfylgjandi frágreiðingum er ymiskt í mun til gevaraland. Í samband við at uppfylgjandi frágreiðingarnar verða gjørdar, verður eisini veitt ráðgeving eftir tørvi og ynski hjá ættleiðarunum. Heimavitjanin í samband við uppfylgjandi frágreiðingina til gevaralandið verður nýtt til at lýsa støðuna hjá ættleidda barninum – eisini verður høvið nýtt at veita ættleiðarunum ráðgeving eftir tørvi um ivamál tengd at ættleiðingini.

Í hesum sambandi kann málsviðgerin eisini vísa á stuðulsmøguleikar og námsfrøðiliga hjálp, um tørvur er á tí.

Gigni hevur tilboð um heimavitjan áðrenn og aftaná heimtøku av ættleiddum barni – eins og tilboð um mammubólkar, eisini meðan bíðað verður eftir barni. Gigni hevur heilsufrøðingar, ið hava serstaka vitan innan ættleiðing. Ráðgevingin hjá Gigni er ikki kravd, men eitt tilboð.

Gigni hevur saman við Ríkisumboðsmanninum skipað fyri temakvøldum fyri ættleiðarum. Gigni skipar eisini fyri fyrilestum ætlaðum komandi ættleiðarum, ættleiddum og foreldrum at ættleiddum.

Umsøkjarar, ið ynskja at ættleiða, hava eisini møguleika at fáa ráðgeving hjá DIA og Adoptionsnævnet, ið miðla børn, ið eru vorðin leysgivin til ættleiðing í Føroyum og í Danmark. DIA bjóðar persónum, ið umhugsa at ættleiða, eina mappu við kunningartilfari um m.a. ættleiðingarreglar, tilgongdina, felagsskapin og við ávísingum til lesitilfar um ættleiðing.

Adoptionsnævnet hevur sum almennur myndugleiki kunningarskyldu í mun til umsøkjarar, ið ynskja at ættleiða eitt barn, ið er leysgivið til ættleiðing í Føroyum ella í Danmark. Sambært heimildarsáttmálanum hevur DIA eina vegleiðingarskyldu í mun til umsøkjarar í samband við kunning um val av landi og bíðitíð. Umsøkjarar verða eisini kunnaði um tær óvissur, ið eru til staðar í mun til altjóða ættleiðing – íroknað, at tað er ikki vist, at ein fær eitt barn í boði, hóast ein er góðkendur at ættleiða og stendur á bíðilista hjá DIA. Tá umsøkjararnir hava valt hvørjum landi, tey ynska at ættleiða frá, fáa tey eitt rúgvismikið kunningartilfar útflýggjað um viðkomandi land – hetta fyri at umsøkjararnir kunnu fáa størri kunnleika til landið og harvið eisini størri kunnleika til mentanarliga upphavið hjá einum komandi ættleiddum barni. Harafturat kunnu umsøkjararnir eisini fyrireika seg til at vera í viðkomandi landi í samband við, at barnið verður heintað. Útflýggjaða tilfarið hevur eisini smáar orðabøkur, ið skulu hjálpa umsøkjarunum at samskifta við barnið, kunning um farloyvi o.a. Øll gevaralond krevja í dag, at umsøkjararnir sjálvi ferðast til landið fyri at heinta barnið. DIA hevur tilboð um at skipa fyri teimum praktisku viðurskiftunum kring ferðing og uppihald. Eisini kann DIA vegleiða, hvussu málið verður viðgjørt í gevaralandinum og syrgir fyri, at ein kontaktpersónur verður tøkur at vera til handa í mun til myndugleikarnar í gevaralandinum og at svara ymiskum praktiskum spurningum.

Ættleiðingarfelagið, ið er ein privatur felagsskapur av ættleiddum og foreldrum at ættleiddum í Føroyum, skipar við jøvnum millumbilum fyri felags tiltøkum bæði til álvara og gaman. Eisini skipar Ættleiðingarfelagið fyri serligum bólkum fyri ættleidd.

Nevnast skal, at tað harafturat er ein røð av tilboðum um ráðgeving, vegleiðing og annan stuðul, bæði í almennum og privatum høpi ætlað barnafamiljum sum heild, íroknað familjum við børnum, ið eru ættleidd.

Í galdandi ættleiðingarlóg er ikki orðað nakað ítøkiligt krav um skipan av ráðgeving/kunning, tilboð um ráðgeving, stuðulsskipan ella krav um ávísa kunning til umsøkjarar áðrenn ella aftaná ættleiðing.

Verandi góðkenningartilgongd hevur onga kravda ráðgeving, kunning ella vegleiðing av umsøkjarum og ættleiðarum. Ei heldur er nakað skipað ítøkiligt tilboð um ráðgeving, stuðul ella kunning til góðkendar umsøkjarar áðrenn ella aftaná heimtøku av einum barni.

Í galdandi ættleiðingarlóg í Føroyum er ei heldur orðað nakað ítøkiligt tilboð til ættleidd børn ella vaksin.

### *1.4.3.2. Hugsanin hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum*

#### *1.4.3.2.1. Forkanningin*

Heilsu- og innlendismálaráðið metir, at tað er sera sannlíkt, at umsøkjararnir ikki geva sær far um ráðgevingina í nóg stóran mun, ið verður veitt av Ríkisumboðsmanninum í samband við forkanningina, tí tey samstundis verða kannaði, um tey skulu góðkennast at ættleiða. Tískil er ein óheppin samanrenning millum ráðgevingina og kanningararbeiðið í verandi skipan. Samstundis er tað óheppið, at innihaldið av kunningini og vegleiðingini er í stóran mun tilvildarliga tengt at, hvør ávíkavist málsviðgerin og umsøkjararnir eru, tí tað er ikki skipað á fullgóðan hátt. Eisini kann ein ímynda sær, at umsøkjararnir ikki tora at geva sínar hugsanir til kennar og seta viðkomandi spurningar til ættleiðing, tá tey eru til samrøðu hjá Ríkisumboðsmanninum ella heima – hetta, tí tey eru greið yvir, at samrøðurnar eru týðandi grundarlag undir avgerðini, um tey verða mett at vera egnaði at ættleiða.

Forkanningin nemur við nógv persónlig og viðkvom viðurskifti hjá umsøkjarunum. Eisini eru sum oftast viðkvom viðurskifti kring upprunan hjá ættleidda barninum.

Heilsu- og innlendismálaráðið metir, at ráðgevingin innan ættleiðing eigur at verða styrkt munandi. Tað er týdningarmikið, at komandi ættleiðingarforeldur í størsta mun verða fyrireikaði til komandi ættleiðingina. Avgerandi er, at tey fáa eitt innlit í avbjóðingarnar, ið standa av ættleiðing, so tey vera væl fyrireikaði og før at møta hesum avbjóðingum og trupulleikum. Herbúgvandi ættleiðarar og Ættleiðingarfelagið hava í eitt áramál sóknast eftir, at ráðgevingin kring ættleiðing verður styrkt.

Eitt økt innlit hjá umsøkjarunum í avbjóðingarnar og trupulleikarnar í samband við ættleiðing ger, at tey fáa eitt betri grundarlag at gera teirra egnu meting, um tey hava neyðugu førleikarnar at ættleiða eitt fremmant barn.

Í Svøríki, Íslandi, Noregi, Danmark og Hollandi verður skipað fyri fyrireikandi skeiðum til ættleiðing. Í Danmark varð krav um ættleiðingarfyrireikandi skeið ásett í 2000.

Eitt kravt ættleiðingarfyrireikandi skeið skal tryggja, at umsøkjarar til ættleiðing fáa bestu førleikar sjálv at meta um teirra ynski og orsøk at ættleiða – umsøkjararnir fáa eitt størri innlit í hvussu avbjóðandi ættleiðing kann vera. Umsøkjararnir mugu við sjálvrannsakan avgera, um tey hava neyðuga tilfeingið at ættleiða ella ikki. Tílíkt skeið er bert ætlað at fyrireika umsøkjararnar, og ikki at vera eitt amboð hjá myndugleikunum at meta um umsøkjararnar í mun til góðkenning.

Um umsøkjarar eftir lokið skeið framvegis ynskja at ættleiða, eru tey vorðin væl fyrireikaði til tað framhaldandi kanningararbeiðið.

Viðkomandi ráðgeving er sera týdningarmikil í málum um ættleiðing, tí at móttaka eitt ættleitt barn setur heilt onnur krøv til foreldur enn at fáa teirra egna barn.

Lógaruppskotið vil broyta góðkenningarkarmin, sí 1.4.7.1.2 og 1.4.7.2.2. Tískil er týdningarmikið, at umsøkjarar verða kunnaðir um, hvat tað merkir at ættleiða eitt fremmant og møguliga eldri barn – antin útlendskt ella danskur ríkisborgari.

Aðalmálið er altíð at tryggja allarbestu kor fyri barnið. Tað er sera umráðandi, at umsøkjarar fáa neyðugu vitanina kring ættleiðing. Tískil eigur størri dentur at verða lagdur á ráðgeving og kunning til umsøkjarar framyvir, so komandi ættleiðingar kunnu verða so væleydnaðar sum gjørligt – og tryggja tað, ið er best fyri barnið.

### *1.4.3.2.2. Ráðgeving beint áðrenn og aftaná, at barnið, ið verður ættleitt, kemur at búgva hjá ættleiðara – og onnur ráðgeving*

Eingin lógaráseting er um innihaldið ella vavið av ráðgeving, tá umsøkjari er vorðin góðkendur at ættleiða, fær barn í boði og eftir heimtøku. Ráðgevingin, ið ein kann fáa hjá Ríkisumboðsmanninum ella frá Gigni, er heilt sjálvboðin og ikki kravd.

Ríkisumboðsmaðurin hevur upplýst, at bíðitíðin frá góðkenning at ættleiða, til eitt barn kann verða heimtikið, er í minsta lagi 2 ár og kann lættliga vera 4 ár ella longri.

Luttøka á ættleiðingarfyrireikandi skeiði, sum hetta lógaruppskot leggur upp til skal setast í verk, sí punkt 1.4.3.3.1, kann tískil hava verið fleiri ár undan, at eitt barn verður heimtikið. Ráðgevingin á tílíkum fyrireikandi skeiði er eisini um ættleidd børn yvirskipað og tekur ikki støði í tí ítøkuliga ættleidda barninum.

Tá ættleiðarar fáa eitt barni í boði er talan um eitt ítøkiligt barn við sínari egnu søgu og heilsuupplýsingum. Tá barnið verður tikið heim, broytist tilveran í stóran mun, tí nú er talan um eitt veruligt barn, ið fyllir hugaheimin. Avbjóðingarnar og trupulleikarnir kunnu byrja at hópa seg upp, um foreldrini og tey ættleiddu ikki fáa nøktandi ráðgeving og stuðul.

Tískil hevur Heilsu- og innlendismálaráðið ta fatan, at ráðgevingin kring ættleiðing eigur at verða styrkt. Týdningarmikið er, at ættleiðingarfamiljurnar fáa neyðugu amboðini at loysa trupulleikarnar, ið uppstanda, tá ættleitt verður. Heilsu- og innlendismálaráðið metir, at kravd ráðgeving, ið tekur støði í einstaka ættleidda barninum og ættleiðara, beint innan og aftaná, at barnið er heimtikið, fer at tryggja eitt munandi betur útgangsstøði fyri einari væleydnaðari ættleiðing enn við núverandi skipan – aðalmálið er at tryggja tað, ið er best fyri barnið.

Kravd ráðgeving beint innan og aftaná heimtøku av barni fer at leggja lunnar undir eina góða byrjan til nýggja lívið hjá ættleidda barninum og ættleiðingarfamiljuni sum heild – og eisini vónandi at tryggja góðar karmar kring uppvøksturin hjá barninum. Ráðgevingin er ikki treytað av, at tað eru trupulleikar til staðar kring einstøku ættleiðingina. At ráðgevingin verður kravd merkir, at øll skulu hava somu fortreytir, tá ættleitt verður – og at givið verður til kennar, at ráðgeving er tøk at tryggja tað, ið er best fyri barnið.

Kravda ráðgevingin er at meta sum eitt fyribyrgjandi tiltak, og tískil er týðningarmikið, at krav verður ásett, at øll fáa eina beinleiðis, ítøkiliga ráðgeving beint innan og aftaná, at barnið verður heimtikið.

Sum stendur í punkt 1.4.3.1.2 er eingin áseting í sjálvari ættleiðingarlógini um ráðgeving, ei heldur um innihald ella vavið. Tann ráðgeving, ið verður boðin, er upp til hvønn einstakan at taka ímóti.

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur ta fatan, at viðkomandi tilboð um ættleiðingarráðgeving, tá tørvur er á hesum, vil vera ættleiðingargongdum og serliga teimum ættleiddu børnunum at frama, sum tey vaksa til.

Royndir frá Danmark vísa, at kravda ráðgevingin beint innan og aftaná heimtøku, eins og tilboð um ráðgeving aftrat hesum, tá barnið veksur til, hevur verið sera væl umtókt hjá ættleiðingarfamiljum. Ráðgevingin hevur hjálpt mongum familjum og livir tískil upp til berandi meginregluna í Haagersáttmálanum um atlitið at tryggja tað, ið er best fyri barnið.

Vísast kann í hesum sambandi til frágreiðingina “Helhedsanalyse af det danske adoptionssystem - adoptivfamiliens forhold”, ið varð útgivin av Ministeriet for Børn, Ligestilling, Integration og Sociale Forhold í september 2014.

### *1.4.3.3. Tilmælda skipanin*

Við omanfyri nevnda í huga metir Heilsu- og innlendismálaráðið, at tað er tørvur á at styrkja ráðgevingina, ið verður veitt av tí almenna til persónar, ið søkja um at verða góðkendir sum ættleiðarar av einum fremmandum barni. Hetta er galdandi bæði í mun til góðkenningartilgongdina, í samband við at ættleiðari fær barn í boði og eftir heimtøkuna av barninum.

#### *1.4.3.3.1. Forkanningin*

Í samband við forkanningina um góðkenning at ættleiða mælir Heilsu- og innlendismálaráðið til, at krav verður ásett um fyrireikandi ættleiðingarskeið, sí § 27 í uppskotinum.

Skeiðið skal sambært uppskotinum liggja beint eftir, at tað er vorðið greitt, at umsøkjari lýkir tey yvirskipaðu krøvini til góðkenning, men áðrenn mett verður um umsøkjari er egnaður at ættleiða. Við fyrireikandi skeiðinum verður umsøkjari latin í til sjálvur at meta um egnar førleikar og tilfeingi at ættleiða. Avgerandi er, at skott er millum skeiðið og metingina av førleikanum at ættleiða hjá myndugleikanum – hetta fyri at tryggja, at umsøkjararnir kenna skeiðið at vera eitt frírúm, har tey kunnu deila tankar og hugsanir um ættleiðing. Skeiðshaldararnir hava tagnaðarskyldu. Fyrireikandi skeiðið er ein almenn uppgáva at varða av.

Skeiðið er ikki bert til fyrimuns fyri umsøkjararnar, men eisini til frama fyri ættleiddu børnini, og tískil eigur skeiðið at vera kravt hjá teimum, ið søkja um góðkenning at ættleiða fyri fyrstu ferð, sí § 27, stk. 1. í uppskotinum.

Við aðalmálinum hjá Haagersáttmálanum í huga um at verja atlitið til barnsins besta, hevur Heilsu- og innlendismálaráðið ta fatan, at í summum førum er eisini galdandi, at tey, ið søkja fyri aðru ferð, hava tørv á at koma á fyrireikandi skeið. Til dømis kann tað vera viðkomandi at fáa ráðgeving um avbjóðingar millum systkin, ið verða ættleidd – t.e. hvussu systkin góðtaka hvønn annan, svartsjúka millum systkin v.m.

Tískil verður skotið upp, at Familjufyrisitingin fær høvi eftir reglum, ásettum av Heilsu- og innlendismálaráðnum, at avgera, at persónar, ið áður hava ættleitt eitt barn frá fremmandum landi, skulu luttaka í einum ættleiðingarfyrireikandi skeiði fyri at verða góðkend av nýggjum at ættleiða, um tørvur er á tí, sí § 27, stk. 2 í uppskotinum.

Nærri reglur um innihaldið og hvussu skeiðini skulu skipast, og hvør skal skipa tey, verður ásett av landsstýrismanninum, sí § 27, stk. 3 í uppskotinum. Landsstýrismaðurin ætlar at áseta reglur um, at umsøkjarar skulu hava prógv fyri luttøku á kravda skeiðnum, men krav verður ikki ásett um roynd ella próvtøku, tá skeiðið er lokið.

Innihaldið í skeiðnum skal vera soleiðis skipað, at tað tryggjar, at umsøkjararnir gera eina sjálvrannsakan í mun til teirra orsøk at ættleiða og teirra foreldraførleika – og at innihaldið er kunnandi í mun til serligu støðuna, sum ættleidda barnið hevur, og týdningin av tí í mun til komandi ættleiðarar. Dentur skal verða lagdur á lívið sum ættleiðari, vegurin til avgerðina at ættleiða, týdningin av barnloysi, saknurin eftir einum barni, samlívið og á søgurnar, ið umsøkjararnir hava í viðførinum, hvussu teirra egni uppvøkstur hevur verið, og teirra førleika

at knýta bond. Dentur skal eisini verða lagdur á lívið sum ættleiðingarfamilja, uppruna foreldrini hjá barninum og upprunan og lívið áðrenn ættleiðing hjá barninum. Eisini eigur at verða umrøtt hvønn týdning tilknýti hevur fyri barnið, og hvussu ættleidda barnið og ættleiðarar fáa eitt gott tilknýti.

Skeiðið skal vera skipað í mun til veruleikan í mun til aldur og heilsu hjá børnunum, ið vanliga verða leysgivin til altjóða ættleiðing í dag. At góðkenningarkarmurin verður broyttur ger eisini eina tílíka tillaging av innihaldinum av skeiðnum meira átrokandi – víst verður til viðmerkingarnar í nr. 1.4.7.1.2 og 1.4.7.2.2.

Fyrireikandi skeiðini skulu helst verða hildin soleiðis, at viðgerðin av umsóknunum hjá umsøkjarunum ikki verður seinkað óneyðuga leingi – sostatt skulu skeiðini helst verða hildin innan ein mánaði er farin frá, at Familjufyrisitingin hevur mett, at umsøkjari lýkir tey yvirskipaðu og objektivu krøvini til góðkenning.

#### *1.4.3.3.2. Ráðgeving beint áðrenn og aftaná, at barnið, ið verður ættleitt, kemur at búgva hjá ættleiðara – og onnur ráðgeving*

Mælt verður til, at ein áseting verður sett í ættleiðingarlógina, sí § 28, stk. 1 í lógaruppskotinum um, at ein ættleiðari verður kravdur, tá talan er um fremmanda ættleiðing, at taka ímóti ættleiðingarráðgeving beint innan og aftaná, at barnið, ið verður ættleitt, kemur heim at búgva hjá ættleiðarunum.

Mælt verður eisini til, at tað skal standa í lógini, at ein ættleiðingarfamilja, tá talan er um fremmandaættleiðing, kann biðja um at fáa meira ráðgeving og stuðul í samband við ættleiðingina, sí § 28, stk. 2 í lógaruppskotinum. Tað skal vera Heilsu- og innlendismálaráðið, ið skal tryggja at skipað verður fyri nøktandi ættleiðingarráðgeving.

Ráðgevingin kann verða givin, meðan barnið veksur til, tvs. til barnið fyllir 18 ár. Sum barnið eldist verður viðkomandi at taka atlit til, at ráðgevingin kanska í størri mun verður stílað móti barninum/unglinginum heldur enn foreldrunum. Foreldrini skulu tó biðja um og samtykkja, at teirra barn fær ráðgeving/stuðul.

Aftrat møguleikanum fyri sjálvbodnari ráðgeving vil Heilsu- og innlendismálaráðið seta í verk tilboð um temakvøld, har ættleiðarar og komandi ættleiðarar fáa høvi at hittast og tosa saman. Eisini verður sett í verk undirvísingartilboð til stovnar v.m. Tilboð um barnabólkar fyri ættleidd børn, har ættleidd børn fáa høvi at hittast og tosa saman, er eisini ætlan um at skipa.

Meira ítøkiliga arbeiðið at skipa ættleiðingarráðgeving verður framt í umsitingini – tískil verður mælt til, at tað verður ásett í ættleiðingarlógini, at landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um, hvussu ættleiðingarráðgevingin skal skipast. Eisini verður mælt til, at landsstýrismaðurin skal áseta nærri reglur um, í hvørjum førum ættleiðarar ikki skulu fáa ráðgeving, sí uppskot til nýggja áseting í § 28, stk 3.

### *1.4.4. Samlivandi fáa høvi at ættleiða*

#### *1.4.4.1. Galdandi lóggáva*

Sambært galdandi ásetingum í ættleiðingarlóggávuni er ættleiðing bert ætlað teimum, ið eru hjún, tvs. at bert persónar, ið eru giftir kunnu, ættleiða saman og eisini skulu ættleiða saman, sbr. § 5 í galdandi ættleiðingarlóg.

Samlivandi par, ið ikki eru gift, kunnu sostatt ikki ættleiða saman. Hetta ger seg galdandi í mun til øll tey ymisku sløgini av ættleiðing, t.e. stjúkbarna-, familju- og fremmandaættleiðing.

Í mun til stjúkbarnaættleiðing er tó møguligt at ættleiða barnið hjá sínum fyrrverandi hjúnafelaga, um hjúnabandið er endað orsakað av deyða. Viðmerkjast skal eisini, at hjúnafelagar, ið eru sundurlisnir (separeraðir), verða at meta sum gift.

*Stjúkbarnaættleiðing* er ættleiðing, har umsøkjarin ættleiðir barnið hjá sínum hjúnafelaga. Sereyðkennið við eini stjúkbarnaættleiðing er, at barnið, eftir at tað er ættleitt, verður mett sum verandi felags barn hjá ættleiðara og hinum foreldrinum í hjúnabandinum, smb. § 16, stk. 2 í galdandi ættleiðingarlóg. Í mun til aðra ættleiðing, har tað rættarliga sambandið til uppruna ættina fellur heilt burtur, varðveitir barnið við einari stjúkbarnaættleiðing tað rættarliga sambandið við tað eina foreldrið og ættina hjá hesum.

Eitt barn, ið er uppvaksið hjá einum stjúkforeldri og einum upprunaforeldri, kann sambært galdandi lóggávu ikki stjúkbarnaættleiðast av viðkomandi stjúkforeldri, sum barnið er voksið upp hjá, um upprunaforeldrið og stjúkforeldrið eru vorðin skild.

Viðmerkjast skal, at útyvir krav um galdandi hjúnaband, er tað umframt sum útgangsstøði ein fortreyt fyri stjúkbarnaættleiðing, at ættleiðari hevur búð saman við barninum og foreldrinum hjá barninum í minsta lagi 2 ½ ár. Orsøkin til hetta krav er – eins og við familjuættleiðingum og fremmandaættleiðingum (sí niðanfyri) – at tryggja, at familjan hevur neyðuga støðufestið, og at ynskið um ættleiðing er væl umhugsað og úrslit av fleiri ára familjusamlívi. Um serligar umstøður gera seg galdandi, kann samlívskravið frávíkjast.

Samlívskravið skal tryggja, at umsøkjararnir liva í einum støðugum parlagi, ið verður mett sum ein fortreyt fyri einari góðari ættleiðingargongd. Vanliga krevst, at umsøkjararnir hava havt felags bústað sambært landsfólkayvirlitinum í minsta lagi 2 ½ ár. Eftir umstøðunum kann dentur leggjast á upplýsingar av øðrum slag. Upplýsingar frá umsøkjarunum sjálvum um longdina av samlívinum kann ikki standa einsamalt, um samlívskravið skal metast at vera lokið. Kravið um samlív í 2 ½ ár fylgir av siðvenju á økinum og hevur heimild í § 2 í ættleiðingarlógini, har tað framgongur, at ættleiðing bert kann loyvast, um mett verður grundað á greining av málinum, at ættleiðingin er tað besta fyri barnið.

Aftrat samlívskravinum er tað eisini eitt krav í mun til ættleiðing, at barnið antin er voksið upp ella skal hava høvi at veksa upp hjá ættleiðara. Henda treyt undirstrikar, at endamálið við ættleiðing er at grundleggja eitt foreldur/barn samband ella at staðfesta eitt longu verandi foreldur/barn samband. Uppaling kann sambært vanligari fatan av hugtakinum bert vera, inntil barnið fyllir 18 ár.

Lóggávan ásetir ikki nærri reglar um longdina av uppalingartíðarskeiðnum, men tað má vera eitt krav, at uppalingin ber brá av at vera grundað á eitt støðufast og trygt foreldur/barn samband ella møguleika fyri einum støðuføstum og tryggum foreldur/barn sambandi.

Við hesum í huga verður sambært galdandi siðvenju í mun til umsókn um ættleiðing av børnum undir 18 ár kravt, at barnið skal hava høvi at búgva saman við umsøkjara í minsta lagi 3 ár innan barnið fyllir 18 ár. Tíðin, ið barnið hevur búð saman við umsøkjara innan umsókn um ættleiðing, kann verða íroknað kravið um 3 ár. Er barnið vorðið 18 ár, tá søkt verður um ættleiðing, verður tað sambært siðvenju sett krav um, at barnið hevur búð saman við umsøkjara í umleið 3 ár, innan barnið fylti 18 ár.

Uppalingarkravið framgongur av § 2 í ættleiðingarlógini, har tað stendur, at ættleiðing bert kann loyvast, um mett verður grundað á greining av málinum, at ættleiðingin er tað besta fyri barnið, og at ynski er um at barnið verður uppalt hjá ættleiðara, er vorðið uppalt hjá ættleiðara, ella um onnur serlig orsøk er til ættleiðingina.

Kravið um hjúnarband skal vera lokið, tá góðkenning at ættleiða verður latin.

*Familjuættleiðing* er vanliga eyðkend við, at talan er um eitt serstakt familjutilknýti millum umsøkjara og barnið, ið ynskist ættleitt. Tað framgondur av ættleiðingarkunngerðini § 2, stk. 1, nr. 2, litra a, at barnið antin skal vera barnabarn hjá umsøkjara ella bróður- ella systirsonur ella bróður- ella systirdóttur.

Umframt hetta er talan um familjuættleiðing, um talan er um eitt barn hjá foreldrum, sum umsøkjarin gjøgnum tættan og longrivarandi kunnleika er serliga knýttur at, og barnið er undir 18 ár, smb. § 2, stk. 1, nr. 2, litra b í ættleiðingarkunngerðini. Ella um talan er um ættleiðing av einum barni, sum umsøkjari hevur eitt serligt tilknýti til smb. § 2, stk. 1, nr. 2, litra c í ættleiðingarkunngerðini. Henda áseting kann fevna um eitt nú fosturbarn.

Eitt barn, ið eitt nú er uppvaksið hjá einum samlivandi pari, kann sambært galdandi lóggávu ikki familjuættleiðast av hesum.

Somu krøv til samlív og uppaling verða sett í samband við familjuættleiðing, sum í samband við stjúkbarnaættleiðing. Sí omanfyri.

Júst sum við stjúkbarnaættleiðing skal kravið um hjúnaband vera lokið, tá góðkenning at ættleiða verður latin.

*Fremmandaættleiðing* er ættleiðing, har umsøkjari ættleiðir eitt barn undir 18 ár, og har tað er ein treyt fyri ættleiðingina, at umsøkjari verður góðkendur sum ættleiðari smb. § 4 a, stk. 1 í galdandi ættleiðingarlóg. Aloftast er tað talan um ættleiðing av einum barni, ið umsøkjarin ikki kennir frammanundan. Tað kann tó eisini vera talan um, at umsøkjari kennir barnið ella foreldrini hjá tí, men at tilknýtið ikki er av slíkum slag, at tað lýkir treytirnar fyri at familjuættleiðing kann fremjast.

Ógift samlivandi kunnu sum sagt ikki ættleiða saman smb. § 5, stk. 2 e.c. í galdandi ættleiðingarlóg. Í ættleiðingarhøpi verður ein ógiftur samlivari mettur sum ein einligur umsøkjari. Ein samlivari kann bert ættleiða sum einaættleiðari, og skal í útgangsstøðinum lúka somu treytir sum ein einligur umsøkjari smb. § 6, stk. 1 í galdandi góðkenningarkunngerð.

Hjá einligum umsøkjara uttan samlivara skal í hvørjum einstøkum føri metast, um viðkomandi er egnaður at uppala eitt ættleitt barn einsamallur smb. § 6, stk. 1 í góðkenningarkunngerðini. Tað framgongur av siðvenju á økinum, at í samband við hesa meting verður dentur lagdur á, um umsøkjari hevur serligar førleikar, ið gera, at umsøkjari er vælegnaður at uppala eitt ættleitt barn einsamallur.

Hjá einligum umsøkjara í parlagi við samlivara verður, sambært siðvenju á økinum mett, um einligi umsøkjarin lýkir tey yvirskipaðu góðkenningarkrøvini, eins og dentur verður lagdur á, um umsøkjarin livir í einum hjúnabandslíknandi parlagi við einum persóni, ið í roynd og veru vil kunna fáa ein foreldraleiklut í mun til barnið.

Sambært siðvenju á økinum kann fasta parlagið og samlívið hava tílíkan dám, at eisini samlivarin, tvs. tann, sum ikki søkir, skal lúka tey yvirskipaðu og objektivu góðkenningarkrøvini. Tann sannroyndin, at umsøkjari livir í einum hjúnabandslíknandi parlagi, verður tískil ein týðandi táttur í samlaðu metingini av, hvørt umsøkjari verður mettur at vera egnaður at uppala eitt ættleitt barn. Viðkomandi fyri samlaðu metingina er eisini, um samlivarin verður mettur at vera egnaður at ættleiða – og um ein møgulig ættleiðing er best fyri barnið.

Tá søkt verður um góðkenning til fremmandaættleiðing, skal greiða fáast á hjúnarbandsstøðuni hjá umsøkjarum við fyrstu samrøðu í samband við forkanningina.

Um umsøkjarar ikki eru ávegis at verða gift stutt eftir heimavitjan í samband við forkanningina, so hevur Ríkisumboðsmaðurin skyldu til at kunna um, at ein møgulig góðkenning sum ættleiðari er treytað av, at umsøkjararnir eru hjún.

Kravið um, at umsøkjararnir eru giftir, skal sostatt seinast vera lokið, tá ið Ríkisumboðmaðurin tekur avgerð um, um umsøkjararnir kunnu góðkennast at ættleiða. Eitt par, ið ikki eru gift, vil tískil kunna lata inn umsókn um góðkenning at ættleiða, og kunnu – um hinar treytirnar annars eru loknar - verða góðkend at ættleiða, um tey eru vorðin hjún, tá Ríkisumboðsmaðurin tekur endaliga avgerð um góðkenning.

Tað framgongur av § 7 í góðkenningarkunngerðini, at tað fyri eini hjún er ein fyritreyt fyri at kunna verða góðkend at ættleiða, at tey hava búð saman í minsta lagi 2 ½ ár, tá umsóknin verður latin inn. Samlívskravið er sostatt í mun til fremmandaættleiðing ein av teimum yvirskipaðu og objektivu treytunum, ið skulu vera loknar.

Kravið skal tryggja, at umsøkjarar liva í einum støðugum parlagi, ið verður mett sum ein fyritreyt fyri einari góðari ættleiðingargongd. Vanliga krevst, at umsøkjararnir hava havt felags bústað sambært landsfólkayvirlitinum í minsta lagi 2 ½ ár. Eftir umstøðunum kann dentur leggjast á upplýsingar av øðrum slag. Upplýsingar frá umsøkjarunum sjálvum um longdina av samlívinum kann ikki einsamalt liggja til grund fyri, at samlívskravið skal metast vera lokið.

Í mun til góðkenning sum ættleiðari kann verða sæð burtur frá ikki loknum samlívskravi, um umsøkjararnir hava funnið saman í einum lutfalsliga seinum aldri og síðani hava eftir stuttari tíð staðfest, at tey ikki eru før fyri at fáa egin børn saman. Í hesum førum kann samlívskravið koma í andsøgn við aldurskrøvini í § 8 í góðkenningarkunngerðini, sambært hvørjum umsøkjari ikki má vera meira enn 42 ár eldri enn barnið.

### *1.4.4.2. Hugsanin hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum*

Kravið um hjúnarband sum fortreyt fyri at ættleiða tykist at endurspegla eina familjufatan, ið ikki samsvarar við nútíðar familjumynstrið. Tað er sostatt í dag heilt vanligt at vera ógift samlivandi foreldur. Sum dømi kann vísast til Heilsulýsingina hjá Landslæknanum frá 2016, ið millum annað vísir, at í 2013 vóru næstan 60% av teimum nýføddu í Føroyum fødd uttanfyri hjúnaband og í 2016 53,7%. Men samstundis búðu 92,6% av foreldrunum í 2016 saman, tá barnið varð borið í heim.

Støður kunnu íkoma, har tað hóast eitt støðufest samlív ikki er møguligt hjá samlivandi sambært galdandi ættleiðingarlóggávu at verða góðkend til fremmandaættleiðing. Eisini kunnu íkoma støður, har ein stjúkbarnaættleiðing ella ein familjuættleiðing orsakað av kravinum um hjúnaband ikki er møgulig hóast eitt langt samlív – eisini íroknað saman við barninum.

Møguleikarnir fyri at ættleiða – t.e. við fremmandaættleiðing, familjuættleiðing ella stjúkbarnaættleiðing – eiga at vera í tráð við vanligu familjumynstrini í dagsins Føroyum, soleiðis at samlivandi pør hava sama møguleika at ættleiða sum hjún.

Ættleiðingarlóggávan verður harvið meira tíðarhóskandi, og lóggávan verður í samsvar við aðrar partar av familjurættarligu lóggávuni, har tað er uttan týdning, um foreldrini eru gift ella samlivandi. Tað er til dømis galdandi í mun til ásetingarnar um samveru í lóg um foreldramyndugleika og samveru, og í mun til ásetingarnar um barnagjald í lóg um rættarstøðu hjá børnum.

Samstundis við, at tað verður møguligt hjá samlivandi at ættleiða saman, eigur tað eisini, fyri at tryggja barninum eitt trygt familjulív við tveimum foreldrum, at verða kravt, at samlivandi pør, ið liva í einum hjúnabandslíknandi parlagi, skulu ættleiða saman. Hetta svarar til tað, sum í dag er galdandi fyri hjún.

Børn, ið veksa upp í familjum, har foreldrini ikki eru gift, eiga ikki at verða viðgjørd øðrvísi enn børn, ið veksa upp í familjum, har foreldrini eru gift.

Mett verður, at tað er óskynsamt, at eitt barn ikki kann verða ættleitt av einum stjúkforeldri, ið barnið er voksið upp hjá – t.d. um upprunaforeldrið doyr - orsakað av, at uppruna- og stjúkforeldrið ikki vóru gift.

Mett verður eisini, at tað er óskynsamt, at hóast eitt barn er myndugt og er uppvoksið hjá einum stjúkforeldri ikki kann ættleiðast av hesum, um uppruna- og stjúkforeldrið eru vorðin skild ella hava endað samlívið – hetta hóast stjúkforeldrið og tað mynduga barnið ynskja ættleiðing.

### *1.4.4.3. Tilmælda skipanin*

Skotið verður upp, at tað ikki longur skal vera ein fortreyt fyri at ættleiða saman, at umsøkjararnir eru hjún. Tað avgerandi í mun til barnið má vera, at talan er um eitt støðugt parlag. Hetta støðufestið verður í fyrstu atløgu tryggjað við kravinum um, at samlivandi í minsta hava livað saman í 2 ½ ár fyri at verða góðkend at ættleiða – burtursæð frá serligum umstøðum.

Skotið verður eisini upp, at samstundis við at samlivandi fáa høvi at ættleiða saman, verður sett krav um, at samlivandi, ið liva saman í einum støðugum hjúnabandslíknandi parlagi, skulu ættleiða saman. Kravið er grundað á atlitið til barnið at tryggja eitt støðugt familjulív við tveimum foreldrum. Valið at ættleiða eigur at vera ein vælumhugsað avgerð tikin í felag av tí samlivandi parinum. Kravið, at samlivandi ættleiða saman, inniber, at barnið verður tryggjað somu rættarstøðu mótvegis ættleiðarunum, sum vóru ættleiðararnir hjún.

At samlivandi skulu kunna ættleiða saman á jøvnum føti við hjún, tá ið ávísar treytir eru loknar, eru eisini ein natúrlig leingjan av galdandi siðvenju, har tað í samband við metingina av, um ein umsøkjari er egnaður, verður lagdur dentur á, at umsøkjarin livir í einum parlagi, ið hevur eitt hjúnabandslíknandi eyðkenni, við tí virknaði, at eisini samlivarin skal uppfylla tey yvirskipaðu og objektivu góðkenningarkrøvini.

Samlivandi er sambært lógini eitt par uttan mun til kyn, ið livir í einum støðugum parlagi, ið hevur dám av hjúnarbandi. Fyri at parlagið skal metast at vera líkt hjúnarbandi er avgerandi, at tey samlivandi hava livað saman í minsta lagi 2 ½ ár tá nøktandi umsókn um góðkenning at ættleiða verður latin inn – vanliga á sama skrásetta bústaði í nevnda tíðarskeiði. Onnur viðurskifti, ið vátta ella avsanna, at parlagið er líkt hjúnarbandi, kunnu eftir umstøðunum eisini

vera viðkomandi. At samlivandi kunnu ættleiða saman er treytað av samlívi í minsta lagi 2 ½ ár. Sama tíðaráseting er galdandi í mun til, at myndugleikarnir kunnu krevja, at samlivandi ættleiða saman.

Umsøkjarar, ið ikki hava livað saman í minsta lagi 2 ½ ár, verða ikki mettir at vera samlivandi sambært lógini. Fyri samlivandi, ið ikki hava havt eitt samlív á í minsta lagi 2 ½ ár, er tó framhaldandi møguligt at søkja um góðkenning at ættleiða einsamallur. Í tílíkum førum er galdandi siðvenja sum higartil, at samlivarin skal í útgangsstøðinum lúka tey yviskipaðu og objektivu krøvini í mun til góðkenning sbr. góðkenningarkunngerðini §§ 7-9.

Samlivandi, ið verða góðkend til ættleiðing av føroysku myndugleikunum, skulu eisini lúka krøvini frá landinum, ið tey ynskja at ættleiða eitt barn frá. Um gevaralandið setur krav um hjúnarband, so mugu tey góðkendu samlivandi umsøkjararnir velja eitt annað land at ættleiða frá.

Mælt verður til, at tað verður møguligt at fremja eina stjúkbarnaættleiðing av barni hjá samlivara – eins og tað verður møguligt at stjúkbarnaættleiða barnið hjá fyrrverandi hjúnafelaga ella samlivara. Harvið ber til at sleppa undan óhepnu støðuni hjá barni, at ein stjúkbarnaættleiðing, orsakað av kravinum um hjúnarband, ikki er møgulig, hóast talan hevur verið um samlív í mong ár – eisini saman við barninum.

Harumframt verður veittur møguleiki fyri stjúkbarnaættleiðing av barni hjá fyrrverandi samlivara, ið er deyður. Eisini verður veittur møguleiki fyri stjúkbarnaættleiðing, hóast hjúnaskilnað ella endað samlív millum upprunaforeldrið og stjúkforeldrið, men treytað av, at tann, ið ynskist ættleiddur, er myndigur.

Mælt verður eisini til, at samlivandi verða javnstillaði við hjún, soleiðis at undantakið í mun til kravið til góðkenning at ættleiða eisini verður galdandi í mun til stjúkbarnaættleiðing hjá samlivandi.

### *1.4.5. Nútímansgerð av frøðimáli (terminologi)*

#### *1.4.5.1. Galdandi lóggáva*

Í § 2, stk. 1 og § 9, stk. 1 og 2 í ættleiðingarlógini kemur til sjóndar, at frøðiheitini ”til gavn for” og ”til barnets tarv” verða nýtt.

Sambært galdandi áseting í § 2 kann ættleiðing bert verða loyvd, um mett verður, at ættleiðingin gagnar viðkomandi, sum ynskist ættleiddur.

Sambært galdandi § 9, stk. 1 kann ættleiðing verða loyvd, sjálvt um viðkomandi persónar taka samtykki til ættleiðingina aftur – hetta um avgerðin hjá viðkomandi persónum ikki er rímilig í mun til at verja atlitið til barnið.

Harumframt er greitt í galdandi § 9, stk. 2, at ein ættleiðing kann verða framd uttan samtykki, um atlitið til tørvin hjá barninum krevur tað.

Galdandi ættleiðingarlóg ger mun á frøðiheitunum ”ættleitt barn” og ”barn”. Harumframt verður nýtt hugtakið ”lívfrøðilig foreldur” um upprunaligu, rættarligu foreldrini.

Ættleiðingarlógin er ikki støðug í mun til nýtsluna av hugtøkum. Í lógini verða hugtøkini ”til gavn for” og ”til barnets tarv” eins og ”upprunalig foreldur” og ”lívfrøðilig foreldur” nýtt.

### *1.4.5.2. Hugsanin hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum*

Nevndu ásetingar nýta tískil ymisk heiti fyri barnsins besta, sum í dag er hugtakið, ið verður nýtt, tá atlitið til barnið verður lýst í familjurættarligu lóggávuni. Bæði innanlanda og altjóða verður ”barnins besta” nýtt – m.a. í Haager sáttmálanum um altjóða ættleiðing og í lógini um foreldramyndugleika og samver. ”Tarv” og ”gavn” eru frøðiheiti, ið ikki verða brúkt longur, hóast tey vórðu nýtt fyrr í t.d. ”myndighedsloven”, ið varð avtikin, tá lógin um foreldramyndugleika og samver varð sett í gildi.

Nýtslan av hugtakinum ”lívfrøðilig foreldur” um upprunaligu, rættarligu foreldrini hjá barninum kan tykjast ótíðarhóskandi og óheppin í ávísum høpi. Hetta skyldast, at lívfrøðiligur skyldskapur ikki neyðturviliga merkir, at tað er rættarligur skyldskapur. Eisini kann tað vera óheppið, at munur verður gjørdur á ”ættleitt barn” og ”barn” í summum førum, tí eitt ættleitt barn og egið barn hava somu rættarstøðu.

Óstøðug nýtsla av frøðimáli í lóggávu eigur ikki at koma fyri.

### *1.4.5.3. Tilmælda skipanin*

Við broyttu orðingini í § 2 í ættleiðingarlógini verður galdandi, at loyvi til ættleiðing kann bert verða givið, um mett verður, at tað tænir barnsins besta. Broytta orðingin í galdandi § 9, stk. 1, ið við lógaruppskotinum verður til § 10, stk. 1, viðførir, at ættleiðing kann verða loyvd, hóast samtykki, ið er givið sambært galdandi § 8, ið við lógaruppskotinum verður til § 9, verður afturtikið, um afturtøkan ikki er rímiliga grundað við atliti til barnsins besta. Broytta orðingin í galdandi § 9, stk. 2, ið við lógaruppskotinum verður til § 10, stk. 2, viðførir, at ættleiðing uttan samtykki kann verða loyvd, um atlitið til barnsins besta avgerandi talar fyri hesum.

Viðmældu broytingar eru ein málslig nútímansgerð av báðum ásetingum og fremur nýtslu av støðugum frøðimáli.

Barn, ið er vorðið ættleitt, hevur rættarstøðu sum egið barn. Eisini er vanliga fatanin av ættleiðing, at munur ikki verður gjørdur á, um talan er um egið barn ella ættleitt barn.

Mælt verður til, at ásetingarnar í ættleiðingarlógini verða nútímansgjørdar – tískil verður bert talan um barn hjá hjúnafelaga ella samlivara. Hetta merkir, at ættleidd børn og egin børn verða javnsett á frøðimáli.

Mælt verður eisini til, at frøðimálið í ættleiðingarlógini verður broytt, soleiðis at hugtøkini ”upprunaligu foreldur” og ”upprunalig ætt” verða nýtt um upprunaligu rættarligu foreldur og ætt. Samuntikið verður mælt til støðuga nýtlu av hugtøkum.

### *1.4.6. Eftirlitið við ættleiðingarmiðlandi felagsskapum*

### *1.4.6.1. Galdandi lóggáva*

Familieretsafdeling í Ankestyrelsen er sentralmyndugleiki fyri Føroyar og Danmark sambært Haagersáttmálanum. Sum sentralmyndugleiki skal Familieretsafdelingen í Ankestyrelsen fremja tær uppgávur, ið Haagersáttmálin sigur, at sentralmyndugleikin hevur skyldu til –

íroknað at tryggja, at ættleiðing ikki verður framd fyri fíggjarligan vinning, ella at tiltøk verða framd, ið eru í andsøgn við sáttmálan.

Sambært Haagersáttmálanum skulu ættleiðingarmiðlandi felagsskapir vera undir eftirliti frá viðkomandi almennum myndugleikum.

Yvirskipaða atlitið, ið almenna eftirlitið við ættleiðingarmiðlandi felagsskapum skal tryggja, er, at ættleiðingararbeiðið, ið miðlandi felagsskapirnir fremja, verður framt fyri at tryggja barnsins besta, verður framt á einum etiskum og fakligum nøktandi støði, uttan fíggjarligan vinning og í samsvari við altjóða sáttmálar, galdandi ættleiðingarlóggávu innan ríkið, loyvistreytirnar hjá felagsskapunum og ættleiðingarlóggávuna í teimum londum, ið børnini verða ættleidd frá.

Sambært § 27 d, stk. 2 í galdandi ættleiðingarlóggávu í Føroyum er tað børne- og socialministeren, ið hevur eftirlit við miðlandi felagsskapunum. Sambært § 27 d, stk. 3 kann børne- og socialministeren heimila Adoptionsnævnet til at hava eftirlit við miðlandi felagsskapum.

Sambært § 38, stk. 1 í góðkenningarkunngerðini hevur Familieretsafdelingen í Ankestyrelsen eftirlitið við miðlandi felagsskapum og viðger klagur tengdar at felagsskapunum. Sambært stk. 2 skal Ríkisumboðsmaðurin kunna Familieretsafdelingen í Ankestyrelsen, um Ríkisumboðsmaðurin verður varugur við viðurskifti, ið gera, at tiltøk mótvegis miðlandi felagsskapi kunnu verða umhugsaði.

Í galdandi donsku ættleiðingarlóg er eftirlitið við miðlandi felagsskapinum vorðið savnað hjá Ankestyrelsen, sbr. § 31 b, stk. 1, har tað kemur til sjóndar, at Ankestyrelsen hevur regluligt eftirlit við ættleiðingarmiðlandi felagsskapum. Eftirlitið umfatar fakligu førleikarnar, fíggjarligu og bygnarligu viðurskiftini, eins og hvussu gjøld verða ásett og uppkravd, og hvussu viðgerðin av ítøkiligum ættleiðingarmálum verður framd. Sí eisini nr. 1.4.2.1.2 og 1.4.2.3.

Ásetingarnar um eftirlitið hjá Ankestyrelsen við ættleiðingarmiðlandi felagsskapum varð sett inn í galdandi donsku ættleiðingarlóg við lóg nr. 1740 frá 22. desember 2015 um eina nýggja ættleiðingarskipan v.m. Viðkomandi lóg er ikki sett í gildi í Føroyum.

Eftirlitið við virkseminum hjá DIA í Danmark umfatar í veruleikanum eisini eftirlit av, hvussu DIA viðger ættleiðingarmál tengd at Føroyum, tí viðgerðin av hesum málum í roynd og veru verður framd í Danmark. Tískil er veruleikin í dag, at Ankestyrelsen hevur eftirlit við virkseminum hjá ættleiðingarmiðlandi felagsskapum (DIA) í Føroyum – og sostatt ikki børne- og socialministeren ella Adoptionsnævnet.

Í galdandi donsku ættleiðingarlóg vóru í samband við lóg nr. 1740 frá 22. desember 2015 um eina nýggja ættleiðingarskipan v.m. settar inn fleiri nýggjar ásetingar uppí, sum viðførdu eitt hert eftirlit við miðlandi felagsskapum. M.a. varð ein áseting sett inn í 31 g í galdandi donsku ættleiðingarlóg, ið ásetur, at Ankestyrelsen skal savna upplýsingar um eina gjøgnumførda ættleiðing frá ættleiðarunum, tá ættleiðingarhjálpin er veitt av einum ættleiðingarmiðlandi felagsskapi. Somuleiðis varð við § 31 g, stk. 1 sett inn í, at Ankestyrelsen kann biðja Adoptionsnævnet um ummæli viðvíkjandi ítøkulig ella yvirskipaði viðurskifti, ið hava týdning fyri eftirlitinum við einum miðlandi felagsskapi. Sambært stk. 2 skal Adoptionsnævnet kunna Ankestyrelsen um øll viðurskifti, ið kunnu hava týdning fyri eftirlitinum við einum ættleiðingarmiðlandi felagsskapi.

Sambært galdandi rætti í Føroyum, kann Ankestyrelsen sambært § 25 í kunngerðini um fundarskipanina hjá Adoptionsnævnet (Adoptionsnævnets forretningsorden) biðja Adoptionsnævnet um ummæli um ítøkilig ella yvirskipaði viðurskifti av týdningi fyri eftirlitsuppgávuna av miðlandi felagsskapum. Ankestyrelsen kann sostatt eisini gagnnýta læknafakligu førleikarnar í Adoptionsnævnet, t.d. við at biðja Adoptionsnævnet um at gjøgnumganga ættleiðingarmál við atliti til at lýsa trupulleikar og tema, ið eru viðkomandi fyri eftirlitið.

Adoptionsnævnet hevur sambært §§ 22-23 í fundarskipanini hjá Adoptionsnævnet eisini yvirskipað eftirlit við ættleiðingarsamráðnum í Føroyum og í Danmark. Hetta viðførir eftirlit við ættleiðingarsamráðnum og Ríkisumboðsmanninum í Føroyum.

### *1.4.6.2. Hugsanin hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum*

Heilsu- og innlendismálaráðið og Børne- og Socialministeriet eru samd um, at DIA skal eftir yvirtøkuna av ættleiðingarlóggávuni framhaldandi miðla útlendsk børn til ættleiðing í Føroyum. Sí eisini nr. 1.1 og 1.4.2.2. og 1.4.2.3.

Fyri at hetta skal verða gjørligt, er tørvur á at ein samstarvsavtala verður gjørd millum føroyskar og danskar myndugleikar, sí nr. 1.1 og 1.4.2.2. og 1.4.2.3. Samstarvsavtalan skal m.a. tryggja, at Ankestyrelsen sum sentralmyndugleiki í mun til Haagersáttmálan um ættleiðing skal hava eftirlit við ættleiðingarmiðlandi felagsskapum – íroknað virksemið hjá felagsskapunum í Føroyum.

Í galdandi føroysku ættleiðingarlóg er eingin heimild fyri, at Ankestyrelsen sum sentralmyndugleiki eftir yvirtøkuna av ættleiðingarlóggávuni kann savna upplýsingar um eina gjøgnumførda ættleiðing beinleiðis frá ættleiðarum, ið eru búsettir í Føroyum, og har ættleiðingarhjálpin er veitt av einum miðlandi felagsskapi.

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur ta fatan, at tað er ein týðningarmikil liður í eftirlitsarbeiðnum, at Ankestyrelsen fær høvi at gera eina skipaða innsavnan av upplýsingum frá ættleiðarum. Hetta fer at økja um kunnleikan um hvørjar tankar ættleiðararnir hava viðvíkjandi ættleiðingargongdini. Hendan vitanin vil saman við einari skipaðari innsavnan av vitan í sambandi við góðkenning av greipingaruppskotum geva eitt týdningarmikið vitanargrundarlag at fremja eitt munagott eftirlit á ættleiðingarøkinum.

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur ta fatan, at tað eisini er ein týdningarmikil liður í eftirlitsarbeiðnum hjá sentralmyndugleikanum, at sentralmyndugleikin eftir yvirtøkuna hevur greiða heimild at biðja viðkomandi føroyskar myndugleikar um ummæli um ítøkilig ella yvirskipaði viðurskifti av týdningi fyri eftirlitinum av einum ættleiðingarmiðlandi felagsskapi.

Harumframt er tað ein týðandi liður í einum munadyggum eftirliti hjá sentralmyndugleikanum, at viðkomandi føroyskir stovnar eftir yvirtøkuna hava skyldu til at kunna sentralmyndugleikan um øll viðurskifti, sum kunnu hava týdning í mun til eftirlitið við ættleiðingarmiðlandi felagsskapum.

### *1.4.6.3. Tilmælda skipanin*

Fyri at tryggja, at føroyskir myndugleikar og herbúgvandi ættleiðarar eftir yvirtøkuna skulu kunna viðvirka til eitt munagott eftirlit við miðlandi felagsskapum sambært

Haagersáttmálanum, verður skotið upp, at ein nýggj áseting í lógini verður sett inn við atliti til, at vitan kann innheintast frá ættleiðarunum um ættleiðingina, sí § 38 í lógaruppskotinum. Sentralmyndugleikin vil tá fáa høvi at savna upplýsingar um ættleiðingargongdina frá ættleiðarum búsitandi í Føroyum, tá ein altjóða ættleiðing er framd, og barnið er miðlað gjøgnum eina ættleiðingarmiðlandi felagsskap.

Sentralmyndugleikin kann tá fáa innlit í, hvussu ættleiðararnir hava upplivað øll viðurskiftini kring ættleiðingina – líkamikið um ættleiðararnir búgva í Føroyum ella Danmark.

Skotið verður eisini upp, at sentralmyndugleikin fær heimild at fáa til vega upplýsingar frá viðkomandi føroyskum myndugleikum fyri at styrkja eftirlitið. Ein áseting skal tískil setast inn í lógina um, at sentralmyndugleikin kann biðja Familjufyrisitina og Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum um ummæli um ítøkilig ella yvirskipaði viðurskifti, ið hava týdning fyri eftirlitinum við ættleiðingarmiðlandi felagsskapum, sí § 39, stk. 1 í lógaruppskotinum.

At enda verður eisini viðmælt, at ein áseting verður sett inn í ættleiðingarlógina, ið áleggur viðkomandi myndugleikum – serliga Familjufyrisitingini og Kærunevndini í almanna-, familju- og heilsumálum – eina skyldu at kunna sentralmyndugleikan um viðurskifti, sum viðkomandi myndugleikar meta kunnu hava týdning fyri eftirlitinum við ættleiðingarmiðlandi felagsskapum. Hesar broytingar síggjast í § 39, stk. 2 í lógaruppskotinum.

### *1.4.7. Loyvi til framhald av ættleiðingartilgongd – góðkenning av greipingaruppskoti*

#### *1.4.7.1. Galdandi lóggáva*

#### *1.4.7.1.1. Góðkenning av greipingaruppskoti*

Sambært grein 17 c í Haagersáttmálanum kann ein avgerð, um at lata umsøkjara eitt barn at varða av, bert verða tikin í upprunalandinum hjá barninum. Og bert um sentralmyndugleikarnir í báðum londum hava avgjørt, at ættleiðingartilgongdin kann halda fram. Um ættleiðingin ikki verður mett at vera til frama fyri barnið, kann ættleiðingartilgongdin verða steðgað. Uppgávan hjá sentralmyndugleikanum í mun til grein 17 c – góðkenning av greipingaruppskoti – er í dag heimilað Ríkisumboðsmanninum. Tó skal Ríkisumboðsmaðurin leggja upplýsingarnar um viðgerðina av ættleiðingarmálinum í upprunalandinum fyri Familieretsafdelingen í Ankestyrelsen (sentralmyndugleiki), tá støða skal takast til, um ættleiðingartilgongdin kann halda fram.

Greipingarmannagongdin er regulerað í umsitingarligum forskriftum í kap. 4 §§ 19-27 í góðkenningarkunngerðini. Vanliga greipingarmannagongdin hevur sum útgangsstøði, at eitt ítøkiligt barn kemur í uppskot frá útlendsku ættleiðingarmyndugleikunum ella miðlandi felagsskapunum til umsøkjara. Sambært § 19, stk. 1, 1. pkt. í góðkenningarkunngerðini metir miðlandi felagsskapurin, um barnið er innanfyri karmin, ið umsøkjararnir eru vorðnir góðkendir til. Sambært 2. pkt. sendir miðlandi felagsskapurin síðani beinanvegin greipingaruppskotið til Ríkisumboðsmannin, ið metir um ættleiðingargongdin kann halda fram í mun til grein 17 c í Haagersáttmálanum. Eisini stendur í stk. 2, 1. pkt., at felagsskapurin skal senda Ríkisumboðsmanninum upplýsingarnar um barnið, ið eru tøkir frá upprunalandinum – umframt barnalæknametingina, ið felagsskapurin hevur tryggjað sær. Sambært 2. pkt. skal felagsskapurin eisini senda Ríkisumboðsmanninum upplýsingarnar um umsøkjaran, ið barnið er greipað við. Sambært stk. 3 skal Ríkisumboðsmaðurin, í samband við støðutakanina um

ættleiðingartilgongdin kann halda fram, sí stk. 1, leggja upplýsingarnar um ættleiðingarmálið frá upprunalandinum fyri Familieretsafdelingen í Ankestyrelsen.

Sambært § 20, stk. 1 skal Ríkisumboðsmaðurin – um miðlandi felagsskapurin metir, at barnið í uppskoti er innanfyri góðkenningarkarmin hjá umsøkjara – leggja viðurskiftini kring barnið fyri limin í ættleiðingarsamráðnum, ið hevur læknafakliga bakgrund. Sambært stk. 2 skal Ríkisumboðsmaðurin kunna miðlandi felagsskapin, at ættleiðingin kann halda fram, um mett verður, at ættleiðingin er í tráð við ásetingarnar í § 19. Sambært § 20, stk. 4 skal Ríkisumboðsmaðurin í seinasta lagi innan eina viku, eftir at málið er móttikið, hava kunnað miðlandi felagsskapin - tó undantikið í serligum førum. Felagsskapurin biðir síðani umsøkjaran staðfesta, um viðkomandi er hugaður at ættleiða barnið í uppskoti, sí § 20, stk. 2, 2. pkt. Sambært stk. 3 kann umsøkjari seta seg í samband við barnalæknar, ið eru tilnevndir av Adoptionsnævnet, og sum kunnu vegleiða umsøkjara í samband við greipingaruppskotið. Sambært § 24, stk. 1 kann Ríkisumboðsmaðurin seta eina rímiliga tíðarfreist fyri endaligari støðutakan hjá umsøkjara, um viðkomandi ynskir at ættleiða ítøkiliga barnið ella ei.

Metingin av upplýsingunum frá upprunalandinum, og um barnið er innanfyri góðkenningarkarmin, skal helst gerast áðrenn, umsøkjari fær barnið í uppskot. Tað er í summum førum møguligt at gera hesa metingina áðrenn, umsøkjarin verður kunnaður um barnið. Í ávísum førum er tað tó neyðugt at kunna umsøkjara um barnið beinanvegin, tá eitt barn kemur í uppskot, orsakað av tíðarfreistum hjá upprunalandinum. Sambært § 22 kann umsøkjari kunnast áðrenn metingina grundað á serlig viðurskifti – t.d. orsakað av tíðarfreistum hjá upprunalandinum.

Sambært § 21, stk. 1 skal ættleiðingarsamráðið gera eitt tilmæli til Ríkisumboðsmannin, um miðlandi felagsskapurin metir, at barnið ikki eyðsýnt er innanfyri góðkenningarkarmin hjá umsøkjara. Ríkisumboðsmaðurin skal nýta tilmælið til sína meting av málinum sambært § 19.

Um Ríkisumboðsmaðurin metir við støði í tilmælinum frá ættleiðingarsamráðnum, at barnið er innanfyri góðkenningarkarmin, og ættleiðingin tískil kann halda fram, kunnar Ríkisumboðsmaðurin miðlandi felagsskapin. Síðani biður felagsskapurin umsøkjaran staðfesta, um viðkomandi vil ættleiða ítøkiliga barnið ella ei, sbr. § 21, stk. 2.

Metingin av upplýsingunum frá upprunalandinum, og um barnið er innanfyri góðkenningarkarmin, skal helst verða framd áðrenn, umsøkjari fær barnið í uppskot. Tó er í ávísum førum neyðugt at víkja frá hesari meginreglu, sbr. § 22.

Sambært § 21, stk 3, 1. pkt. kann Ríkisumboðsmaðurin mæla umsøkjara til at søkja um at fáa víðkaða góðkenning, um Ríkisumboðsmaðurin metir grundað á tilmæli frá ættleiðingarsamráðnum, at eitt ítøkiligt barn er uttanfyri núverandi góðkenningarkarmin hjá umsøkjara, men einki annað forðar fyri, at ættleiðingargongdin kann halda fram. Ríkisumboðsmaðurin kann við støði í § 24, stk. 1 áseta eina rímiliga tíðarfreist fyri, nær umsøkjari skal hava tikið støðu, um viðkomandi ynskir at søkja um víðkaða góðkenning ella ei. Um umsøkjari søkir um víðkaða góðkenning, skal Ríkisumboðsmaðurin við støði í § 21, stk. 3, 2. pkt. avgera, um umsóknin um víðkaða góðkenning til ítøkiliga barnið kann verða gingin á møti. Ættleiðingarsámráðið letur tilmæli til Ríkisumboðsmannin at nýta í tílíkum førum. Metingin av upplýsingunum frá upprunalandinum, og um barnið er innanfyri góðkenningarkarmin, skal helst verða framd, áðrenn umsøkjari fær barnið í boði. Í summum førum er møguligt at gera hesa meting, áðrenn umsøkjari verður kunnaður um barnið. Ofta er tó neyðugt við einari parallelari gongd, tí støða má eisini í hesum málum verða tikin til umsókn um víðkan av góðkenningarkarminum. § 22 loyvir, at vikið verður frá meginregluni, at

umsøkjari verður kunnaður um barnið, áðrenn metingin av málinum er framd – hetta orsakað av serligum viðurskiftum.

Tá meting verður framd av greipingaruppskotinum, verður serligur dentur lagdur á tøkar upplýsingar frá upprunalandinum og á ummæli frá barnalækna hjá miðlandi felagsskapinum, ið er grundað á tøku upplýsingarnar. Mongdin, dygdin og hvussu gamlir upplýsingarnir eru, hevur stóran týdning fyri læknafakligu metingina hjá samráðnum. Støðutakan til, um umsøkjari kann fáa víðkaða góðkenning til eitt ítøkiligt barn, verður framd við meting av førleikum og tilfeingi hjá umsøkjara í mun til tey serligu krøv, ið barnið hevur. Metingin verður m.a. grundað á enn eina samrøðu við umsøkjararnar um viðurskiftini, tá umsøkjararnir hava havt høvi at tosa við ein lækna um tøku upplýsingarnar um barnið.

Einstøk samstarvslond kunnu veita børn í uppskot, uttan at tað er tikin støða til, hvør skal fáa barnið í boði. Sambært § 23, stk. 1, 1. pkt. verður tað miðlandi felagsskapurin, ið tryggjar, at ein ítøkiligur umsøkjari fær barnið í boði. Síðani tekur Ríkisumboðsmaðurin grundað á tilmæli frá ættleiðingarsamráðnum støðu til, um barnið er innanfyri góðkenningarkarmin hjá umsøkjara, sí § 23, stk. 1, 2. pkt. Um miðlandi felagsskapurin hevur skotið barn upp fyri umsøkjara við aldursviðkomandi góðkenning, ið stendur ovast á bíðilistanum, viðger Ríkisumboðsmaðurin greipingaruppskotið uttan tilmæli frá ættleiðingarsamráðnum – hetta um barnið verður mett at verða innanfyri góðkenningarkarmin, sbr. § 23. stk. 2. Harafturat kunnu nýtast §§ 20, 21 og 22, sí § 23, stk. 3.

Sambært § 24, stk. 2, kann Ríkisumboðsmaðurin eftir tilmæli frá ættleiðingarsamráðnum velja at ógilda góðkenningina hjá umsøkjara sambært § 18, um umsøkjari noktar at ættleiða eitt barn, ið er innanfyri góðkenningarkarmin hjá umsøkjara. Sambært stk. 3 skal sýtan hjá umsøkjara at ættleiða eitt barn, ið er innanfyri góðkenningarkarmin, vera skrivliga grundgivin.

Í § 25 stendur, at um ein umsøkjari ynskir at ættleiða eitt útlendskt barn og ikki er tilmeldaður einum miðlandi felagsskapi, so skal greipingaruppskotið sendast til Ríkisumboðsmannin. Ættleiðingarsamráðið skal síðani gera tilmæli til Ríkisumboðsmannin, um barnið er innanfyri ella uttanfyri góðkenningarkarmin hjá umsøkjara. Ríkisumboðsmaðurin tekur síðani støðu í málinum. Ríkisumboðsmaðurin kunnar síðani umsøkjara um metingina og sendir samstundis upplýsingarnar um barnið til umsøkjara. Harafturat kunnu §§ 22-23 nýtast í hesum málum, sí § 24, 2. pkt.

Í ávísum førum vilja samstarvslond, ið vanliga sjálv velja barn til ítøkiligar umsøkjarar, biðja ein danskan miðlandi felagsskap um at kanna, um eitt barn, ið er trupult at fáa ættleitt, kann verða ættleitt av einum føroyskum ella donskum umsøkjara. Talan er tá serliga um eldri børn ella børn við serligum likamligum ella sinnisligum trupulleikum. Miðlandi felagsskapurin hevur vanliga ikki umsøkjarar á bíðilista, ið eru góðkend til tílík børn. Tískil søkir felagsskapurin eftir áhugaðum umsøkjarum umvegis tíðindaskriv ella heimasíðuna hjá felagsskapinum (”Børn søger forældre”). Tá ein umsøkjari búsitandi í Føroyum ger vart við seg í mun til eitt tílíkt ítøkiligt barn og ynskir at ættleiða barnið, so verða upplýsingarnir sendir til Ríkisumboðsmannin til góðkenningar. Ein umsøkjari til ættleiðing hevur rætt til at tosa við læknar, ið eru knýttir at miðlandi felagsskapinum, Adoptionsnævnet ella kommunulæknar í samband við støðutakan viðvíkjandi greipingaruppskoti.

Sambært grein 17 c í Haagersáttmálanum skulu bæði gevaralandið og móttøkulandið geva loyvi til, at ein ættleiðingargongd kann halda fram – og hava londini tískil eisini høvi til at steðga gongdini, um ættleiðingin ikki verður mett at gagna barninum.

Sambært galdandi rætti í Føroyum váttar Ríkisumboðsmaðurin í tráð við grein 17 c í Haagersáttmálanum fyri útlendska sentralmyndugleikanum, at ættleiðingartilgongdin kann halda fram, tá eitt barn kemur í uppskot til ættleiðing fevnt av Haagersáttmálanum, ið er innanfyri góðkenningarkarmin hjá umsøkjara, ið eisini ynskir at ættleiða barnið, sbr. § 26, stk. 1 í góðkenningarkunngerðini.

Í teimum førum, tá greipingaruppskotið skal leggjast fyri Ríkisumboðsmanninum, verður váttanin eftir grein 17 c eisini latin av Ríkisumboðsmanninum, sí § 19, stk. 1 í góðkenningarkunngerðini.

Møguleikin at steðga ættleiðingargongdini kann verða nýttur, um ein ættleiðing hevur týðandi løgfrøðiligar avbjóðingar, ella t.d. heilsustøðan hjá barninum ger, at mett verður ikki, at ættleiðingin er tað besta fyri barnið.

Í galdandi ættleiðingarlóg í Danmark varð tað í samband við lóg nr. 1740 frá 22. desember 2015 um eina nýggja ættleiðingarskipan sett inn í, at tá eitt barn er ávíst til ein góðkendan umsøkjara við atliti til ættleiðing, tekur Ankestyrelsen skjótast gjørligt støðu til, um ættleiðingargongdin kann halda fram sambært § 31 a, stk. 1. Eisini er tað Ankestyrelsen, ið letur grein 17 c váttanina í tílíkum støðum, sí § 54 stk. 1 í galdandi ættleiðingarkunngerð í Danmark.

Sambært § 31 a, stk. 2 ger ættleiðingarsamráðið eina meting eftir stk. 1, um barnið í uppskoti ikki er innanfyri góðkenningina hjá umsøkjarunum, ella ivi er um hetta. Tað er ættleiðingarsamráðið, ið ger váttanina, um greipingaruppskotið skal leggjast fyri ættleiðingarsamráðnum, sí § 54 stk. 2 í galdandi ættleiðingarkunngerð í Danmark.

Sambært galdandi ættleiðingarkunngerð í Danmark, so skal ættleiðingarsamráðið leggja málið fyri Ankestyrelsen, um upplýsingarnir um málið frá upprunalandinum hjá barninum eru atvold til ivamál, sbr. § 48, stk. 6.

### *1.4.7.1.2. Góðkenningarkarmurin*

Góðkenning at ættleiða verður vanliga latin sum ein óítøkilig góðkenning til eitt barn, ið ikki er kent frammanundan. Søkt kann tó verða um góðkenning til eitt ítøkiligt barn, ið umsøkjarin kennir frammanundan, sbr. § 2 í góðkenningarkunngerðini. Góðkenningarkarmurin lýsir aldur og heilsustøðuna hjá barninum, og verður skilt ímillum einari almennari góðkenning og einari víðkaðari góðkenning.

Ein almenn góðkenning er góðkenning at ættleiða eitt barn í aldrinum 0-36 mánaðir uttan týðandi kendar likamligar ella sálarligar heilsutrupulleikar. Ein almenn góðkenning viðførir, at ein umsøkjari skal góðtaka at ættleiða eitt barn í aldrinum 0-36 mánaðir – tað er ikki møguligt at lata eina góðkenning, har aldurskarmurin er smalri. Á sama hátt kann ein almenn góðkenning ikki verða avmarkað til eitt ávíst kyn, ávísan uppruna ella líknandi. Hetta er orsakað av, at komandi ættleiðarar mugu væntast at vera rúmlig í mun til komandi barnið uttan serstøk serynski.

Ein víðkað góðkenning umfatar børn, ið eru eldri enn 36 mánaðir, systkin ella eitt barn, ið orsakað av kendum likamligum ella sálarligum heilsuviðurskiftum má metast at hava ein størri tørv enn vanligt.

Avgerðin, um ein umsøkjari skal fáa eina almenna ella víðkaða góðkenning, er tengd at umsóknini hjá umsøkjaranum og metingini hjá Ríkisumboðsmanninum og

ættleiðingarsamráðnum av tilfeinginum hjá umsøkjarunum. Í tí sambandi vil aldurin hjá umsøkjarunum eisini ávirka, hvønn aldurskarm umsøkjarin kann verða góðkendur til.

### *1.4.7.2. Hugsanin hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum*

#### *1.4.7.2.1. Góðkenning av greipingaruppskoti*

Sambært áseting í Haagersáttmálanum grein 17 c so skulu bæði gevaraland og móttøkuland geva loyvi til, at ein ættleiðing kann halda fram – og hava londini tískil eisini møguleika at steðga eini ættleiðing, ið ikki verður mett at gagna barninum. Hendan ásetingin í Haagersáttmálanum er ein av mest týðandi trygdarfyriskipanum í sáttmálanum at tryggja, at ein ættleiðing, ið hevur týðandi løgfrøðisligar avbjóðingar ella ikki verður mett at vera best fyri barnið, kann verða steðgað.

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur umhugsað, hvussu hendan uppgávan kann verða løgd til rættis, eftir at ættleiðingarlóggávan verður yvirtikin – hetta sæð í ljósinum av, at ein samstarvsavtala skal verða gjørd millum føroyskar og danskar myndugleikar um fremmandaættleiðing eftir yvirtøkuna, soleiðis at DIA kann halda fram at miðla útlendsk børn til ættleiðing í Føroyum.

Sambært § 31 a, stk. 1 í galdandi ættleiðingarlóg í Danmark er tað Ankestyrelsen, ið skjótast gjørligt tekur støðu til, um ein ættleiðing kann halda fram, tá eitt barn verður boðið til ein góðkendan umsøkjara við atliti til ættleiðing. Sambært stk. 2 verður metingin, um ávísta barnið ikki er umfatað av góðkenningini hjá umsøkjarunum, ella ivi er um hetta, gjørd sambært stk. 1 av ættleiðingarsamráðnum.

Sambært galdandi rætti í Føroyum er tað sambært §§ 19-21 í góðkenningarkunngerðini Ríkisumboðsmaðurin, ið ger metingina í báðum førum – tó soleiðis, at Ríkisumboðsmaðurin í mun til metingina av, hvørt ættleinginargongdin kann halda áfram, leggur upplýsingarnar um viðgerðina av málinum í upprunalandinum fyri Familieretsafdelingen í Ankestyrelsen. Tað er altíð Ríkisumboðsmaðurin, ið letur eina grein 17 c váttan, um at ein ættleiðing kann halda fram.

Sambært galdandi rætti í Danmark er tað Ankestyrelsen, sum letur eina grein 17 c váttan, um at ein ættleiðing kann halda fram, um barnið er innanfyri kenningarkarmin hjá umsøkjaranum. Um greipingin skal leggjast fyri ættleiðingarsamráðið, er tað ættleiðingarsamráðið, ið skal gera váttina – tó skal ættleiðingarsamráðið leggja málið fyri Ankestyrelsen, um tøku upplýsingarnir um málsviðgerðina í upprunalandinum geva uppruna til ivamál.

Viðgerðin av greipingini í ættleiðingargongdini skal rúma bæði eina meting av heilsustøðuni hjá barninum og eftirlit av skjalpróvnum fyri, at barnið verður leysgivið til altjóða ættleiðing. Tískil eru tað nøkur grundleggjandi krøv til upplýsingarnar frá upprunalandinum hjá barninum, ið skulu vera uppfylt, áðrenn ættleiðingarmyndugleikarnir kunnu vátta, at ættleiðingin kann halda fram. Um upplýsingarnir ikki eru nøktandi, ivasamir ella ikki tøkir, skal orsøkin til hesa støðu kannast.

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur ta fatan, at føroysku og donsku ættleiðingarreglarnar skulu samsvara í mun til greipingartilgongdina í samband við altjóða fremmandaættleiðing – hetta fyri at atlit verður tikið til, at føroyskir og danskir myndugleikar skulu gera eina samstarvsavtalu viðvíkjandi fremmandaættleiðing, og við atliti til at Ankestyrelsen skal halda fram við at vera sentralmyndugleiki hjá Føroyum eftir yvirtøkuna. Harafturat er tað fatanin hjá

Heilsu- og innlendismálaráðnum, at føroyska ættleiðingarskipanin skal hava í minsta lagi somu rættartrygd sum tann danska, við atliti til, at børn, ið eru vorðin leysgivin til altjóða ættleiðing, eru vorðin lógliga leysgivin, og fyri at tryggja, at tað slepts undan óneyðuga drúgvum málsviðgerðum.

Harumframt ynskir Heilsu- og innlendismálaráðið at gera sítt íkast til, at sentralmyndugleikin kann fremja eitt so munadygt eftirlit sum gjørligt.

í mun til óneyðugar málsgongdir er í mun til galdandi rætt eitt eyka málslið í samband við greipingartilgongdina í Føroyum, tí øll greipingarmál skulu bæði viðgerast av Ríkisumboðsmanninum og leggjast fyri Familieretsafdeling í Ankestyrelsen.

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur ta fatan, at tørvurin hjá barninum, at málsviðgerðin verður skjótt avgreidd, verður best framdur við, at DIA sendir greipingaruppskotið beinleiðis og beinanvegin til Ankestyrelsen, ið sum sentralmyndugleiki kann taka støðu til málið, tá barnið er eyðsæð innanfyri góðkenningarkarmin hjá umsøkjarunum.

Mál, sum í dag verða viðgjørd av Ankestyrelsen í Danmark, skulu helst verða avgreidd innan eina viku. Í teimum førum, tá tørvur er á at fáa fleiri upplýsingar til høldar, kann tað ganga longri tíð. Góðkenningin tengd at einum greipingaruppskoti kann innibera málslið, ið eru tengd at viðgerð hjá øðrum myndugleika og tískil tíðarkrevjandi. Til dømis kann nevnast føri, har tørvur er á, at fáa váttað upprunan til skjalprógv, ella spurningar verða settir myndugleikunum í upprunalandinum, tí skjalprógvið í málinum víkir frá tí, ið vanligt er.

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur eisini ta fatan, at tørvurin hjá barninum á skjótari og smidligari viðgerð av málinum verður bestur framdur við, at Ríkisumboðsmaðurin, eftir yvirtøkuna Familjufyrisitingin, heldur fram við at taka støðu í teimum málum, tá barnið er uttan fyri ein góðkenningarkarm, ella ivi er sáddur um hetta. Eisini í teimum førum, tá greipingin fyrst skal henda í Danmark, og har hetta er treytað av einari nærri støðutakan til tørvin hjá barninum í mun til tilfeingið hjá umsøkjarunum, skal heimildin sum í dag liggja hjá Ríkisumboðsmanninum, eftir yvirtøkuna hjá Familjufyrisitingini – samstundis sum tað framhaldandi skal vera Ríkisumboðsmaðurin, eftir yvirtøkuna Familjufyrisitingin, sum tekur støðu í málum, har søkt verður eftir foreldrum til børn, ið eru trupul at fáa ættleidd. Ríkisumboðsmaðurin, eftir yvirtøkuna Familjufyrisitingin, skal í tílíkum førum meta um tilfeingið hjá umsøkjarunum í mun til tað ítøkiliga barnið.

Heilsu- og innlendismálaráðið skal harafturat viðmerkja, at viðgerðin hjá Ríkisumboðsmanninum, eftir yvirtøkuna hjá Familjufyrisitingini, og hjá sentralmyndugleikanum av greipingaruppskotum verður framd við støði í innheintaðari læknafakligari vitan.

Í mun til at tryggja, at børn, ið eru vorðin leysgivin til altjóða ættleiðing, eru vorðin lógliga leysgivin, er tað fatanin hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum, at skyldan at tryggja, at neyðug skjøl eru tøk - áðrenn váttan kann latast, at ættleiðing kann halda fram - liggur best hjá viðkomandi myndugleika, ið skal lata tílíka váttan.

Tó, um Ríkisumboðsmaðurin, eftir yvirtøkuna Familjufyrisitingin, metir, at tøku upplýsingarnir um málsviðgerðina í upprunalandinum eru ivasamir, so skal sentralmyndugleikin hava høvi at kanna tøka skjalprógvið nærri. Hetta orsakað av, at sentralmyndugleikin hevur eftirlit við ættleiðingarmiðlingini og eisini samskiftir við útlendsku

myndugleikarnar v.m. Sentralmyndugleikin hevur tískil bestu fortreytir fyri at fremja tílíka kanning.

Í mun til eftirlitið, so ynskir Heilsu- og innlendismálaráðið, at føroyskir myndugleikar eftir yvirtøkuna skulu kunna viðvirka til eitt munadygt eftirlit við miðlandi felagsskapunum í samvar við Haagersáttmálan. Uppgávubýtið millum sentralmyndugleikan og Ríkisumboðsmannin, eftir yvirtøkuna Familjufyrisitingina, vil tryggja, at sentralmyndugleikin hevur áhaldandi innlit í sentral skjøl í ættleiðingartilgongdini og eisini kann deila vitan kring ættleiðingarmannagongdir í einstøku londunum við aðrar myndugleikar, ið viðgera ættleiðing.

At sentralmyndugleikin áhaldandi kann fylgja við ættleiðingarmannagongdum og ættleiðingarmiðling frá ymisku londunum gevur høvi til, at óheppin mynstur verða uppdagaði, og kann hendan vitanin verða nýtt í ættleiðingareftirlitinum.

Heilsu- og innlendismálaráðið ger eisini vart við, at viðgerðin av greipingaruppskotum skal síggjast í samanhangi við umhugsaðu broytingarnar í ættleiðingargóðkenningini, ið eru umrøddar í nr. 1.4.7.2.2 og 1.4.7.3.2 í vanligu viðmerkingunum. Børn, ið verða ættleidd, eru í vaksandi mun eldri børn ella børn við serligum tørvi. Verandi góðkenningarskipan er tó í størsta mun skipað við atliti til, at ættleiddu børnini eru undir 3 ár og uttan kendar likamligar ella sálarligar heilsutrupulleikar. Hetta merkir, at fleiri umsøkjarar í dag fáa eina víðkaða góðkenning í samband við greipingina – og fáa harvið eisini endurmett teirra tilfeingi. Tískil verður í veruleikanum góðkenningartilgongdin longd í einstøku ættleiðingarmálunum.

### *1.4.7.2.2. Góðkenningarkarmurin*

Í mun til góðkenningarkarmin er munur á galdandi góðkenningarkarmi í Føroyum og tí í Danmark galdandi.

Í Danmark er góðkenningarkarmurin brottur soleiðis, at tað nú er talan um eina sokallaða almenna (generella) góðkenning, ið fevnir um eitt barn 0-48 mánaðar, har samlaða vitanum um málið ikki talar avgerandi ímóti, at barnið hevur normalar menningarmøguleikar, bæði likamliga og sálarliga.

Broytingin kom í 2015, tá ein arbeiðsbólkur varð settur av Familiretsafdelingen í Ankestyrelsen (tá Familiestyrelsen). Arbeiðsbólkurin hevði til uppgávu at meta um greipingarmannagongdina, og um skilnaðurin millum almenna og víðkaða góðkenning var tíðarhóskandi og í nóg stóran mun tryggjaði barnsins besta. Ein samdur arbeiðsbólkur viðmældi, at hugtøkini almenn og víðkað góðkenning vórðu burturbeind, og at bert ein ættleiðingargóðkenning kom ístaðin. Hetta merkir, at góðkenningarkarmurin í størri mun endurspeglar verandi ættleiðingarmiðling og harvið tey børnini, ið verða leysgivin til ættleiðing. Hetta, tí veruleikin er, at mong av børnunum, ið verða frígivin til ættleiðing, eru eldri enn 36 mánaðar. Eisini var semja um, at ættleiðingargóðkenning framhaldandi skal hava ásett treytir um aldur á barninum og systkjum, tó soleiðis at aldurskarmurin fyri ættleiðing av systkjum verður víðkaður frá verandi 0-36 mánaðum til 0-72 mánaðir.

Ríkisumboðsmaðurin í Føroyum hevur givið til kennar, at flestu umsøkjarar í Føroyum søkja um eina almenna góðkenning. Galdandi góðkenningarkarmur í Danmark er meira rúmsáttur og betri allýstur enn almenna góðkenningin í Føroyum. Broytingin í góðkenningarkarminum, ið varð framd í Danmark, var at tryggja, at karmurin samsvaraði í størri mun veruleikan í dag. Leggjast kann aftrat, at Ríkisumboðsmaðurin hevur upplýst, at flestu børn, ið vórðu ættleidd

frá 2007-2010 vóru millum 0-1 ár. Men seinnu árini eru børnini vorðin eldri – vanliga millum 2-4 ár.

Góðkendir ættleiðarar, ið búgva ávíkavist í Føroyum og í Danmark, hava tískil ikki somu góðkenning, men standa á somu bíðilistum hjá ávíkavist Adoptionsnævnet og DIA. Yvirtøkan av ættleiðingarlóggávuni vil ikki ávirka hesa støðu, tí føroysku myndugleikarnir gera samstarvsavtalu við donsku myndugleikarnar um, at DIA eftir yvirtøkuna framhaldandi skal miðla útlendsk børn til ættleiðing í Føroyum.

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur ta fatan, at tað kann henda, at umsøkjarar við føroyskari góðkenning verða við skeran lut í mun til tey, ið hava eina danska góðkenning – hetta, tí danska góðkenningin er meira rúmsátt, og tískil umfatar fleiri børn, ið verða leysgivin til ættleiðing. Tískil viðmælir Heilsu- og innlendismálaráðið, at reglarnar á økinum verða eins í Føroyum og í Danmark, fyri at forða fyri at munur verður á føroyskum og donskum umsøkjarum.

### *1.4.7.3. Tilmælda skipanin*

#### *1.4.7.3.1. Góðkenning av greiping*

Sambært ávíkavist nr. 1.4.7.1.1. og 1.4.7.2.1 er munur á galdandi rættarstøðu í Føroyum og í Danmark í samband við greiping. Mælt verður til, at ein áseting verður sett inn í ættleiðingarlógina, um at tað er sentralmyndugleikin, ið skjótast gjørligt tekur støðu til, um eitt greipingaruppskot kann góðkennast, um barnið í uppskoti er innanfyri góðkenningarkarmin hjá umsøkjarunum, sí nýggju viðmældu ásetingina í § 37, stk. 1. Í teimum førum, tá hetta ikki er galdandi, verður metingin framd av Familjufyrisitingini eftir tilmæli frá ættleiðingarsamráðnum sbr. § 37, stk. 2. Harafturat verður ein heimildaráseting sett inn í ættleiðingarlógina, ið ger tað møguligt at áseta nærri reglur fyri viðgerðini hjá Familjufyrisitingini í tílíkum málum – íroknað áseta eina freist fyri viðgerðartíðina hjá Familjufyrisitingini, soleiðis at støðutakan til greipingaruppskot skal fremjast innan eina viku, um ikki serlig viðurskifti eru galdandi at tryggja barnið.

Uppgávan verður soleiðis býtt millum sentralmyndugleikan og Familjufyrisitingina – sentralmyndugleikin tekur støðu til greipingaruppskot í teimum førum, tá eitt barn er eyðsæð innanfyri góðkenningarkarmin hjá umsøkjarunum, meðan Familjufyrisitingin tekur støðu í málum, tá barnið er uttanfyri góðkenningarkarmin, ella ivamál er um hetta. Heimildin at lata eina grein 17 c váttan fylgir tí myndugleika, ið tekur støðu til, um ættleiðingartilgongdin kann halda fram ella ei.

Heimildin at tillaga greipingarmannagongdina í umsitingarligu forskriftunum er at finna í § 25, stk. 1, nr. 5 í lógaruppskotinum.

#### *1.4.7.3.2. Góðkenningarkarmurin*

Mælt verður til, at góðkenningarkarmurin fyri ættleiðarar verður broyttur at samsvara við tann galdandi góðkenningarkarmin í Danmark. Hetta merkir, at hugtøkini almenn og víðkað góðkenning falla burtur, og ístaðin verður bert ein góðkenning, ið er meira rúmsátt enn verandi almenna góðkenning. Eitt barn verður sostatt umfatað av góðkenningini, um samlaða vitanin um málið ikki talar avgerandi ímóti, at barnið hevur normalar menningarmøguleikar likamliga og sálarliga. Barnið skal tá við tíðini kunna gerast sjálvhjálpið og veraført fyri at liva eina vanliga tilveru, evt. við avmarkaðum tørvi á stuðulstiltøkum.

Samstundis verður aldurskarmurin fyri systkin víðkaður frá verandi 0-36 mánaðir til 0-72 mánaðir – og eisini verða onnur viðmæli frá áðurnevnda arbeiðsbólki innarbeidd í góðkenningargongdina.

Aftrat hesum verður verandi aldurskarmur víðkaður frá 0-36 mánaðir til 0-48 mánaðir, tí tað eru ikki avgerandi viðurskifti, ið gera, at tørvur er á at halda fast í 0-36 mánaðum. Ein broyting frá 0-36 til 0-48 mánaðar vil endurspegla í størri mun verandi ættleiðingarstøðu.

Sum sæst í vanligu viðmerkingunum í nr. 1.4.7.2.2 og 1.4.7.3.2, so var aldurin á barninum í uppskoti ein av høvuðsorsøkunum til, at ættleiðingarsamráðið tørvaði at taka støðu til greipingaruppskot. Broytingin í aldurskarminum vil tískil væntandi merkja, at talið av málum, har Familjufyrisitingin tørvar at taka støðu til greipingaruppskot eftir tilmæli frá ættleiðingarsamráðnum, fer at minka.

Broytti góðkenningarkarmurin verður settur í verk umsitingarliga við heimild í heimildarásetingini í § 25, stk. 1, nr. 1 í lógaruppskotinum, ið svarar til heimildarásetingina í § 25 í galdandi ættleiðingarlóg. Ein tílík broyting vil ávirka krøvini, ið verða sett umsøkjarunum í ættleiðingargongdini – hesar broytingar verða eisini settar í verk umsitingarliga.

### *1.4.8. Treytirnar fyri at endurstovna rættarstøðuna við uppruna-ættina hjá ættleidda, ið er fyltur 18 ár.*

#### *1.4.8.1. Galdandi lóggáva*

Sambært § 16, stk. 1, 1. pkt. í galdandi ættleiðingarlóg verður við ættleiðing galdandi sama rættarstøða millum ættleidda og ættleiðararnar, sum millum foreldur og teirra barn. Ættleidda barnið og tess lívsarvingar arva og verða arvaði av ættleiðarum og teirra ætt, eins og var ættleidda barnið eitt egið barn hjá ættleiðarunum. Sambært 2. pkt. fellur við ættleiðing samstundis rættarstøðan millum ættleidda og uppruna ættina burtur.

Sambært ættleiðingarlógini § 18, stk. 1 í galdandi ættleiðingarlóg kann ættleiðingarsambandið verða sett úr gildi av myndugleikunum, um ættleiddi og ættleiðararnir eru samd um hetta. Um barnið er undir 18 ár kann sambært stk. 2 eitt ættleiðingarsamband verða sett úr gildi eftir stk. 1, um ættleiðararnir og upprunaforeldrini hjá ættleidda eru samd um hetta – og mett verður, at tað er best fyri barnið.

Í stk. 5 er ásett, at ein ættleiðing kann verða ógildað av myndugleikunum, um upprunaforeldrini hjá barninum søkja um hetta, og ættleiðararnir eru deyðir – hetta um tað verður mett at vera best fyri barnið.

§ 23, stk. 1 ásetur, at verður ein ættleiðing sett úr gildi, so fellur rættarstøðan millum ættleidda og ættleiðararnar og teirra ætt burtur.

Rættarstøðan hjá ættleidda barninum til upprunaættina kann verða endurstovnað umsitingarliga, um ættleiðingin hjá barni undir 18 ár verður ógildað sambært § 18, stk. 2, ella um ættleiðingin verður ógildað sambært § 18, stk. 5 eftir umbøn frá upprunaforeldrunum, og ættleiðararnir eru deyðir. Harumframt kann rættarstøðan hjá ættleidda barninum til upprunaættina verða endurstovnað av rættinum, um rætturin hevur ógildað ættleiðingina við dómi orsakað av, at ættleiðari hevur framt grovt misbrot mótvegis ættleidda barninum ella í avgerandi mun hevur misrøkt skyldur sínar, ið eru álagdar ættleiðara við ættleiðingini, ella

um ógildan annars verður mett at vera av stórum týdningi fyri tað ættleidda barnið sbr. § 19.

Sambært galdandi rættarstøðu er ikki gjørligt umsitingarliga at endurstovna rættarstøðuna til upprunaættina, um ættleiðingin verður sett úr gildi eftir, at barnið er vorðið 18 ár – tó undantikið um ættleiðararnir eru deyðir. Hetta er galdandi – tó ikki hjá børnum undir 18 ár – hóast upprunaforeldrini hjá ættleidda ynskja at endurstovna rættarstøðuna. Somuleiðis er bert gjørligt hjá rættinum at endurstovna rættarstøðuna til uppruna ættina, um treytirnar í § 19 eru loknar.

#### *1.4.8.2. Hugsanin hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum*

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur ta áskoðan, at hesin rættarstandur eigur at verða broyttur – soleiðis at vaksin ættleiðingarbørn og upprunaforeldini kunnu sleppa at endurstovna uppruna rættarstøðuna, um tey ynskja tað. Heilsu- og innlendismálaráðið metir ikki, at nøkur atlit tala ímóti hesari broyting.

#### *1.4.8.3. Tilmælda skipanin*

Heilsu- og innlendismálaráðið metir, at møguleiki eigur at vera fyri, at taka avgerð um endurstovnan av rættarstøðuni, tá ein ættleiðing er vorðin sett úr gildi hjá persóni, ið er fyltur 18 ár – hóast ættleiðararnir ikki eru deyðir. Hetta er tó treytað av, at upprunaforeldrini taka undir við, at rættarstøðan við ættleidda barnið verður endurstovnað.

Rættarstøðan verður harvið einsháttaður fyri vaksin ættleiðingarbørn, ið hava fingið samband við upprunaættina og ynskja at endurstovna rættarstøðuna við hesa – tí møguleikin fyri hesum verður ikki longur treytaður av, at ættleiðararnir eru deyðir.

Harafturat eru atlitini at verja barnið, ið tala fyri varsemi í mun til at ógilda eina ættleiðing hjá ómyndigum, ikki galdandi hjá vaksnum ættleiddum. Serliga er ikki galdandi hjá vaksnum í mun til ómyndig, at foreldramyndugleikin verður ikki endurstovnaður hjá upprunaforeldrunum. Rættarfylgjurnar av at endurstovna rættarstøðuna við upprunaættina hjá einum vaksnum ættleiðingarbarni eru tískil í størsta mun av fíggjarligum (arvarættarligum) og navnarættarligum týdningi. Harafturat kemur so kensluligi týdningurin.

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur eisini ta áskoðan, at tað eigur at vera møguligt at endurstovna rættarstøðuna til bert ta eina upprunaforeldrið og ættina hjá viðkomandi. Hetta um annað av upprunaforeldrunum ikki ynskir at endurstovna rættarstøðuna, er deytt ella ikki er til at finna.

Kravið um samtykki frá upprunaforeldrunum viðførir, at rættarstøðan til eitt upprunaforeldur og ættina hjá viðkomandi ikki kann verða endurstovnað, um viðkomandi foreldur er deytt. Heilsu- og innlendismálaráðið hevur ikki grundarlag fyri at tilmæla, at tað skal vera møguligt at endurstovna rættarstøðuna við ættina hjá viðkomandi upprunaforeldrið, ið er deytt.

### *1.4.9. Gildiskoma av ættleiðingarloyvi*

#### *1.4.9.1. Galdandi lóggáva*

Ættleiðingarlógin ásetur, at ættleiðing verður boðað við loyvi, ið Ríkisumboðsmaðurin ger. Sambært lógini er gildiskoman av ættleiðingarloyvinum, tá ættleitt barn frá øðrum landi kemur her til landið.

Henda áseting um gildiskomuna snýr seg bert um ættleiðingar frá útlandinum – og varð sett inn í ættleiðingarlógina fyri at javnstilla ættleiðingar, ið ikku eru umfataðar av Haagersáttmálanum við ættleiðingar, ið eru umfataðar av sáttmálanum.

Loyvi, ið verður latið í Føroyum, hevur gildi, tá barnið kemur til Føroyar.

### *1.4.9.2. Hugsanin hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum*

Ættleiðingar verða framdar í einari røð av londum, ið ikki kunnu verða viðurkendar beinanvegin í Føroyum, tí gevaralandið krevur eina royndartíð. Royndartíðin merkir, at endaliga avgerðin um ættleiðingarloyvi kann bert avgreiðast, tá royndartíðin er liðug, og gevaralandið antin sjálvt tekur avgerð um ættleiðing ella letur ættleiðingargongdina halda fram í Føroyum. Hetta er t.d. galdandi í Tjekkia, Teilandi og Filipinunum.

Tjekkisku myndugleikarnir gera t.d. bert váttan um avgerð um undan-ættleiðing við heimtøku av barni til Føroyar. Ríkisumboðsmaðurin skal eftir heimtøkuna av barninum gera tríggjar frágreiðingar innan 6 mánaðir, ið verða sendar til tjekkisku myndugleikarnar. Tá tjekkisku myndugleikarnir hava móttikið tær tríggjar frágreiðingarnar í tíðarskeiðnum á 6 mánaðir, ger ”Skrivstovan fyri altjóða verju av børnum” í Brno, Tjekkia, eitt endaligt samtykki til ættleiðing. Ikki fyrr enn tá ber til hjá Ríkisumboðsmanninum at taka eina endaliga avgerð um ættleiðing í Føroyum.

Eitt annað dømi eru Filipinurnar, har filipinski ættleiðingarmyndugleikin ”ICAB” sjálvur avgerð, um barnið kann latast ættleiðarunum og takast við úr landinum. Ríkisumboðsmaðurin skal eftir heimtøkuna gera tríggjar frágreiðingar innan teir komandi 6 mánaðirnar. Frágreiðingarnar verða sendar til ICAB. Tá triðja frágreiðingin er móttikin, tekur ICAB endaliga avgerð um samtykki til, at ein endalig avgerð um ættleiðing kann verða tikin í Føroyum.

Avgerðir um ættleiðing frá einari røð av avgevaralondum verða beinanvegin viðurkendar í Føroyum – t.d. úr Teilandi. Loyvi verður tískil bert givið í Føroyum í teimum ættleiðingarmálum av útlendskum børnum, har avgerðin um ættleiðing í gevaralandinum ikki verður viðurkend beinanvegin her í landinum – ella tá eitt gevaraland ikki tekur endaliga avgerð um ættleiðing, t.d. sum í Tjekkia og Filipinunum. Í teimum førum, tá loyvið skal gerast í Føroyum, og gevaralandið hevur sett krav um royndartíð, er tað ikki neyvt ásett í ættleiðingarlóggávuni í løtuni, nær ættleiðingin í so fall hevur gildi. Heilsu- og innlendismálaráðið hevur ta áskoðan, at tað eigur at standa neyvt í lóggávuni, nær gildiskoman hjá loyvi í tílíkum føri er galdandi. Gildiskoman hevur stóran týdning fyri rættarstøðuna hjá heimtikna barninum og ættleiðarunum.

### *1.4.9.3. Tilmælda skipanin*

Skotið verður upp, at ættleiðingarlógin verður broytt við nýggjum stk. 2 í § 1, soleiðis, at ásetingin verður víðkað til at umfata tey gevaralond, ið hava krav um royndartíð. Í hesum førum skal loyvið fáa gildi í somu løtu, sum royndartíðin er av. Eisini verður skotið upp, at

Familjufyrisitingin fær myndugleika at áseta eina neyva tíð, nær loyvið fær gildi, um talan er um gevaraland, har loyvið ikki kann verða latið, fyrr enn royndartíðin er av.

### 1.5. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Samandráttur av lógaruppskotinum:

- Føroyskan av galdandi ættleiðingarlóg, sí nr. 1.4.1.
- Heimild til at gera avtalu við danskar myndugleikar viðvíkjandi fremmandaættleiðing, sí nr. 1.4.2.
- Kravd ættleiðingarfyrireikandi skeið í sambandi við góðkenningartilgongdina sum ættleiðari til fremmandaættleiðing, sí nr. 1.4.3.
- Kravd ráðgeving beint áðrenn og beint eftir at eitt ættleitt barn kemur heim til ættleiðara í Føroyum umvegis innanlanda- ella altjóða ættleiðing. Møguleiki fyri sjálvbodnari ráðgeving aftrat tí kravdu, sí nr. 1.4.3.
- Samlivandi fáa høvi at ættleiða, sí nr. 1.4.4.
- Nútímansgerð av frøðimáli (terminologi) o.a. Sí nr. 1.4.5.
- Heimild til at sentralmyndugleikin í samband við sína eftirlitsskyldu kann útvega sær upplýsingar frá ættleiðarum, ið búgva í Føroyum, frá Kærunevndini í almanna- familju- og heilsumálum og frá Familjufyrisitingini, sí nr. 1.4.6.
- Skylda hjá Familjufyrisitingini og Kærunevndini í almanna,- familju- og heilsumálum at kunna sentralmyndugleikan um viðurskifti, sum teir meta kunnu hava týdning fyri eftirlitinum við ættleiðingarmiðlandi felagsskapum, sí nr. 1.4.6.
- Møguleiki at avgera umsitingarliga og rættarliga við umsókn frá ættleiddum, ið er fyltur 18 ár, har ættleiðingin er vorðin ógildað, at rættarstandurin við uppruna ættina verður endurstovnaður, um upprunaforeldrina samtykkja hetta, sí nr. 1.4.8.
- Tá ið tann ættleiðingarmiðlandi felagsskapurin hevur mett, at eitt barn liggur innanfyri góðkenningarkarmin hjá umsøkjara, skal tann ættleiðingarmiðlandi felagsskapurin senda málið beinleiðis til sentralmyndugleikan, ið skal taka støðu til, um eitt greipingaruppskot kann góðkennast. Umframt hetta skal góðkeningarkarmurin broytast soleiðis, at hann samsvarar betri við talið av miðlaðum børnum í dag, sí nr. 1.4.7.
- Viðurskiftini kring gildiskomu av ættleiðing í samband við at váttan verður gjørd, tá gevaralond hava eina royndartíð, sí nr. 1.4.9.

Aftrat tí, sum sæst í teimum almennu viðmerkingunum í lógaruppskotinum í mun til broytingaruppskotini, skal viðmerkjast, at broytingarnar av góðkenningartilgongdini og av góðkenningarkarminum, ið síggjast av viðmerkingunum, skulu gerast fyrisitingingarliga. Hetta ger seg eisini galdandi í mun til allýsing av einum samlivandi pari.
Harumframt skal viðmerkjast, at krøvini til teir miðlandi felagsskapirnar, íroknað beinleiðis eftirlitið við teimum miðlandi felagsskapunum, verður strikað í ættleiðingarlógini og sett í samstarvsavtaluna. Harumframt verða §§ 3, 17 og 29 í galdandi ættleiðingarlóg strikaðar, orsakað av, at tær ikki eru viðkomandi longur.

### 1.6. Ummæli og ummælisskjal

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligu avleiðingarnar fyri land og kommunur

Ættleiðingarlóggávan er, sum nevnt í nr. 1.1. ein partur av málsøkinum persóns-, húsfólka- og arvarætti, ið verður yvirtikið á Ólavsøkudegi 2018.

Lógaruppskotið er tískil tengt at løgtingslóg nr. 69 frá 29. mai 2017 um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (yvirtøka av málsøkinum persóns-, húsfólka- og arvarætti).

Samlaðu mettu fíggjarligu avleiðingarnar fyri landið av málsøkinum persóns-, húsfólka- og arvarætti eru sambært lógaruppskotinum til løgtingslóg nr. 69 frá 29. mai 2017 um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (yvirtøka av málsøkinum persóns-, húsfólka- og arvarætti), mettar til at verða 10,3 mió. kr. árliga sbrt. løgtingmál nr. 116/2016. Av hesum 10,3 mió. kr. stava umleið 200.000 kr. frá broytingunum í ættleiðingarlógini.

Fíggjarligu avleiðingarnar fyri landið í mun til lógaruppskotið kunnu lýsast soleiðis:

1) Sambært lógaruppskotinum verður tað framyvir ein fortreyt fyri at verða góðkendur sum ættleiðari, at persónar, ið áður ikki hava ættleitt eitt barn, skulu hava luttikið á einum ættleiðingarfyrireikandi skeiði. Harumframt kann Familjufyrisitingin avgera, at eisini persónar, ið áður hava ættleitt, skulu á ættleiðingarfyrireikandi skeið.

Sambært lógaruppskotinum kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um innihaldið av skeiðunum, ið eru nevnd í § 27 stk. 1 og 2, og hvussu skeiðini skulu leggjast til rættis sbr. § 27, stk. 3. Tað er sostatt landsstýrismaðurin, ið skal tryggja, at ættleiðingarskeið verða skipaði. Útreiðslurnar eru tengdar at innihaldinum og vavinum á skeiðunum, íroknað longdini av skeiðunum.

Væntandi vil árliga útreiðslan av skeiðum vera á leið kr. 70.000.

2) Sambært lógaruppskotinum skal umframt ættleiðingarskeið framyvir veitast kravd ættleiðingarráðgeving til ættleiðarar beint áðrenn og beint eftir, at ættleitt barn er heimtikið. Eisini skal veitast tilboð um sjálvbodna ráðgeving. Skipast skal fyri temakvøldum v.m. fyri góðkendum umsøkjarum, ið bíða eftir barni í boði.

Landsstýrismaðurin skal eisini tryggja, at hesar tænastur verða veittar.

Væntandi vil árliga útreiðslan av hesari ráðgeving v.m. vera á leið kr. 60.000. Afturat hesum er ætlanin at skipa fyri barnabólkum fyri ættleidd.

3) Sambært lógaruppskotinum verður heimild fyri at føroyskir og danskir myndugleikar kunnu gera samstarvsavtalu um fremmandaættleiðing sett inn í lógina.

Samstarvsavtalan kann hava møguligar fíggarligar avleiðingar við sær. Samstarvsavtalan er ikki gjørd enn og tískil er ikki møguligt í løtuni at meta um evt. fíggjarligar avleiðingar av samstarvsavtaluni.

4) Um lógaruppskotið verður samtykt vil tað eisini viðføra, at kunngerðirnar og rundskriv, ið eru tengdar at ættleiðingarlógini skulu endurskoðast, og vegleiðing skal gerast.

Væntaðu útreiðslurnar av hesum eru ongar, tí løgfrøðingur, ið skal gera hesar uppgávur, er í starvi.

Tað eru ongar fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar av lógaruppskotinum.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotini viðvíkjandi broyting av ásetingunum um ættleiðingargongdina, og at samlivandi kunnu ættleiða saman, hevur við sær broytingar í arbeiðsuppgávunum hjá Familjufyrisitingini.

Harumframt skulu tey ættleiðingarfyrireikandi skeiðini og ættleiðingarráðgevingin skipast og veitast.

Landsstýrimaðurin hevur avgjørt at Gigni skal røkja hesar uppgávur. Tískil verður virksemi hjá Gigni økt. Metti kostnaðurin til endamálið er kr. 200.000 um árið. Av tí at virksemið verður sett í verk á ólavsøku er játtanin í løgtingsfíggjarlógini fyri 2018 til høvuðskontu 11.21.3.12. Gigni – heilsufrøði fyri børn & ung avmarkað til ein part av árinum.

Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur.

Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur uttan møguliga tað, at tær koma at samskifta við føroyskar myndugleikar, ístaðin fyri danskar myndugleikar, í mun til evt. viðkomandi familjurættarligt virksemi, ið fram til á ólavsøku verður umsitið av Ríkisumboðinum, men eftir ólavsøku av Familjufyrisitingi.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Avgjørt er, at ættleiðingarfyrireikandi skeiðini og ráðgevingin skal leggjast til Heilsutrygd, ið hevur sæti í Klaksvík. Lógaruppskotið fær tískil umsitingarligar avleiðingar fyri eitt ávíst øki í landinum. Orsøkin til, at avgjørt er at skipa skeiðini og ráðgevingina undir Heilsutrygd, er at Gigni, ið nú er ein deild undir Heilsutrygd, longu hevur førleikar og royndir á økinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri ávíkavist ættleiðarar, ættleitt børn, samlivandi og børn hjá samlivandi. Harumframt hevur lógaruppskotið avleiðingar fyri persónar, ið eru yvir 18 ár, hvørs ættleiðing er sett úr gildi, og ynski er um at endurstovna ættarbandið við upprunaforeldrini.

Lógaruppskotið hevur við sær, at samlivandi framyvir á jøvnum føti við hjún fáa møguleika fyri at ættleiða saman - eisini barnið hjá sínum samlivara. Samlivandi í hjúnabandslíknandi

parlagi skulu eisini ættleiða saman, júst sum hjún skulu ættleiða saman. Uppskotið, um at geva ógiftum samlivandi møguleika fyri at ættleiða saman, íroknað stjúkbarnaættleiða, á sama hátt sum hjún, viðførir eina økta javnstøðu millum hjún og ógift samlivandi - umframt eina økta javnstøðu millum børn hjá ógiftum foreldrum og børn hjá hjúnum. Lógaruppskotið ávirkar ikki ta kynsligu javnstøðuna orsakað av, at lógaruppskotið, eins og er galdandi fyri hjún, eisini fevnir um samlivandi av sama kyni.

§ 23, stk. 4 í lógaruppskotinum inniber, at um ein ættleiðing er sett úr gildi í mun til ein persón, ið er fyltur 18 ár, kann Kærunevndin fyri almanna-, familju- og heilsumálum ella dómstólurin við umbøn frá tí ættleidda avgera, at rættarstandurin hjá ættleidda verður endurstovnaður við upprunaættina, um upprunaforeldrini samtykkja í hesum. Um bert annað av upprunaforeldrunum samtykkir sambært 1. pkt. kann verða avgjørt, at rættarstandurin bert verður endurstovnaður í mun til ættina hjá viðkomandi upprunaforeldri.

Uppskotið til § 27 inniber, at tað verður ein fortreyt fyri at verða góðkendur sum ættleiðari, at persónar, ið áður ikki hava ættleitt eitt barn, hava luttikið í einum ættleiðingarfyrireikandi skeiði. Eisini inniber ásetingin, at Familjufyrisitingin fær høvi at krevja, at eisini persónar, ið áður hava fremmandaættleitt, skulu luttaka á einum skeiði.

Uppskotið til § 28 inniber, at ættleiðarar skulu móttaka kravda ættleiðingarráðgeving beint innan og aftaná, at eitt barn verður heintað heim. Harumframt fáa ættleiðingarfamiljur møguleika fyri sjálvbodnari ráðgeving, soleiðis at møguligt verður at fáa ráðgeving til barnið verður 18 ár.

Sambært ávíkavist §§ 27 og 28 kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur fyri ávíkavist innihaldið, og hvussu ávíkavist skeið og ráðgeving skal skipast.

Uppskotið til § 38, um at sentralmyndugleikin kann savna inn upplýsingar frá ættleiðarum, tá ið talan er um altjóða ættleiðing, inniber, at ættleiðarar skulu svara nøkrum spurningum, tá ið barnið er komið til Føroyar.

Lógaruppskotið hevur útyvir omanfyristandandi ikki aðrar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Umveldisfyrivarnið fyri Føroyar viðvíkjandi Haagersáttmálanum varð tikið av við kunngerð nr. 6 frá 1. februar 2007.

Sáttmálin hevur til endamáls at tryggja, at altjóða ættleiðingar verða framdar til barnsins besta og við virðing fyri teimum grundleggjandi rættindunum, ið eru viðurkend í altjóða rætti. Tað snýr seg millum annað um at forða fyri barnaráni, sølu ella handli við børnum.

Í Haagersáttmálanum grein 5, litra b stendur, at móttakaraland skal tryggja sær áðrenn ættleiðingina, at komandi ættleiðarar hava fingið ráðgeving í tann mun, tað tørvar. Eisini stendur í sáttmálanum grein 9, litra c, at sentralmyndugleikin antin beinleiðis ella umvegis almennar myndugleikar ella góðkendar felagsskapir í landinum skal fremja neyðugu menningina av ráðgeving og stuðli eftir ættleiðing í viðkomandi landi.

Grein 5, litra b, skal síggjast í ljósinum av grein 9, litra c soleiðis, at sentralmyndugleikarnir í ymisku londunum antin beinleiðis ella umvegis almennar myndugleikar ella góðkendar felagsskapir/stovnar í landinum skulu gera neyðug tiltøk at tryggja menningina av ráðgeving og stuðli eftir ættleiðing.

Mett verður, at lógaruppskotið um ættleiðingarfyrireikandi skeið og ættleiðingarráðgeving lúka krøvini í Haagersáttmálanum í mun til skylduna at menna nøktandi ráðgeving og stuðul í samband við ættleiðing og í mun til týdningin av, at ættleidd børn koma til vælfyrireikaðar familjur.

Sí annars pkt. nr. 1.4.3.1.1. um Haagersáttmálan.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

1) Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS, "Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention". Sáttmálin varð settur í gildi fyri Føroyar við lóg tann 1. maj 2000.

Lógaruppskotið viðførir, at ættleitt børn, ið veksa upp í familjum, har foreldrini ikki eru gift, ikki longur verða viðgjørd øðrvísi enn ættleitt børn, ið veksa upp í familjum, har foreldrini eru gift. Sama ger seg galdandi í mun til samlivandi í hjúnabandslíknandi parlagi og hjún í mun til ættleiðing.

Mett verður, at henda broyting í størri mun tryggjar, at krøvini í ávíkavist grein 8 um rættin til familjulív og grein 14 um forboð móti mannamuni verða lokin.

Lógaruppskotið er ikki í stríð við EMRS.

2) Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, ið áleggur limalondunum at menna og fremja politikk, lógir og fyrisitingarlig mál, ið skulu tryggja rættindi hjá fólki, ið bera brek. Uppskotið hevur ongar fylgjur í mun til nevnda sáttmála.

Uppskotið er ikki viðkomandi fyri nevnda sáttmála.

### 2.9. Marknaforðingar
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

### 2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv
Galdandi § 27 f í ættleiðingarlógini, ið við lógaruppskotinum verður til *§ 40,* inniheldur ásetingar um revsing.

Revsiásetingin staðfestir, at brot á ávikavist §§ 27 d, stk. 2, og 27 e í galdandi lóg verður revsað við sekt ella fongsli í upp til 4 mánaðir. Sama ger seg galdandi fyri millummann, um millummaður veitir gjald fyri at fáa samtykki til ættleiðing til vega. Revsiábyrgd kann áleggjast feløgum og øðrum løgfrøðisligum persónum sambært reglunum í revsilógini kapittul 5.

Galdandi § 27 e, ið við hesum lógaruppskoti verður til *§ 36*, staðfestir, hvør kann veita hjálp at knýta samband millum persónar, ið ynskja at ættleiða, og eitt barn, við tí endamáli at fremja ættleiðing og annars at veita ættleiðingarhjálp.

Galdandi § 27 d, stk. 2 verður við lógaruppskotinum tilmæld at verða strikað, tí ásetingin regulerar viðurskifti, um m.a. beinleiðis eftirlitið við miðlandi felagsskapunum – reguleringar, ið verða partur av samstarvsavtaluni. Tískil er revsiásetingin broytt í tann mun, at ávísingin til galdandi § 25 d, stk. 2 verður strikað.

Annars er *§ 40* í lógaruppskotinum bert umsett til føroyskt og svarar sostatt til ásetingina í galdandi § 27 f í ættleiðingarlógini.

Víst verður annars til serligu viðmerkingarnar til *§ 40.*

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ongar slíkar ásetingar.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ongar slíkar ásetingar.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?**

Sambært lógaruppskotinum verður tað álagt umsøkjarum, ið søkja um góðkenning sum ættleiðari fyri fyrstu ferð, at luttaka á einum ættleiðingarfyrireikandi skeiði. Eisini kann Familjufyrisitingin áleggja persónum, ið áður hava fremmandaættleitt, at luttaka á einum ættleiðingarfyrireikandi skeiði.

Harumframt áleggur lógaruppskotið fremmandaættleiðarum ráðgeving beint innan og beint áðrenn, barn er heimtikið.

Útyvir omanfyrinevnda hevur uppskotið ongar slíkar avleiðingar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?**

Lógaruppskotið gevur landsstýrismanninum nakrar nýggjar heimildir í mun til galdandi ættleiðingarlóg. Nýggju heimildirnar hjá landsstýrismanninum viðvíkja heimildir til at áseta nærri reglur um ættleiðingarfyrireikandi skeið, ættleiðingarráðgeving, um viðger av málum, um ein ættleiðingargongd kann halda fram og um viðgerðina av kærum.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**

Lógaruppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**

Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

## 2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Ja | Ja | Ja | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Ja | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Ja | Ja | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til einstøku greinarnar

#### Til § 1

Uppskotið til *§ 1, stk. 1* er óbroytt í mun til higartil galdandi áseting í § 1, stk. 1 í ættleiðingarlógini og er sostatt bert umsett til føroyskt. Ásetingin staðfestir, at førleikin at geva tilsøgn um ættleiðing er fyrisitingarligur og er hjá Familjufyrisitingini.

Sambært galdandi § 1, stk. 2 í ættleiðingarlógini hevur ættleiðingarloyvið gildi, tá barnið kemur til Føroyar, tá ið talan er um ættleiðing av barni frá útlandinum. Stk. 2 í galdandi ættleiðingarlóg ásetur tískil gildiskomuna á eini ættleiðing av einum útlendskum barni.

Galdandi stk. 2 í ættleiðingarlógini snýr seg bert um ættleiðing av børnum frá útlandinum. T.e. uttan fyri danska ríkið. Ásetingin varð sett inn í lógina í samband við anordning nr. 1169 frá 25. novembur 2006 um gildiskomu av lóg um ættleiðing í Føroyum, sí løgtingsmál nr. 95/2005. Endamálið við ásetingini var at javnstilla ættleiðingar, ið ikki eru umfataðar av Haager sáttmálanum, við ættleiðingar, ið eru umfataðar av sáttmálanum. Sambært galdandi stk. 2 hevur eitt ættleiðingarloyvi, ið er givið í Føroyum, virknað frá tí, at barnið kemur til Føroyar.

Útlendskar ættleiðingaravgerðir frá eini røð av gevaralondum verða beinanvegin viðurkendar í Føroyum. Loyvi verður tískil bert latið í Føroyum í teimum ættleiðingarmálum av útlendskum børnum, har avgerðin hjá gevaralandinum um ættleiðing ikki verður viðurkend her í Føroyum – ella har gevaralandið ikki tekur avgerð um endaliga ættleiðing. Í teimum førunum er tað sambært galdandi lóg Ríkisumboðsmaðurin, ið skal greiða úr hondum eitt ættleiðingarloyvi.

Ættleiðingar verða framdar frá eini røð av londum, ið ikki kunnu verða viðurkendar í Føroyum orsakað av sokallaðari royndartíð. Harumframt verður framd ein røð av ættleiðingum, har gevaralandið bert letur samtykki til, at ættleiðing kann verða framd í móttakaralandinum eftir eina sokallaða royndartíð. Royndartíðin merkir, at tann endaliga ættleiðingarváttanin í fyrsta lagi kann avgreiðast, tá royndartíðin er farin, og gevaralandið antin sjálvt letur úr hondum eina ættleiðingarváttan ella loyvir, at ættleiðingin kann halda fram í Føroyum.

Í einum nýggjum *stk. 2* verður mælt til, at ættleiðingarlógin verður broytt, so ásetingin verður víðkað til eisini at umfata tey gevaralond, ið hava sett í verk eina royndartíð. Í hesum førum skal loyvið í fyrsta lagið fáa gildi, tá royndartíðin er útgingin. Mælt verður eisini til, at Familjufyrisitingin verður heimilað til at áseta eitt annað tíðspunkt fyri gildiskomuna av ættleiðingarloyvinum, um talan er um gevaralond, har loyvið ikki kann verða latið beinanvegin eftir, at royndartíðin er útgingin.

Víst verður til almennu viðmerkingarnar nr. 1.4.9

#### Til § 2

Sambært galdandi áseting í § 2 í ættleiðingarlógini kann loyvi bert verða latið at ættleiða, um ættleiðingin verður hildin at gagna tí, ið ynskist ættleiddur.

Í dag er tað hugtakið barnsins besta, ið verður nýtt, tá atlitið til barnið verður lýst í familjurættarligari lóggávu. Mælt verður til, at ásetingin verður orðað í samsvar við hetta.

Broytta orðingin í *§ 2* í uppskotinum ger, at hugtakið verður dagført, soleiðis at hugtakið, hvat er best fyri barnið verður nýtt.

Ásetingin eru annars bert umsett til føroyskt, og tískil er innihaldið ikki broytt í mun til galdandi áseting í § 2 í galdandi ættleiðingarlóg.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar til *§ 10*.

Víst verður eisini til almennu viðmerkingarnar í nr. 1.4.5.

**Til § 3**

*§ 3* í lógaruppskotinum er bert umsett til føroyskt, uttan broyting í innihaldinum í mun til galdandi áseting í § 4.

Ásetingin staðfestir at fyri at kunna ættleiða, skal ættleiðari vera í minsta lagi 25 ár. Tó kann ættleiðingarloyvi latast tí, ið er fyltur 18 ár, um serlig viðurskifti tala fyri tí. Aldurskravið er eisini galdandi í mun til stjúkbarnaættleiðing. Aldurskravið skal vera lokið, tá ið ættleiðingarloyvið verður latið, tískil er vanliga ikki nakað, ið forðar fyri, at viðgerð av einari umsókn kann byrja stutt innan, umsøkjari fyllir 25 ár.

Í samband við metingina av, um serlig viðurskifti gera seg galdandi, ið tala fyri, at ein ættleiðing skal fremjast, innan umsøkjari er fyltir 25 ár, verður stórur dentur lagdur á, um talan er um slíkar umstøður, ið gera, at ættleiðingin skal fremjast beinanvegin. Alternativt kann dentur leggjast á, hvussu leingi umsøkjari hevur verið ein partur av lívinum hjá barninum, um barnið bert hevur eitt ella ongi foreldur, longdina av samlívinum hjá umsøkjara og foreldrinum at barninum, harumframt um umsøkjari og foreldri hjá barninum hava børn í felag.

**Til § 4**

*§ 4, stk. 1* í lógaruppskotinum svarar til galdandi áseting § 4 a, stk. 1. Tó soleiðis at mælt verður til at strika ávísingina til § 25 b í galdandi áseting stk. 1. Broytingin er ein avleiðing av, at § 25 b í galdandi ættleiðingarlóg verður tilmæld at verða strikað í uppskotinum, sí almennu viðmerkingarnar nr. 1.4.2.3.

*§ 4, stk. 1* í lógaruppskotinum (§ 4 a, stk. 1 í galdandi lóg), staðfestir, at um tann, ið ynskist ættleiddur er undir 18 ár, kann ættleiðing bert loyvast, um umsøkjarin er góðkendur sum ættleiðari sbr. *§ 26* í lógaruppskotinum. *§ 26* í lógaruppskotinum svarar til galdandi áseting § 25 a.

§ 4, a stk. 2 í galdandi lóg staðfestir undantøkini til kravið um góðkenning. Sambært § 4 a, stk. 2 verður góðkenning nevniliga ikki kravd í samband við ættleiðing av barni hjá hjúnafelaga, ella sambært reglum ásettum av landsstýrismanninum í førum, har tað er tættur

skyldskapur ella annað serligt tilknýti ímillum ættleiðara og tað ættleidda barnið ella foreldrini hjá tí.

Við tilmældu broytingini í 4 a, stk 2, sum við hesum lógaruppskotinum verður til *§ 4, stk. 2,* vil undantakið frá kravinum um góðkenning eisini verða galdandi fyri stjúkbarnaættleiðing í samlívsparlagi. Ásetingin skal verða sædd í ljósinum av *§ 5* í lógaruppskotinum.

Sambært § 16 í galdandi lóg sum við hesum lógaruppskotinum verður til *§ 17*, íkoma somu rættarviðurskifti millum ættleiðara og ættleitt barn, sum millum foreldur og teirra egna barn. Við tilmældu broyttu orðingini í § 4 a, stk 2, sum við hesum lógaruppskoti verður til *§ 4, stk. 2,* verður ásetingin dagførd, soleiðis, at tað verður bert tosað um barn hjá hjúnarfelaga ella samlivara og skilt verður sostatt ikki millum ættleitt barn og egið barn. Tískil er talan um eina málsliga dagføring í samsvar við innihaldið í § 16 í galdandi lóg, sum við hesum lógaruppskotinum verður til *§ 17.*

Annars eru ásetingarnar bert umsettar til føroyskt og sostatt óbroyttar í mun til galdandi áseting § 4 a, sum sostatt við hesum lógaruppskotinum verður til *§ 4.*

Víst verður til almennu viðmerkingarnar nr. 1.4.4. og 1.4.5.

**Til § 5**

Sambært galdandi áseting í § 5 í ættleiðingarlógini, kunnu bert hjúnafelagar ættleiða saman, og ein hjúnafelagi kann bert ættleiða saman við sínum hjúnafelaga.

Tilmælda broytingin merkir, at ógift samlivandi kunnu ættleiða eins og hjún. Hjúnafelagar vilja framhaldandi bert hava høvi at ættleiða saman. Samsvarandi vilja samlivandi, ið liva í einum hjúnabandslíknandi parlagi, bert hava høvi til at ættleiða saman – eins og kravt verður, at tey skulu ættleiða saman.

Samlivandi verða í lógini allýst at vera eitt par, ið livur í einum støðugum parlagi, ið ber brá av at vera eitt hjúnaband. Kravt verður eitt samanhangandi samlív á í minsta lagi 2 ½ ár á felags skrásettum bústaði upp til umsókn um ættleiðing. Fyri samlivandi er samlív á 2 ½ ár bæði ein treyt fyri at sleppa at ættleiða saman, men eisini grundarlagið fyri, at kravt kann verða av viðkomandi, at tey skulu ættleiða saman. Kravið um í minsta lagi 2 ½ árs samlív áðrenn innlatna umsókn verður galdandi fyri bæði samlivandi og hjún - og verður hetta kannað á sama hátt. Undantak frá samlívskravinum kann verða latið, eins og í galdandi lóggávu, um serlig viðurskifti gera seg galdandi – t.d. um tey samlivandi hava havt ein lutfalsliga høgan aldur, tá ið tey hava møtt hvørjum øðrum, og samlívskravið tískil kemur í stríð við aldurskrøvini í mun til góðkenning sum ættleiðari til fremmandaættleiðing, ella um talan er um eina støðu, ið ger at stjúkbarnaættleiðing ikki kann útsetast.

At enda kann eitt serligt føri eisini vera, at umsøkjari er giftur, men býr saman við samlivara, ið viðkomandi eisini ynskir at ættleiða saman við. T.d. kann hjúnaskilnaðurin vera drúgvur. Ásetingin forðar ikki fyri, at ein giftur umsøkjari ættleiðir saman við sínum samlivara í tílíkum føri. Hetta er tó treytað av, at vanligu treytirnar fyri at ættleiða eru uppfyltar. Tann støðan, at umsøkjari enn er giftur, verður tikin við í samlaðu metingini, um umsókn um ættleiðing skal verða gingin á møti. Eisini vilja innanhýsis viðurskiftini millum umsøkjararnar verða partur av metingini.

Á sama hátt kunnu eisini hjún ættleiða saman, um tey ikki longur búgva saman, og annar hevur ein samlivara. Hetta kundi t.d. verið, um hjúnafelagarnir ynskja at ættleiða eitt fyrrverandi fosturbarn, ið er fylt 18 ár. Nevndu viðurskifti, eitt nú at umsøkjarin hevur ein annan samlivara, vilja tó eisini í hesum føri verða tikin við í metingini av, um ættleiðingin er tað besta fyri barnið.

Umsøkjarar, ið ikki hava livað saman í minsta lagi 2 ½ ár, verða ikki sædd at vera samlivandi sambært lógini. Fyri ógiftan samlivara, ið ikki hevur havt eitt samlív í minsta lagi 2 ½ ár, er tó framhaldandi møguleiki at ættleiða sum stakur. Samlivandi, ið fáa góðkenning at ættleiða frá føroysku myndugleikunum, skulu framhaldandi eisini lúka treytirnar í gevaralandinum – íroknað evt. krav um hjúnaband.

Víst verður til almennu viðmerkingarnar nr. 1.4.4.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar til *§§ 4, 6, 17, 20 og 33.*

Sambært galdandi áseting í § 5 stk. 1, 2. pkt., kann tann eini hjúnafelagin við samtykki frá hinum ættleiða barnið hjá viðkomandi hjúnafelaga.

Við broyttu orðingini í § 5 stk. 1, 2. pkt, ið er varðveitt sum *§ 5, stk. 1, 2. pkt.* í uppskotinum verður ásetingin málsliga dagførd, soleiðis at skilnaður ikki verður gjørdur millum ættleitt barn og egið barn. Tískil er talan um eina málsliga dagføring í samsvar við innihaldið í galdandi § 16 í ættleiðingarlógini, ið verður til *§ 17* sambært lógaruppskotinum.

Víst verður eisini til almennu viðmerkingarnar nr. 1.4.5.

**Til § 6**

*§ 6* í uppskotinum er nýggj.

Við tilmælda nýggja *§ 6* í lógaruppskotinum vil tað verða møguligt at fremja eina stjúkbarnaættleiðing av einum barni hjá samlivara, eins og tað verður møguligt at stjúkbarnaættleiða eitt barn hjá fyrrverandi samlivara. Harvið verður veittur møguleiki fyri, at sleppast kann undan tí fyri barnið óhepnu støðu, at stjúkbarnaættleiðing ikki er gjørlig orsakað av kravinum um hjúnaband, hóast samlív í mong ár.

Galdandi áseting í § 5 í ættleiðingarlógini loyvir bert stjúkbarnaættleiðing innan karmarnar á verandi hjúnabandi. Orsøkin til hetta var upprunaliga atlitið at tryggja eitt ávíst støðufesti hjá ómyndigum børnum. Tilmælda broytingin broytir ikki hetta grundleggjandi atlitið í mun til ómyndug børn, meðan bæði foreldur eru á lívi.

Í *§ 6, stk. 2* í uppskotinum verður staðfest, at tað skal verða gjørligt at stjúkbarnaættleiða barn hjá fyrrverandi hjúnafelaga ella samlivara. Um hjúnabandið er endað orsakað av hjúnaskilnaði ella ógildan av hjúnarbandinum, ella er samlívið endað, kann ættleiðing tó bert fremjast, um tann, ið ynskist ættleiddur, er myndugur.

Um barnið er myndugt, viðførir ásetingin, at stjúkbarnaættleiðing kann verða framd, hóast stjúkforeldrið er vorðið skilt frá móður ella faðir barnsins, ella um samlívið millum stjúkforeldrið og móður ella faðir barnsins er slitið. Stjúkbarnaættleiðing av myndugum krevur ikki samtykki frá foreldrum barnsins. Sambært galdandi ættleiðingarlóg § 13, ið sambært lógaruppskotinum verður til *§ 14* skal tó innheintast ummæli frá upprunaforeldrunum. Tørvur er ikki á samtykki frá møguligum hjúnafelaga hjá stjúkforeldrinum.

Uppskotið broytir annars ikki treytirnar fyri stjúkbarnaættleiðing, íroknað reglurnar um uppfostran, har siðvenja setur krøv um, at umsøkjarin skal hava búð saman við barninum í eina ávísa tíð – eins og tað skal vera ein ávísur aldursmunur millum ættleiðaran og barnið.

Víst verður til almennu viðmerkingarnar nr. 1.4.4.

**Til § 7**

*§ 7* í lógaruppskotinum er bert umsett til føroyskt og er sostatt óbroytt í mun til § 6 í galdandi ættleiðingarlóg og snýr seg um innheintan av samtykki og hoyring í mun til børn, ið ynskjast ættleidd. Eisini regulerar ásetingin hvussu samtykki skal innheintast.

Stk. 1 fevnir um børn, ið eru fylt 12 ár. Sambært stk. 1 í eigur ættleiðingarloyvi ikki at verða givið, uttan at samtykki er fingið frá barninum, ið ynskist ættleitt, um barnið er fylt 12 ár. Ættleiðing av barni, ið er fylt 12 ár, er sostatt í útgangsstøðinum treytað av samtykki frá barninum, og er sostatt í útgangsstøðinum eitt gildiskrav. Børn, ið ynskjast ættleidd og eru fylt 12 ár, hava sostatt sambært ásetingini samræði á ættleiðingarmálinum.

Um Familjufyrisitingin metir, at útvegan av samtykki verður mett at vera til skaða fyri barnið, kann Familjufyrisitingin lata vera við at innheinta samtykki frá barninum. Henda áseting skal nýtast við stórum varsemi og verður í roynd og veru sjáldan nýtt – tað er ikki nøktandi, at ein ynskir at forða fyri, at barnið skal fáa kunnleika til, at umsøkjari ikki er foreldur hjá barninum.

Støður kunnu vera, har barn yngri enn 18 ár orsakað av evnaveikleika ella sinnissjúku ikki er ført fyri at skilja rættarvirknaðin av eini ættleiðing, og har innheintan av samtykki vil skaða barnið. Í tílíkum førum er møguligt at fremja eina ættleiðing, uttan at samtykki verður innheintað frá barninum.

Sambært stk. 2, skal samtykki latast í samband við persónliga uppmøting á Familjufyrisitingini ella hjá øðrum myndugleika ella stovni, ið eru góðkendir sambært *§ 9, stk. 1*. Innan barnið gevur sítt samtykki, skal ein samrøða vera við barnið um ættleiðingina, og barnið skal kunnast um týdningin av ættleiðingini. Undir samrøðuni skal Familjufyrisitingin ella annar myndugleiki ella stovnur, ið eru góðkendir sambært *§ 9, stk. 1* tryggja sær, at barnið skilir rættarvirknaðin av einari ættleiðing, íroknað spuningar um navnabroyting og ríkisborgaraskap. Samrøðan skal nýtast til metingina av, um ættleiðingin er best fyri barnið.

*Stk. 3* fevnir um børn yngri enn 12 ár. Sambært stk. 3 skulu upplýsingar um sjónarmiðini hjá barni undir 12 ár um ta ætlaðu ættleiðingina skjalfestast í tann mun, búnaðarstøðið hjá barninum og umstøðurnar í málinum tala fyri tí. Tá avgerð verður tikin, skal atlit takast til sjónarmiðini hjá barninum í mun til ta ætlaðu ættleiðingina í størst møguligan mun.

Hoyringsreglan er ikki treytaleys. Familjufyrisitingin skal altíð ítøkiliga meta um búnaðarstøðið hjá einstaka barninum, og ikki bert nýta aldurin hjá barninum at meta um hetta. Upplýsingar um búnaðarstøðið hjá barninum verður m.a. fingin til vega frá foreldrunum og evt. dagstovninum ella skúlanum hjá barninum.

Um eitt ella fleiri av teimum formligu krøvunum fyri ættleiðing ikki eru lokin, ella metir Familjufyrisitingin, at ættleiðingin grundað á tøkar upplýsingar ikki er best fyri barnið, so skal barnið ikki hoyrast.

Búnaðarstøðið hjá barninum avger, um veruligar samrøður skulu vera við barnið. Gjørligt er tó í flestu førum at hava samrøðu við uml. 7 ára gomul børn. Møguliga ber eisini til at hava samrøður við børn, ið eru væl yngri (undir skúlaaldur). Familjufyrisitingin skal vera varin, um talan er um barn við breki.

Um Familjufyrisitingin velur at hoyra barnið, eigur barnið at verða kallað inn til samrøðu. Familjufyrisitingin eigur í samrøðuni at kunna barnið um rættarvirknaðin av eini ættleiðing og ráðgeva barninum. Vavið av kunningini og ráðgevingini eigur at taka støði í veruligu støðuni hjá barninum, eins og eigur støðið á kunningini og ráðgevingini at passa til støðið hjá barninum.

Familjufyrisitingin eigur at vera varug við, tá samrøða verður hildin við barn, at barnið kann ikki geva til kennar síni sjónarmið, um barnið ikki er nóg væl kunnað um spurningarnar, ið barnið verður væntað at siga sína hugsan um. Tískil er týdningarmikið, at barnið til samrøðuna verður kunnað um orsøkina til, at barnið er vorðið innkallað til samrøðu og um spurningarnar, sum barnið skal hava eina hugsan um.

Týdningarmikið er, at barnið ikki verður sett í eina støðu, har tað missir yvirlitið og ikki megnar at hava eina meining.

Um upplýsingarnir um hugsanina hjá barninum um ættleiðingina stava frá øðrum myndugleikum, skal Familjufyrisitingin tryggja sær, at barnið hevur fingið nøktandi ráðgeving og kunning um ættleiðingina. Um hetta ikki er støðan, eigur barnið at verða kallað inn til samrøðu í Familjufyrisitingini – hetta hóast upplýsingar um hugsanina hjá barninum longu eru tøkir.

**Til § 8**

*§ 8* í lógaruppskotinum er bert umsett til føroyskt og er sostatt óbroytt í mun til galdandi § 7 í galdandi ættleiðingarlóg og snýr seg um innheintan av samtykki frá foreldrum, um barnið, ið ynskist ættleitt, er undir 18 ár.

Sambært stk. 1 og stk. 3 er ættleiðing av einum persóni, ið er yngri enn 18 ár og er ómyndigur, treytað av, at foreldrini ella verjin geva sítt samtykki til ættleiðingina. Hetta er tó bert galdandi, um foreldrini hava (lut í) foreldramyndugleikanum. Frá foreldrum, ið ikki hava (lut í) foreldramyndugleikanum, verður ístaðin váttan innheintað sbrt. galdandi § 13, ið við lógaruppskotinum verður til *§ 14*.

Sæð kann bert vera burtur frá at innheinta samtykki sambært galdandi § 7, ið við lógarupskotinum verður til *§ 8*, frá foreldri, ið hevur (lut í) foreldramyndugleikanum, um viðkomandi er deyður, horvin, ella orsakað av sinnissjúku, evnaveikleika ella líknandi standi ikki er ført fyri at virka skynsamt.

Familjufyrisitingin eigur at krevja eina læknaváttan ella váttan frá øðrum viðkomandi fakfólki at prógva vantandi skil orsakað av sinnissjúku ella evnaveikleika. Váttanin eigur at

verða gjørd við ættleiðingarmálinum í huga og upplýsa, um viðkomandi er førur fyri at skilja rættarvirknaðin av eini ættleiðing og samtykki.

Um foreldramyndugleikaánarin ikki megnar at lata samtykki sambært galdandi § 7, ið við lógarupskotinum verður til *§ 8*, skal ei heldur innheintast váttan sambært galdandi § 13, ið við lógaruppskotinum verður til *§ 14*, frá viðkomandi.

Gjørt verður vart við, at tað viðurskiftið, at eitt foreldur er undir verjumáli, ikki í sjálvum sær hevur týdning fyri, um foreldrið kann lata samtykki sambært § 7, ið við hesum lógaruppskoti verður til *§ 8*, tí hetta er bert tengt at, um viðkomandi, ið hevur foreldramyndugleikan yvir barnið, er ført fyri at skilja rættarvirknaðin av ættleiðingini og samtykkinum. Ein verji, ið er tilnevndur foreldrinum, kann ikki vegna foreldrið geva samtykki sambært § 7, ið við hesum lógaruppskoti verður til *§ 8*.

**Til § 9**

*§ 9 stk. 1-4* í lógaruppskotinum er bert umsett til føroyskt og tískil óbroytt í mun til galdandi áseting í § 8, stk. 1-4 og snýr seg um formkrøvini í mun til latan av samtykki sambært galdandi § 7, ið við hesum lógaruppskoti verður til *§ 8*.

Sambært stk. 1 skal foreldramyndugleikaánarin geva sítt samtykki sambært *§ 8* í lógaruppskotinum (svarar til § 7 í galdandi lóg) skrivliga, og samtykki skal latast í samband við persónliga uppmøting á Familjufyrisitingini ella hjá øðrum myndugleika ella stovni, ið eru góðkendir til hetta av landsstýrismanninum. Foreldrini ella verjin skulu sambært stk. 3 vegleiðast um rættarvirknaðin av ávikavíst ættleiðingini og samtykkinum, innan samtykkið verður latið. Ráðgevingin skal hava eitt tílíkt vavi, at tann, ið verður ráðgivin, er førur fyri at meta, um samtykki skal latast.

Verður mett, at avgerðin hjá foreldrunum um ættleiðing ikki er tikin við nøktandi umhugsni, ella mett verður av aðrari orsøk, at samtykki ikki eigur at verða móttikið, eiga foreldrini at verða biðin um at umhugsa málið av nýggjum, áðrenn samtykki verður móttikið.

Samtykki, ið er fingið til vega á annan hátt, hevur ikki rættarligan týdning.

Sambært stk. 4 kann samtykki ikki móttakast innan 3 mánaðar eftir, at barnið er føtt, uttan heilt serlig viðurskifti gera seg galdandi. Ásetingin er galdandi fyri mammuna og fyri pápan.

Gildistíðin hjá samtykkinum er ikki tíðaravmarkað, og skal samtykkið vera tøkt inntil tilsøgn um ættleiðingarloyvið verður latið. Eitt samtykki kann verða kallað aftur. Fyri at tryggja dagførdum samtykki, eigur Familjufyrisitingin at stremba móti, at eitt samtykki er latið innan tað seinasta leypandi árið eftir tilsøgn um ættleiðingarloyvið verður latið.

Um møguleikan at fremja eina ættleiðing, hóast samtykkið er tikið aftur, verður víst til *§ 10, stk. 1* í lógaruppskotinum.

Sambært stk. 4 kann samtykki latast til, at barnið verður ættleitt av tí, sum verður tilnevndur av einum myndugleika ella stovni, sum hevur heimild til at arbeiða við ættleiðing av børnum.

Tilmælda ásetingin í *stk. 5* er nýggj og er ein konsekvensbroyting orsakað av, at Føroyar yvirtaka familjurættarligu lóggávuna. Nágreinað verður, at landsstýrismaðurin ella tann, ið

landsstýrismaðurin heimilar hetta, kann avgera, at samtykki latið hjá einum útlendskum myndugleika ella stovni verður javntstillað, við samtykki latið hjá einum føroyskum myndugleika ella stovni.

**Til § 10**

Sambært galdandi § 9, stk. 1 kann verða loyvd ættleiðing, hóast samtykki til ættleiðingina verður tikið aftur – hetta um afturtøkan av samtykkinum ikki er rímilig í mun til at verja atlitið til barnið. Harafturat er tað sambært galdandi § 9, stk. 2 soleiðis, at ættleiðing kann verða framd uttan samtykki í teimum førum, tá atlitið til tørvin hjá barninum krevur tað.

Nevndu ásetingar hava ymisk heiti fyri barnsins besta, ið í dag er tað hugtakið, ið verður nýtt, tá atlitið til barnið verður lýst í familjurættarligari lóggávu. Mælt verður til, at ásetingarnar verða orðaðar í samsvar við hetta.

Broytta orðingin í § 9, stk. 1 og 2 í galdandi ættleiðingarlóg, sum við hesum uppskotinum verða til *§ 10, stk. 1 og 2* ger, at máliskan verður dagført og nýtt verður hugtakið, hvat er best fyri barnið.

Ásetingarnar eru annars bert umsettar til føroyskt, og tískil er innihaldið ikki broytt í mun til galdandi ásetingar í ávíkavist § 9, stk. 1 og 2, sum við lógaruppskotinum verða til *§ 10, stk. 1 og 2.*

Víst verður til serligu viðmerkingarnar til *§ 2* í lógaruppskotinum.

Víst verður til almennu viðmerkingarnar í nr. 1.4.5.

**Til § 11**

*§ 11* í lógaruppskotinum er bert umsett til føroyskt og tískil óbroytt í mun til galdandi § 10 í galdandi lóg og snýr seg um, at Familjufyrisitingin sambært áheitan frá Høvuðsbarnaverndarnevndini kann loyva, at eitt barn, sum er umsorganaryvirtikið, seinni verður burturættleitt, hóast samtykki sambært *§ 8* í lógaruppskotinum (svarar til § 7 í galdandi lóg) ikki verður fingið til vega. Loyvi kann tó bert latast sambært treytunum í *§ 10, stk. 2* (svarar til § 9, stk. 2 í galdandi lóg).

Víst verður til serligu viðmerkingarnar til *§ 10* í lógaruppskotinum

**Til § 12**

Tilmælda ásetingin snýr seg um møguleikan at royna í avgerðir hjá Familjufyrisitingini um ættleiðing uttan samtykki í rættinum – tilmælda ásetingin er nærum eins við galdandi § 11 í ættleiðingarlógini. Við uppskotinum verður tó forðað fyri møguleikanum at klaga um avgerðir til Kærunevndina í almanna,- familju,- og heilsumálum.

Galdandi § 11, stk. 1 verður tilmæld at verða deild í trý sjálvstøðug stykki fyri hervið at skapa eitt betri yvirlit yvir innihaldið í ásetingini.

*§ 12, stk. 1* lýsir, hvør skal kunnast um avgerðina hjá Familjufyrisitingini. Persónskarin, ið skal kunnast um avgerð um ættleiðing uttan samtykki, verða víðkaðir til eisini at umfata barnið og

foreldramyndugleikaánaran, um viðkomandi er annar enn foreldrini. Hetta fyri at tryggja, at foreldrini verða kunnaði, hóast tey ikki hava foreldramyndugleikan.

*§ 12, stk. 2* inniheldur ásetingar um, hvussu kunningin sambært stk. 1 skal fremjast. Ásetingin svarar til galdandi § 11, stk. 1, 3. og 6. pkt.

*§ 12, stk. 3* staðfestir tíðarfreistir fyri møguleikanum at fáa málið roynt í rættinum. Freistirnar svara til tær, ið eru galdandi í § 11, stk. 1, 4. pkt.

*§ 12, stk. 4 og 5* svara til galdandi § 11, stk. 4 og 5 við teimum broytingum, ið eru avleiddar av, at skotið verður upp, at møguleikin at klaga til Kærunevndina í almanna,- familju,- og heilsumálum verður strikaður.

*§ 12, stk. 5* inniheldur samstundis eina nágreining av, nær avgerðirnar hjá rættinum kunnu ávíkavist kærast og klagast.

**Til § 13**

Skotið verður upp, at 2. pkt., verður broytt soleiðis, at "nævnet for børneforsorg" verður broytt til Høvuðsbarnaverndarnevndin. Annars er *§ 13* í lógaruppskotinum bert umsett til føroyskt og tískil óbroytt í mun til higartil galdandi áseting í § 12.

Ásetingin snýr seg um, at foreldramyndugleikaánari ikki kann taka barn úr heiminum hjá umsøkjara um ættleiðing, meðan mál um ættleiðing verður viðgjørt, um barnið býr hjá tí, ið søkir um ættleiðing, og Familjufyrisitingin hevur avgjørt at síggja burtur frá, at samtykki til ættleiðing ikki er fingið til vega frá foreldrinum - ella um Høvuðsbarnaverndarnevndin hevur givið samtykki til ættleiðingina sambært *§ 10, stk. 2, 2. pkt*. í lógaruppskotinum (svarandi til § 9, stk. 2, 2. pkt í galdandi lóg), ella um umbøn er sett fram sambært *§ 11* í lógaruppskotinum (svarandi til § 10 í galdandi lóg).

Víst verður til serligu viðmerkingarnar til *§§ 10 og 11* í lógaruppskotinum

**Til § 14**

*§ 14* í lógaruppskotinum er bert umsett til føroyskt og tískil óbroytt í mun til § 13 í galdandi lóg.

Sambært ásetingini krevst frá foreldrum, ið ikki hava lut í foreldramyndugleikanum, ein váttan um ættleiðingina. Endamálið við váttanini er at geva viðkomandi foreldri høvi at úttala seg um ættleiðingina. Sæð kann bert verða burtur frá at innheinta váttan, um innheintanin verður mett at skaða barnið ella viðføra eina órímiliga seinkan av málinum.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar til *§ 8* í lógaruppskotinum

**Til § 15**

*§ 15* í lógaruppskotinum er bert umsett til føroyskt og tískil óbroytt í mun til § 14 í galdandi lóg.

Sambært ásetingini kann tann ikki ættleiðast, sum er undir verjumáli sambært § 5 í verjumálslógini ella er undir verjumáli við frátøku av tí rættarliga virkisførinum sambært § 6 í verjumálslógini, uttan so er, at váttan er fingin til vega frá verjanum.

**Til § 16**

*§ 16* í lógaruppskotinum er bert umsett til føroyskt og tískil óbroytt í mun til § 15 í galdandi lóg.

Ásetingin staðfestir, at tilsøgn um ættleiðing ikki kann latast, um onkur, ið skal geva samtykki til ættleiðingina, veitir ella fær gjald ella annað slag av mótveiting, íroknað gjald fyri mista arbeiðsinntøku.

Allir persónar, ið skulu lata samtykki o.a. til ættleiðing, eru fevndir av forboðinum í ásetingini um at veita ella móttaka gjald ella annað slag av mótveiting í samband við ættleiðing. Familjufyrisitingin skal royna at fáa upplýst undir samrøðunum, um gjald er veitt ella móttikið, ella talan er um aðra mótveiting. Tilsøgn um ættleiðing verður noktað, um gjald er veitt, óansæð um gjaldið hevur ávirkað fatanina hjá viðkomandi til ættleiðingina ella ei.

Í teimum førum, tá samtykki skal latast sambært *§ 8* í lógaruppskotinum, vil endurgjald fyri sámiligar ferðaútreiðslur til eitt foreldur, ið býr uttanlanda og skal lata samtykki frammanfyri einum føroyskum umboði ella myndugleika, í útgangsstøðinum verða umfatað av forboðnum í galdandi § 15, ið við hesum lógaruppskoti verður til *§ 16*.

Verður gjald veitt ættleiðingarforeldri, kann ættleiðingarloyvið gerast treytað av, at gjaldið heilt ella lutvíst verður nýtt til barnsins besta.

**Til § 17**

*§ 17, stk. 1* í lógaruppskotinum er bert umsett til føroyskt og tískil óbroytt í mun til higartil galdandi áseting í § 16, stk. 1 í galdandi lóg. Ásetingin staðfestir rættarvirknaðin av einari ættleiðing, t.e., at við einari ættleiðing íkoma somu rættarviðurskifti millum ættleiðara og ættleitt barn, sum millum foreldur og teirra egna barn.

Broytingin í § 16, stk. 2, ið við lógaruppskotinum verður til *§ 17, stk.2* er ein fylgja av tilmældu broyting í *§ 5*, har møguleiki verður givin samlivandi at ættleiða, og staðfestir rættarstøðuna hjá børnum hjá samlivandi í samband við ættleiðing.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar til *§ 5* í lógaruppskotinum.

Eisini verður víst til almennu viðmerkingarnar í nr. 1.4.4.

**Til § 18**

*§ 18, stk. 1, 3, 4* og *5* í lógaruppskotinum eru bert umsett til føroyskt og sostatt óbroytt í mun til higartil galdandi ásetingar í § 18, stk. 1, 3, 4 og 5 í galdandi lóg. Ásetingin snýr seg um úrgildissetan av ættleiðing.

Sambært galdandi § 18, stk. 1, kann ættleiðingarsambandið verða sett úr gildi av Kærunevndini í almanna,- familju,- og heilsumálum, um ættleiddi og ættleiðararnir eru samd um hetta.

Sambært ættleiðingarlógini § 18, stk. 2, kann eitt ættleiðingarsamband verða sett úr gildi eftir stk. 1, um barnið er undir 18 ár og um ættleiðararnir  og upprunaforeldrini hjá ættleidda eru samd um hetta – og mett verður, at tað er best fyri barnið.

Sambært ættleiðingarlógini § 18, stk. 2, er úrgildissetan av ættleiðing treytað av, at samtykki er fingið til vega frá barninum, um barnið er fylt 12 ár. Samtykki skal latast í samband við persónliga uppmøting á Familjufyrisitingini ella fyri øðrum myndugleika ella stovni, ið eru góðkendir til hetta. Innan barnið  gevur sítt samtykki, skal ein samrøða vera við barnið um úrgildissetanina av ættleiðingini eins og barnið skal kunnast um týdningin av úrgildissetanini av ættleiðingini. Undir samrøðuni skal Familjufyrisitingin ella annar myndugleiki ella stovnur, ið eru góðkendir sambært *§ 9, stk. 1* í lógaruppskotinum tryggja sær, at barnið skilir rættarvirknaðin av einari úrgildissetan. Samrøðan skal nýtast at meta, um ættleiðingin er tað besta fyri barnið.

§ 18, stk. 4 í galdandi lóg, fevnir um børn yngri enn 12 ár og ásetir, at upplýsingar um sjónarmiðið hjá børnum undir 12 ár um ta ætlaðu úrgildissetanina av ættleiðingini skulu skjalfestast í tann mun, búnaðarstøðið hjá barninum og umstøðurnar í málinum tala fyri tí. Tá avgerð verður tikin, skulu atlit takast til sjónarmiðini hjá barninum í mun til ta ætlaðu úrgildissetanina í størst møguligan mun.

Hoyringsreglan er ikki treytaleys. Familjufyrisitingin skal altíð ítøkiliga meta um búnaðarstøðið hjá tí einkulta barninum og ikki bert nýta aldurin hjá barninum, at meta um hetta. Upplýsingar um búnaðarstøðið hjá barninum verða m.a. fingnir til vega frá foreldrunum og evt. dagstovninum ella skúlanum hjá barninum.

Um eitt ella fleiri av teimum formligu krøvunum fyri úrgildissetan av ættleiðing ikki eru lokin, ella metir Familjufyrisitingin, at úrgildissetanin av ættleiðingini grundað á tøkar upplýsingar, ikki verður mett at vera best fyri barnið, skal barnið ikki hoyrast.

Sí annars viðmerkingarnar til *§ 7* í lógaruppskotinum um hoyring av børnum undir 12 ár.

Sambært § 18, stk. 5 í galdandi lóg, kann ein ættleiðing verða ógildað av Kærunevndini í almanna-, familju-, og heilsumálum, um upprunaforeldrini hjá barninum søkja um hetta, og ættleiðararnir eru deyðir – hetta um tað verður mett at vera best fyri barnið.

Orðingin í § 18, stk. 2, ið við lógaruppskotinum framvegis er *§ 18, stk. 2*, verður við lógaruppskotinum broytt soleiðis, at ”biologisk” verður broytt til ”upprunaligu”. Annars svarar ásetingin til higartil galdandi áseting í § 18, stk. 2 og er sostatt bert umsett til føroyskt.

Ættleiðingarlógin nýtir hugtøkini “biologisk foreldur” og “oprindelige forældre” hjá ættleidda um upprunaligu rættarligu foreldur barnsins.

Mælt verður til, at frøðimálið (terminologiin) í ættleiðingarlógini verður broytt og verður meira støðugt, soleiðis at hugtakið, ið framyvir verður nýtt, er upprunaforeldur. Broytingin er bert av málsligum týdningi og broytir ikki galdandi rættarstøðu. “Biologisk foreldur” tørvar ikki at innibera rættarligan skyldskap – tískil er hugtakið óheppið. Avgerandi er rættarligur faðir- og mskapur.

Víst verður til almennu viðmerkingarnar, nr. 1.4.5.

**Til § 19**

*§ 19* í lógaruppskotinum eru bert umsett til føroyskt og sostatt óbroytt í mun til higartil galdandi áseting í § 19 í galdandi lóg. Ásetingin snýr seg um ógildan av ættleiðing við dómi til frama fyri ættleidda barnið í førum, har ættleiðari hevur framt grovt misbrot mótvegis barninum ella í avgerandi mun hevur misrøkt skyldur, ið eru álagdar ættleiðara við ættleiðingini, ella um ógildan verður mett at vera av stórum týdningi fyri tað ættleidda barnið.

Tað er barnið, ið hevur sakarmálsførleikan. Tó er tað verjin hjá barninum, upprunapápin ella upprunamamman hjá barninum ella landsstýrismaðurin ella tann, sum hann heimilar til tess, ið leggur málið fyri rættin, um barnið er ómyndigt ella ikki er ført fyri at virka skynsamt orsakað av sinnissjúku, evnaveikleika ella líknandi standi.

**Til § 20**

*§ 20, stk. 1* í lógaruppskotinum er umsett til føroyskt og er nærum óbroytt í mun til higartil galdandi áseting í § 20, stk. 1 í galdandi lóg. Ásetingin staðfestir, at tað er bert møguligt at ógilda eina ættleiðing fyri báðir hjúnafelagarnar, um teir saman hava ættleitt barnið.

Broytingin í *stk. 1* er ein víðkan av galdandi áseting, ið bert fevnir um hjún, til eisini at fevna um samlivandi. Broytingin er avleidd av ásetingini í tilmælda *§ 5*, har samlivandi verða loyvd at ættleiða og staðfestir sostatt, at um samlivandi hava felags ættleitt barn, so kann ættleiðingin bert verða ógildað fyri bæði.

Víst verður til *§ 5* í lógaruppskotinum.

Víst verður til almennu viðmerkingarnar nr. 1.4.4.

*§ 20, stk. 2* í lógaruppskotinum er bert umsett til føroyskt og er óbroytt í mun til higartil galdandi áseting í § 20, stk. 2 í galdandi lóg. Ásetingin staðfestir, at í mun til ógildan kann ógildan fremjast, sjálvt um tað bert er tann eini ættleiðarin, ið hevur framt grovt misbrot mótvegis barninum ella í avgerandi mun hevur misrøkt skyldur, ið eru álagdar ættleiðara við ættleiðingini, ella um ógildan verður mett at vera av stórum týdningi fyri tað ættleidda barnið sbrt. *§ 19, stk. 1* í lógaruppskotinum.

**Til § 21**

*§ 21* í lógaruppskotinum er bert umsett til føroyskt og er nærum óbroytt í mun til higartil galdandi áseting í § 21 í galdandi lóg. Ásetingin staðfestir, hvør hevur heimild at ávísa varnarting í mun til mál í rættinum um ógildan av ættleiðing í førum, har tað ikki er møguligt at ávísa varnarting sambært galdandi rættargangslóg. Tað er ráðharrin fyri familie- og forbrugeranliggender, ið hevur heimild at ávísa varnarting í galdandi § 21.

Einasta innihaldsliga broyting í ásetingini er, at “ministeren for famile- og forbrugeranliggender” verður broytt til “tann danski løgmálaráðharrin”.

Rættargangur, íroknað dómstólarnir, er felags málsøki. Ásetingin snýr seg um heimildir í mun til dómstólin, sum ikki er eitt yvirtikið føroyskt málsøki. Av hesari orsøk verður tað eisini eftir yvirtøkuna av ættleiðingarlóggávuni ikki landsstýrismaðurin, men danski løgmálaráðharrin, ið hevur heimildina til at ávísa varnarting.

Viðmerkjast skal, at ásetingin hevur sera lítlan praktiskan týdning av tí orsøk, at nærum ongi mál viðvíkjandi ógildan av ættleiðing verða løgd fyri rættin.

**Til § 22**

*§ 22* í lógaruppskotinum er umsett til føroyskt og er óbroytt í mun til higartil galdandi áseting í § 22 í galdandi lóg. Ásetingin snýr seg um rættarvirknaðin av nýggjari ættleiðing og staðfestir, at ein ættleiðing av einum barni sjálvvirkandi verður sett úr gildi, um ein nýggj ættleiðing av sama barni verður framd. Tó ikki í mun til stjúkbarnaættleiðingar sambært *§ 17, stk. 2* í lógaruppskotinum,

**Til § 23**

*§ 23* í lógaruppskotinum er umsett til føroyskt og er nærum óbroytt í mun til higartil galdandi § 23 og víðvíkir rættarvirknaðin av ógildan av ættleiðing – tó er ein broyting, tí nýtt *stk. 4* er sett í ásetingina soleiðis, at stk. 4 í higartil galdandi áseting verður til *stk. 5*.

Møguligt verður við nýggja *stk. 4* umsitingarliga og gjøgnum rættin at endurstovna rættarviðurskiftini til upprunaættina eftir, at barnið er vorðið 18 ár, hóast foreldrini ikki eru deyð.

Mælt verður til, at avgerðin um endurstovnan av rættarviðurskiftinum kann verða tikin, um ættleiðingarsambandið er vorðið ógildað fyri ein persón, ið er vorðin 18 ár, hóast ættleiðararnir ikki eru deyðir. Harafturat verður mælt til, at avgerðin um endurstovnan av rættarviðurskiftinum kann verða tikin sjálvstøðugt aftaná eina avgerð um ógildan av ættleiðing. Sostatt er tað ikki ein treyt, at avgerðin verður tikin í samband við avgerð um ógildan av ættleiðingarsambandi. Harvið verður tað gjørligt hjá fyrrverandi ættleiddum barni, ið eftir ógildaða ættleiðing fær samband við upprunaligu familjuna, at endurstovna rættarviðurskiftið við upprunaættina.

Sambært tilmæltu ásetingina vil endurstovnan av rættarviðurskiftinum í nevndu førum kunna fremjast uttan mun til, hví ættleiðingin er vorðin ógildað. Tað er tískil nágreinað, at avgerðin um endurstovnan av rættarviðurskiftinum eftir hesari ásetingini kann verða framd bæði av umsitingini og av rættinum.

Kravið um samtykki frá upprunaforeldunum merkir, at rættarviðurskiftini til annað av foreldrunum og tess ætt ikki kann verða endurstovnað, um viðkomandi foreldur er deytt.

Ásetingin gevur møguleika fyri endurstovnan av rættarviðurskiftinum til upprunaforeldrini.

Í tí sjáldsomu støðu, tá eitt barn er vorðið ættleitt fleiri ferðir, loyvir ásetingin ikki at rættarviðurskiftini verður endurstovnað við fyrrverandi ættleiðingarfamiljur. Hetta samsvarar við rættarvirknaðin í § 23, stk. 2-4 í galdandi ættleiðingarlóg viðvíkjandi upprunaætt.

Víst verður til almennu viðmerkingarnar nr. 1.4.8.

**Til § 24**

*§ 24* í lógaruppskotinum er bert umsett til føroyskt og er sostatt óbroytt í mun til higartil galdandi § 24 og víðvíkir innheintan av samtykki og váttanum, tá ið mál sambært *§ 19* í lógaruppskotinum um ógildan eru løgd fyri rættin.

**Til § 25**

Tilmælt verður, at galdandi § 25 verður deild upp í sjálvstøðug nummur, fyri harvið at veita eitt betur yvirlit yvir innihaldið í ásetingini.

*§ 25, nr. 1-4* í uppskotinum er sostatt bert umsett til føroyskt og svarar sostatt til higartil galdandi § 25. Ásetingin heimilar landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um viðgerðina av ættleiðingarmálum.

Harumframt verður mælt verður til, at eitt nýtt *nr. 5* verður sett inn í lógina um, at landsstýrismaðurin kann áseta reglur um viðgerð av málum, um ein ættleiðingargongd kann halda fram – tvs. fyri viðgerðini av einum greipingaruppskoti. Henda heimildaráseting vil m.a. verða nýtt til innan karmarnar á persónsupplýsingarlógini at áseta krav um, hvørjar upplýsingar sentralmyndugleikin og Familjufyrisitingin skulu móttaka frá einum ættleiðingarmiðlandi felagsskapi fyri at taka støðu til uppskotið. Eins og krøv um leiklutin hjá Familjufyrisitingini og tíðarkarm fyri viðgerðina í hesum málum, har atlitið til barnið krevur, at støða verður tikin skjótast gjørligt til greipingaruppskotið. Í útgangsstøðinum skal viðgerðartíðin vara í mesta lagi eina viku.

**Til § 26**

*§ 26* í lógaruppskotinum er bert umsett til føroyskt og er sostatt óbroytt í mun til higartil galdandi § 25 a í galdandi ættleiðingarlóg. Ásetingin snýr seg í høvuðsheitunum um ættleiðingarsamráðið. Landsstýrismaðurin skal sambært stk. 1 stovna eitt sokallað ættleiðingarsamráð, ið verður tilnevnt av landsstýrismanninum í upp til 4 ár í senn sbrt. stk. 4. Samráðið er sett saman av trimum limum, ið skulu lúka serlig førleikakrøv – talan skal vera um ávíkavist ein løgfrøðing, ein lækna og persón við sosialari útbúgving. Sosiala útbúgvingin, ið krevst, kann eitt nú vera sálarfrøðingur ella sosialráðgevi.

Uppgávan hjá samráðnum er at lata Familjufyrisitingini tilmæli, sum Familjufyrisitingin skal nýta at avgera, um ein umsøkjari kann góðkennast sum ættleiðari sambært galdandi § 4 a, stk. 1, ið við hesum lógaruppskoti verður til *§ 4, stk. 1.* Eisini skal samráðið lata Familjufyrisitingini tilmæli, sum Familjufyrisitingin skal nýta til at avgera, um ein góðkenning, ið longu er latin, skal verða tikin aftur sbrt. stk. 2.

Gjøgnum ættleiðingarsamráðið hevur Familjufyrisitingin neyðuga fakliga førleikan at meta um góðkenningarmálini, íroknað tá avgerð skal takast um, um ein góðkenning skal detta burtur ella ikki.

**Til § 27**

Ásetingin er nýggj, og sambært uppskotinum til *§ 27, stk. 1* er luttøka í einum ættleiðingarfyrireikandi skeiði ein treyt fyri, at persónar, ið áður ikki hava ættleitt eitt barn frá einum øðrum landi, kunnu verða góðkend at ættleiða eitt tílíkt barn.

Skeiðið skal liggja beint eftir, at Familjufyrisitingin hevur mett, at umsøkjarin lýkir tær yvirskipaðu og objektivu treytirnar í kanningar- og góðkenningartilgongdini, men innan farið verður víðari við at meta um persónliga og kensluliga tilfeingið hjá umsøkjarunum í mun til at veita umsorgan mótvegis einum ættleiddum barni. Tvs., um umsøkjarin hevur eginleikarnar at ættleiða eitt barn, sí almennu viðmerkingarnar nr. 1.4.3.

Sambært *§ 27, stk. 2* í uppskotinum kann Familjufyrisitingin sambært reglum ásettum av landsstýrismanninum avgera, at persónar, ið áður hava ættleitt eitt barn frá einum øðrum landi, eisini skulu luttaka í einum ættleiðingarfyrireikandi skeiði fyri at verða góðkendir av nýggjum til at ættleiða eitt tílíkt barn aftur – um tørvur er á tí. Hesin tørvurin kann vera til staðar í samband við t.d. innliman hjá eldri ættleiddum barni í familju við øðrum børnum.

Avgerðin hjá Familjufyrisitingini í einstøku málunum um, at tað er tørvur á, at ein persónur skal á skeið, og hvat skeið talan skal vera um, kann verða kærd til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum sambært vanligu kæruregluni í *§ 41* í uppskotinum.

Skeiðini fyri umsøkjarar, ið áður hava ættleitt, vilja vanliga verða styttri enn skeiðini hjá teimum, ið ættleiða fyri fyrstu ferð.

Mett verður, at einstøku umsøkjararnir skulu kunna gjøgnumføra skeiðið innan ein mánaða eftir, at Familjufyrisitingin hevur váttað, at umsøkjararnir sum heild lúka yvirskipaðu og objektivu treytirnar fyri at verða góðkendir sum ættleiðarar.

Víst verður annars til almennu viðmerkingarnar í nr. 1.4.3 í lógaruppskotinum.

**Til § 28**

Ásetingin er nýggj og sambært uppskotinum til *§ 28* verður tað framyvir eitt krav at móttaka ættleiðingarráðgeving beint innan og aftaná, at barnið, ið skal ættleiðast, hevur fingið uppihald hjá ættleiðarunum í Føroyum. Eisini kann ein ættleiðari biðja um meira ættleiðingarráðgeving.

Einki tilboð er um ættleiðingarráðgeving til ættleiðingarfamilju í galdandi ættleiðingarlóggávu. Ei heldur er nakað krav um, at ættleiðingarfamiljur skulu móttaka ættleiðingarráðgeving og stuðul í samband við ættleiðing í galdandi ættleiðingarlóg.

Í nýggju ásetingini verður tað landsstýrismaðurin, ið ásetur nærri reglur fyri ráðgevingina.

Við *stk. 1* í nýggju ásetingini verður tað framyvir krav at móttaka ættleiðingarráðgeving beint innan og aftaná, at barnið, ið skal ættleiðast, hevur fingið uppihald hjá ættleiðarunum í Føroyum. Ráðgevingin er stílað móti fremmandaættleiðing – bæði innanlanda og altjóða ættleiðing – og verður kravt, at ættleiðarar taka móti ráðgevingini. Talan er um ættleiðingar, har ættleiðarin er vorðin góðkendur at ættleiða, sí § 4 a, stk. 1 í galdandi ættleiðingarlóg, ið við lógaruppskotinum verður til *§ 4, stk. 1*. Familju- og stjúkbarnaættleiðingar eru sostatt ikki fevndar av ásetingini – tvs. ættleiðingar har góðkenning sum ættleiðari ikki verður kravd, eitt nú í samband við ættleiðing av barni hjá hjúnafelaga ella hjá samlivara, ella sambært reglum ásettum av landsstýrismanninum í førum, har tað er tættur skyldskapur ella annað serligt tilknýti ímillum ættleiðara og tað ættleidda barnið ella foreldrini hjá tí sbrt. § 4 a, stk. 2 í galdandi ættleiðingarlóg, ið við hesum lógaruppskoti verður til *§ 4, stk. 2*.

Sambært tilmældu áseting verður ráðgeving beint innan heimtøkuna latin við støði í, at ættleiðararnir vita, hvat barn tey skulu ættleiða. Kravda ráðgevingin fer at gera, at vitanin hjá ættleiðarunum frá ætlaða ættleiðingarfyrireikandi skeiðinum verður uppfrískað, sí *§ 27* í lógaruppskotinum.

Kravda ráðgevingin eftir, at barnið er heimtikið, gevur ættleiðarunum høvi at fáa ráðgeving og stuðul í mun til spurningar og avbjóðingar í samband við ættleiðingina.

Ráðgevingin vil í útgangsstøðinum verða latin í heiminum hjá ættleiðaranum – ið er serliga týðandi beint eftir, at barnið er komið í heimið.

Í serligum førum kann tó verða neyðugt, at ráðgevingin verður latin t.d. umvegis telefon, um t.d. ættleiðingarfamiljan má vera í upprunalandinum hjá barninum í eitt tíðarskeið, áðrenn ættleiðingin kann fremjast. Tað vilja eisini verða aðrar støður, ið gera, at ráðgevingin ikki kann latast í heiminum.

Í mun til innanlanda fremmadaættleiðingar kann støðan gerast, at tíð verður ikki til kravda ráðgeving, innan barnið verður latið ættleiðarunum, fyri at verja atlitið til barnið – tískil má undantak latast, og bert ráðgevingin, eftir at barnið er vorðið latið ættleiðarunum, verður kravd.

*Stk. 2* í uppskotinum inniber, at ein ættleiðari kann biðja um meira ættleiðingarráðgeving. Hetta tilboðið er eisini stílað móti familjum, ið hava framt fremmandaættleiðing. Familjuættleiðing og stjúkbarnaættleiðing er tískil ikki umfatað av *stk. 2*.

Ásetingin loyvir tilboði um vanliga ættleiðingarráðgeving, har bjóðað kunnu verða tvey ráðgevingartilboð. Eina tilboðið kann verða veitt til ættleidda barnið verður 18 ár, meðan hitt tilboðið kann veitast í 5 ár eftir, at barnið er vorðið heimtikið og hevur fyribyrgjandi endamál. Nevnda ráðgevingin er sjálvboðin at taka ímóti.

Sambært *stk. 3, nr. 1*, kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um, hvussu ráðgevingin eftir *stk. 1 og 2* skal leggjast til rættis. Hendan heimildarásetingin vil m.a. verða brúkt til at staðfesta møguleikan til ráðgeving, til barnið fyllir 18 ár, til møguleikan at partur av ráðgevingini kann verða stílað móti ættleidda og til at fremja opinleika um ættleiðing í ráðgevingini.

Sambært *stk. 3, nr. 2* kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um, í hvørjum førum ein ættleiðari ikki skal móttaka ráðgeving eftir tilmældu nýggju ásetingini í *stk. 1, 2. pkt* í lógini. Hendan heimildarásetingin vil m.a. verða brúkt til at gera tað møguligt at víkja frá kravinum um ráðgeving eftir *stk. 1* við innanlanda fremmandaættleiðing, um tað ikki er møguligt at fremja ráðgevingina orsakað av vantandi tíð og atlitinum til barnið.

Víst verður annars til almennu viðmerkingarnar í nr. 1.4.3 í lógaruppskotinum.

**Til § 29**

Ásetingin er nýggj og sambært uppskotinum til *§ 29* kunnu føroyskir og danskir myndugleikar gera eina avtalu um viðurskiftini millum reglarnar í Føroyum og Danmark um ættleiðing.

Semja er millum Heilsu- og innlendismálaráðið og Børne- og Socialministeriet um, at galdandi skipan fyri viðgerð av málum um fremmandaættleiðing skal varðveitast eftir yvirtøkuna av ættleiðingarlóggávuni.

Endamálið við uppskotinum til tilmældu nýggju ásetingina í *§ 29, 1. pkt.* er, at heimila landsstýrismanninum at gera avtalu við myndugleikarnar í Danmark um viðurskiftini millum reglarnar fyri ættleiðing í ávíkavist Føroyum og Danmark.

Myndugleikarnir í Danmark eru sambært galdandi rætti uppí viðgerðini av málum um fremmandaættleiðing, hóast umsøkjarin er búsettur í Føroyum.

Tað snýr seg m.a. um greiping av børnum, ið eru vorðin leysgivin til innanlanda fremmandaættleiðing, har Adoptionsnævnet sambært § 27, stk. 1 í kunngerðini um forretningsordenen (starvsskipanina) hjá Adoptionsnævnet, velur tann av góðkendu umsøkjarunum, ið verður mettur at vera best skikkaður at ættleiða barnið.

Í mun til § 25 b í galdandi ættleiðingarlóg hevur Adoptionsnævnet eisini eftirlit við viðgerðini hjá Ríkisumboðsmanninum og samráðnum av góðkenningarmálum. Viðkomandi áseting verður strikað í samband við hetta lógaruppskotið, sí almennu viðmerkingarnar nr. 1.4.2.3.

Sambært forretningsordenen (starvsskipanini) hjá Adoptionsnævnet hevur tað eftirlit við ættleiðingarsamráðunum, sí §§ 22-24. Harumframt kann Ankestyrelsen biðja Adoptionsnævnet um at lata ummæli um yvirskipaði ella ítøkilig viðurskifti av týdningi fyri eftirlitinum hjá Ankestyrelsen av ættleiðingarmiðlandi felagsskapum, sí § 25 í Adoptionsnævnets forretningsorden.

Danish International Adoption (DIA), ið hevur heimating í Danmark, hevur loyvi frá 1. januar 2016 at veita ættleiðingarhjálp viðvíkjandi børnum, ið ikki hava bústað í Danmark. Sambært galdandi donsku ættleiðingarlóg § 30 d, stk. 2 er tað Børne- og Socialministeren, ið avger, hvørjum londum ein ættleiðingarmiðlandi felagsskapur kann loyvast at veita ættleiðing frá. Ankestyrelsen avger sambært stk. 2 í ásetingini, hvørjum útlendskum myndugleikum, stovnum v.m. ein ættleiðingarmiðlandi felagsskapur kann verða loyvdur at samstarva við um ættleiðingarhjálp.

Sambært § 81 í galdandi donsku ættleiðingarkunngerð er Ankestyrelsen útnevnd at vera sentralmyndugleiki fyri Danmark sambært Haagersáttmálanum um ættleiðing. Ankestyrelsen virkar eisini um sentralmyndugleiki fyri Føroyar, sí § 34, stk. 2 í góðkenningarkunngerðini.

Samstarvsavtalan skal áseta karmarnar fyri samstarvinum millum føroyskar og danskar myndugleikar um fremmandaættleiðing aftaná føroysku yvirtøkuna av ættleiðingarøkinum.

Gjørligt verður tá at varðveita verandi skipan viðvíkjandi viðgerð av málum um fremmandaættleiðing aftaná, at Føroyar hava yvirtikið ættleiðingarlóggávuna.

Avtalan vil staðfesta heimildina hjá myndugleikum og ættleiðingarmiðlandi felagsskapum, tá eitt ættleiðingarmál hevur tilknýti til fleiri landslutir/ríkispartar.

Í mun til altjóða fremmandaættleiðing vil samstarvið merkja, at ein ættleiðingarmiðlandi felagsskapur miðlar børn frá útlandinum til allar landspartar, og at eftirlitið við felagsskapinum framhaldandi verður útinnt av donskum myndugleikum í samsvari við galdandi ættleiðingarlóg í Danmark og samstarvsavtaluna. Danskir myndugleikar kunnu íblandast mál í Føroyum um góðkenning sum ættleiðari og greiping av børnum til innanlanda fremmandaættleiðing.

Sambært samstarvsavtaluni vilja danskir myndugleikar sambært verandi donsku ættleiðingarlóg § 30 d, stk. 1 avgera, hvørjum londum børn kunnu verða ættleidd frá til Føroyar og Danmark. Samstundis kunnu danskir myndugleikar steðga allari ættleiðing frá ávísum londum.

Sambært samstarvsavtaluni skulu danskir myndugleikar framhaldandi góðkenna samstarvsfelagar hjá ættleiðingarmiðlandi felagsskapunum í øðrum londum sambært galdandi donsku ættleiðingarlóg § 30 d, stk. 2.

Ein samstarvsavtala vil eisini tørva reglur um uppsøgn av avtaluni við einari ávísari freist, t.d. um samsvarið millum lógarverkið landanna millum fellur burtur í mun til góðkenning av ættleiðarum, leysgeving av børnum til ættleiðing og greiping av børnum og ættleiðarum.

Avtalað er við myndugleikarnar í Danmark, at Børne- og Socialministeriet leggur uppskot fram til fólkatingslóg, ið fær virknað frá yvirtøkudegnum, har heimild fæst fyri samstarvsavtalu við føroyskar myndugleikar. Lógaruppskotið, nr. 11, FT 2017/2018 um forslag til lov om ændring af adoptionsloven (Bemyndigelse til at indgå aftale med Færøerne om danske og færøske regler om adoption) varð lagt fyri Fólkatingið 4. oktober 2017.

Ásetingin vil geva heimild til at samstarvsavtala kann gerast millum Føroyar og Danmark um fremmandaættleiðing soleiðis, at verandi rættarstøða í Føroyum kann verða varðveitt eftir yvirtøkuna av málsøkinum, og nýggjar marknaforðingar ikki íkoma.

Samstarvsavtalan vil í høvuðsheitum fevna um omanfyrinevndu viðurskifti.

Samstarvsavtalan vil fáa gildi frá 29. juli 2018, tá yvirtøkan verður framd.

Sambært *§ 25, nr. 2* í lógaruppskotinum, kann landsstýrismaðurin áseta reglur um viðgerð av ættleiðingarmálum. Við heimild í hesari áseting vil verða høvi at áseta reglur um viðgerðina hjá føroyskum myndugleikum av málum, ið eru umfatað av avtaluni.

Sambært *2. pkt* í tilmældu áseting verður samstarvsavtala sambært *1. pkt* í ásetingini galdandi í Føroyum eftir kunnger í Kunngerðarblaðnum.

Víst verður annars til almennu viðmerkingarnar til lógaruppskotið, nr. 1.4.2.

**Til § 30**

*§ 30* í lógaruppskotinum er bert umsett til føroyskt og er sostatt óbroytt í mun til higartil galdandi § 26 í galdandi ættleiðingarlóg og snýr seg um týdningin av ríkisborgararætti í mun til ættleiðing í Føroyum, góðkenning sum ættleiðari í Føroyum og ógildan av ættleiðing í Føroyum. Tó er "her i landet" broytt til "í Føroyum", sum ein avleiðing av, at Føroyar yvirtaka familjurættin 29. juli 2018.

**Til § 31**

*§ 31* í lógaruppskotinum er bert umsett til føroyskt og er sostatt óbroytt í mun til higartil galdandi § 27 í galdandi ættleiðingarlóg. Tó verður orðingin "ved kongelig anordning fastsættes" í *stk. 1* broytt til "avgjørt" sum ein avleiðing av, at Føroyar yvirtaka familjurættin 29. juli 2018.

**Til § 32**

*§ 32* í lógaruppskotinum er bert umsett til føroyskt og er sostatt óbroytt í mun til higartil galdandi áseting í § 27 a, stk. 1 í galdandi lóg. Í *stk. 1* verður "her i landet" tó broytt til "í Føroyum" og í *stk. 2* verður " her i landet" og "Danmark" tó broytt til ávíkavist "í Føroyum" og "Føroyar", sum ein avleiðing av, at Føroyar yvirtaka familjurættin 29. juli 2018. Ásetingin snýr seg um lógarval, t.e. hvørt lands lóggava skal nýtast í mun til herbúgvandi umsøkjarar og viðurkenning av útlendskum ættleiðingaravgerðum.

**Til § 33**

§ 27 b í galdandi ættleiðingarlóg, ið við lógaruppskotium verður til *§ 33* verður í *stk. 1* aftaná "hjúnafelagi" sett "samlivari". Broytingin er ein avleiðing av tilmældu broyting í *§ 5*, har møguleiki verður veittur samlivandi at ættleiða.

Víst verður annars til almennu viðmerkingarnar í nr. 1.4.4.

Ásetingin snýr seg um í hvørjum førum galdandi ættleiðingarlóggáva í Føroyum kann nýtast í mun til umsøkjarar, ið búgva í útlandinum.

Í *stk. 1* verður "dansk" broytt til "føroysk" orsakað av yvirtøkuni 29. juli 2018.

*Stk. 1* í lógaruppskotinum er annars bert umsett til føroyskt og er sostatt óbroytt í mun til higartil galdandi áseting í § 27 b, stk. 1 í galdandi lóg.

*Stk. 2 og 3* í lógaruppskotinum eru bert umsett til føroyskt og eru sostatt óbroytt í mun til higartil galdandi áseting í § 27 b, stk. 2 og 3 í galdandi lóg.

**Til § 34**

*§ 34* í lógaruppskotinum er bert umsett til føroyskt og er sostatt óbroytt í mun til higartil galdandi § 27 c í galdandi ættleiðingarlóg og snýr seg um tilnevnan av sentralmyndugleika í mun til Haagersáttmálan.

**Til § 35**

Ásetingin er nýggj, og sambært uppskotinum til *§ 35* kann ættleiðing í útgangsstøðuni bert fremjast gjøgnum ein ættleiðingarmiðlandi felagsskap. Talan er um eitt krav, ið longu er galdandi sambært § 29 í góðkenningarkunngerðini.

Sambært *stk. 2* kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur viðvíkjandi kravinum um miðling gjøgnum ein felagsskap og um møguleikan fyri fráviki frá hesum kravinum, um umsøkjarin hevur ein serligan kunnleika til barnið ella avvarðandi hjá barninum, ella aðrar serligar umstøður eru galdandi. Hesin møguleikin, at víkja frá kravinum at vera tilmeldaður miðlandi felagsskapi, framgongur í dag av § 30 í góðkenningarkunngerðini.

Samstundis verður endurtikið í ásetingini, at talan er um ættleiðing av børnum, ið ikki hava bústað í Føroyum.

**Til § 36**

*§ 36* í lógaruppskotinum er bert umsett til føroyskt og er sostatt óbroytt í mun til higartil galdandi § 27 e í galdandi ættleiðingarlóg og snýr seg um hvør, við ættleiðing sum endamáli, hevur rætt til at hjálpa við at knýta samband millum persónar, ið ynskja at ættleiða og eitt barn.

**Til § 37**

Ásetingin er nýggj og mælt verður til við *§ 37, stk. 1*, at góðkenning av einum greipingaruppskoti verður regulerað í sjálvari ættleiðingarlógini. Tá ið eitt fremmant barn verður leysgivið til altjóða ættleiðing, verður góðkendur ættleiðari á viðkomandi bíðilista útvaldur at ættleiða barnið – hetta kallast ”greiping”. Á donskum verður hetta kallað fyri “matchning”.

Sostatt verður greið heimild fingin til vega fyri, at heimildin til at góðkenna eitt greipingaruppskot, verður flutt frá Familjufyrisitingini og til sentralmyndugleikan, um barnið, ið er í uppskoti, er fevnt av góðkenningarkarminum hjá umsøkjara. Er barnið ikki fevnt av góðkenningarkarminum, ella er ivi um, um barnið er fevnt av góðkenningarkarminum soleiðis, at tað ikki er eyðsæð, at barnið er fevnt av góðkenningarkarminum, er tað Familjufyrisitingin, ið tekur støðu sambært tilmæli frá ættleiðingarsamráðnum sambært *§ 37, stk. 2* í lógaruppskotinum.

Galdandi ættleiðingarlóg inniheldur ikki ásetingar um góðkenningina av einum greipingaruppskoti.

Góðkenning av greipingaruppskoti er harafturímóti regulerað í góðkenningarkunngerðini.

Víst verður til almennu viðmerkingarnar í nr. 1.4.7.

Uppskotið inniber, at eisini í førum, har greipingin fyrst skal gerast í Danmark, og har tørvur er á nærri støðutakan til tørvin hjá barninum í mun til tilfeingið hjá umsøkjara, skal førleikin eins og í dag vera hjá Ríkisumboðsmanninum (eftir yvirtøkuna hjá Familjufyrisitingini) sambært tilmæli frá ættleiðingarsamráðum. Eisini skal tað framhaldandi vera Ríkisumboðsmaðurin (eftir yvirtøkuna Familjufyrisitingin) eftir tilmæli frá ættleiðingarsamráðnum, ið skal taka støðu til greipingina í teimum førum, tá søkt verður eftir foreldrum til børn, ið eru trupul at fáa ættleidd. Í teimum førum, tá barnið sambært meting hjá miðlandi felagsskapinum greitt er innanfyri góðkenningarkarmin hjá umsøkjara, ið stendur ovast á bíðilistanum, er tað sentralmyndugleikin, ið tekur støðu til, um ættleiðingargongdin kann halda fram. Støðan er tann sama, um felagsskapurin hevur greipað barnið við umsøkjara við aldursviðkomandi góðkenning, ið stendur ovast á bíðilistanum. Gerast skal vart við, at nevnda broyting fyri góðkenningarkarmin hjá ættleiðarum má væntast at merkja, at Ríkisumboðsmaðurin (eftir yvirtøkuna Familjufyrisitingin) framyvir í minni mun skulu meta um greipingaruppskot enn higartil. Víst verður til almennu viðmerkingarnar í nr. 1.4.7.1.2 og 1.4.7.2.2.

Tá meting verður framd av greipingaruppskotinum, skal serligur dentur leggjast á tøkar upplýsingar frá upprunalandinum, og á ummæli frá barnalækna hjá miðlandi felagsskapinum, ið er grundað á tøku upplýsingarnar. Mongdin, dygdin og hvussu gamlir upplýsingarnir eru, hevur stóran týdning fyri læknafakligu metingina hjá samráðnum. Støðutakan til, um umsøkjari kann fáa víðkaða góðkenning til eitt ítøkiligt barn, verður framd við meting av førleikum og tilfeingi hjá umsøkjara í mun til tey serligu krøv, ið barnið hevur. Metingin verður m.a. grundað á enn eina samrøðu við umsøkjararnar um viðurskiftini, tá umsøkjararnir hava havt høvi at tosa við ein lækna um tøku upplýsingarnar um barnið.

Tá ein ættleiðingarmiðlandi felagsskapur fær eitt greipingaruppskot frá einum útlendskum samstarvsfelaga, skal barnalæknin hjá felagsskapinum gera eina meting av heilsu-, sálar- og sosialu menningini hjá barninum. Frágreiðing skal gera greitt, um barnið verður mett at vera innanfyri góðkenningarkarmin. Um læknin metir, at barnið er uttanfyri góðkenningarkarmin, skal grundgevast fyri hesari meting. Felagsskapurin sendir síðani samlaða málið um barnið, íroknað læknafakligu metingina av barninum, til sentralmyndugleikan í førum, tá barnið uttan iva er innanfyri góðkenningarkarmin – ella til Familjufyrisitingina, um barnið verður mett at vera uttanfyri góðkenningarkarmin, ella ivi er um hetta.

Felagsskapurin skal harafturat eins og higartil gera eina viðkomandi meting av tøku upplýsingum um leysgevingina av barninum til altjóða ættleiðing, áðrenn málið verður sent víðari til sentralmyndugleikan ella Familjufyrisitingina.

Støðutakan til eitt greipingaruppskot skal bæði rúma eina meting av heilsuviðurskiftunum hjá barninum, eins og eitt eftirlit av skjalpróvnum fyri leysgevingini til altjóða ættleiðing. Eins og higartil skal tað vera skjalprógvað, at ítøkiliga barnið kann verða ættleitt altjóða, áðrenn ein váttan kann verða gjørd, at ættleiðingargongdin kann halda fram. Um upplýsingarnir ikki eru nøktandi, ivasamir ella ikki tøkir, so skal hetta kannast nærri.

Sentralmyndugleikin innheintar viðkomandi læknafakligar upplýsingar fyri at gera eina nøktandi meting av viðurskiftunum hjá barninum. Harvið er tað í øllum málum tryggjað, at viðurskiftini hjá barninum eru eftirhugd. Gjøgnum ættleiðingarsamráðið hevur Familjufyrisitingin neyðuga læknafakliga førleikan at meta um heilsuviðurskiftini hjá barni í førum, tá barnið ikki er klárt innanfyri góðkenningarkarmin hjá umsøkjara. Familjufyrisitingin er ikki bundin av metingini hjá ættleiðingarmiðlandi felagsskapinum av barninum.

Um Familjufyrisitingin metir sambært tilmæli frá ættleiðingarsamráðnum, at barnið er uttanfyri góðkenningarkarmin, vil umsøkjarin hava høvi at biðja Familjufyrisitingin um víðkan av góðkenningini til tess at ættleiða barnið. Bert tá umbønin hjá umsøkjara um víðkan av góðkenningini til ítøkiliga barnið er gingin á møti, kann ein váttan í samsvari við grein 17 c gerast, ið loyvir at ættleiðingargongdin kann halda fram. Áðrenn tílík váttan verður gjørd, skal Familjufyrisitingin tryggja, at neyðug skjøl eru tøk í málinum. Um tað ikki er galdandi, so skal sentralmyndugleikin kanna skjalprógvið nærri.

Um sentralmyndugleikin metir, at tað er tørvur á at fáa váttað rættargildið av skjalatilfari, kann sentralmyndugleikin biðja miðlandi felagsskapin um hetta – eins og sentralmyndugleikin kann seta seg í samband við viðkomandi gevaraland.

Fyri at røkka ætlaða eftirlitinum við ættleiðingargongdunum, skal metingin av teimum tøku upplýsingunum í mun til leysgeving frá upprunalandinum hjá barninum í mesta mun fremjast, áðrenn umsøkjararnir fáa barnið í boði, eins og í dag. Sum nevnt í vanligu viðmerkingunum, so er hetta tó ikki møguligt í ávísum førum. Tá ættleiðarin hevur góðtikið greipingina, letur sentralmyndugleikin – ella Familjufyrisitingin, um málið hoyrir undir stovnin – úr hondum eina váttan sambært grein 17 c í Haagersáttmálanum, um gevaralandið er fevnt av sáttmálanum.

Fyri at tryggja atlitið til barnið er avgerandi, at mál um góðkenning av greipingaruppskotum verða viðgjørd skjótast gjørligt. Í málum, ið verða viðgjørd av sentralmyndugleikanum, skal avgerð um uppskotið vera tøkt innan ein vika er farin. Í førum, har tørvur er at á kanna upplýsingarnar nærri, kann vera tørvur á at leingja tíðarkarmin. Góðkenning av einstøku greipingaruppskotunum kunnu innibera málsviðurskifti, ið ikki einans kunnu vera

tíðarkrevjandi, men eisini verða tengd at viðgerð hjá øðrum myndugleikum. T.d. kann vera tørvur á at fáa váttað gildi av skjali ella at seta spurningar til viðkomandi myndugleikar í upprunalandinum. Ein støðutakan í Familjufyrisitingini vil í flestu førum eisini fevna um støðutakan í mun til víðkjan av góðkenning – málini fevna tískil um meira enn sjálva góðkenningina av greipingaruppskotinum.

Serstakt í mun til reglurnar í persónsupplýsingarlógini verður gjørt vart við, at sambært persónsupplýsingarlógini § 9 kunnu ikki viðkvæmir upplýsingar m.a. viðgerast og latast víðari, um tað er neyðugt til tess at útinna almennan myndugleika liður í arbeiðnum hjá myndugleika, sí § 9, stk. 1, nr. 5. Harafturat kunnu tílíkir upplýsingar m.a. viðgerast og latast víðari, um tað er neyðugt og er av størri týdningi enn atlitið til skrásetta, sí § 9, stk. 1, nr. 6. Sambært § 10 í lógini er møguligt at viðgera og lata víðari upplýsingar um m.a. heilsuviðurskifti, um tørvur er á hesum fyri at áseta ella verja rættarkrav. Harafturat kunnu upplýsingarsambært § 10 um týðandi sosialar trupulleikar ella onnur privat viðurskifti viðgerast og latast víðari, um hetta t.d. verður gjørt fyri at verja privat áhugamál, sum greitt eru meira týðandi enn tey áhugamál, ið tala fyri, at upplýsingarnir tørva at vera loyniligir. Upplýsingarnir, ið eru partur av viðgerðini hjá sentralmyndugleikanum av einum greipingaruppskoti, eru umfataðir av nevndu ásetingum. Viðgerðin verður framd við atliti til at staðfesta, um ein ættleiðing kann halda fram, og harvið um ein ættleiðing er tað besta fyri barnið. Viðgerðin verður sostatt mett at vera innanfyri karmin av reglunum í persóndatalógini.

Víst verður til nr. 1.4.7 í almennu viðmerkingunum.

**Til § 38**

Ásetingin er nýggj og sambært *§ 38* í lógaruppskotinum skal sentralmyndugleikin fyri at fremja eftirlitið innheinta upplýsingar um ættleiðingargongdina frá ættleiðarunum, tá eitt barn, ið er altjóða ættleitt gjøgnum ein ættleiðingarmiðlandi felagsskap, er komið til Føroyar. Endamálið er at tryggja eina skipaða innsavning av upplýsingum, um hvussu miðlandi felagsskapir røkja uppgávuna at veita ættleiðingarhjálp. Innsavning av upplýsingum skal fremjast í mun til allar ættleiðingar, ið eru framdar gjøgnum ein ættleiðingarmiðlandi felagsskap. Upplýsingarnir, ið verða savnaðir, kunnu umfata viðurskifti, ið ættleiðarar hava serligar fortreytir at kunna sentralmyndugleikan um. Innsavningin av upplýsingunum verður í høvuðsheitum at verða framd við spurnarblaði, men aðrir háttir kunnu verða nýttir um tørvar. Luttøka er sjálvboðin hjá ættleiðarunum, og tískil hevur eftirlitsmyndugleikin ikki høvi at noyða ættleiðara at svara spurnarblaði. Um talan er um innsavning av persónsupplýsingum, skal hetta verða framt innan karmin á persónsupplýsingarlógini.

Eftirlitsmyndugleikarnir hava ikki verið kravdir at savna upplýsingar á henda hátt áður, og tískil er talan um eina heilt nýggja áseting.

Víst verður annars til nr. 1.4.6 í almennu viðmerkingunum.

**Til § 39**

Ásetingin er nýggj og sambært *§ 39* í lógaruppskotinum kann sentralmyndugleikin innheinta upplýsingar frá Familjufyrisitingini og Kærunevndini í almanna-, familju- og heilsumálum, harafturat verða Familjufyrisitingin og Kærunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum áløgd skyldu at kunna sentralmyndugeikan um øll viðurskifti, sum Familjufyrisitingin

og/ella Kærnunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum meta kunnu hava týdning í mun til eftirlitið við einum ættleiðingarmiðlandi felagsskapi.

Galdandi ættleiðingarlóg inniheldur ikki reglur um atgongd til upplýsingar at nýta at fremja eftirlit við einum ættleiðingarmiðlandi felagsskapi. Galdandi ættleiðingarlóg inniheldur sostatt heldur ikki reglur um at blanda Kærnunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum og Familjufyrisitingina í hetta eftirlitsarbeiðið.

Eftirlitið verður í dag og fram til yvirtøkuna í roynd og veru framt av Ankestyrelsen, sí nr. 1.4.2.1.2 í almennu viðmerkingunum. Samstarvsavtala verður gjørd millum Føroyar og Danmark, ið m.a. regulerar viðurskifti sum eftirlitið við miðlandi felagsskapunum.

Í samband við yvirtøkuna er tað tískil neyðugt at fremja hesar broytingar í ættleiðingarlógini soleiðis, at tað verður møguligt hjá sentralmyndugleikanum at áleggja viðkomandi føroyskum myndugleikum at geva og kunna um upplýsingar, ið eru viðkomandi fyri eftirlitið hjá sentralmyndugleikanum av DIA.

Sentralmyndugleikin kann sambært *§ 39, stk. 1* í uppskotinum biðja Familjufyrisitingina og Kærnunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum um ummæli viðvíkjandi ítøkilig ella yvirkipaði viðurskifti av týdningi fyri eftirlitið – og biðja um hjálp í samband við fyrireiking av eftirlitsvitjanum.

Familjufyrisitingin og Kærnunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum skulu harafturat sambært *stk. 2* kunna sentralmyndugleikan um øll viðurskifti, sum Familjufyrisitingin og/ella Kærnunevndin í almanna-, familju- og heilsumálum meta kunnu hava týdning í mun til eftirlitið við einum ættleiðingarmiðlandi felagsskapi.

Víst verður til nr. 1.4.6 í almennu viðmerkingunum.

**Til § 40**

Galdandi § 27 f í ættleiðingarlógini, ið við lógaruppskotinum verður til *§ 40*, inniheldur ásetingar um revsing.

Revsiásetingin staðfestir, at brot á ávikavist §§ 27 d, stk. 2, og 27 e í galdandi lóg verður revsað við sekt ella fongsli í upp til 4 mánaðir. Sama ger seg galdandi fyri millummann, um millummaður veitir gjald fyri at fáa samtykki til ættleiðing til vega. Revsiábyrgd kann áleggjast feløgum og øðrum løgfrøðisligum persónum sambært reglunum í revsilógini kapittul 5.

Galdandi § 27 e, ið við hesum lógaruppskoti verður til *§ 36*, staðfestir, hvør kann veita hjálp at knýta samband millum persónar, ið ynskja at ættleiða, og eitt barn, við tí endamáli at fremja ættleiðing og annars at veita ættleiðingarhjálp.

Galdandi § 27 d, stk. 2 verður við lógaruppskotinum tilmæld at verða strikað, tí ásetingin regulerar viðurskifti, um m.a. beinleiðis eftirlitið við miðlandi felagsskapunum – reguleringar, ið verða partur av samstarvsavtaluni. Tískil er revsiásetingin broytt í tann mun, at ávísingin til galdandi § 25 d, stk. 2 verður strikað.

Annars er *§ 40* í lógaruppskotinum bert umsett til føroyskt og svarar sostatt til ásetingina í galdandi § 27 f í ættleiðingarlógini.

Víst verður annars til serligu viðmerkingarnar til *§ 36.*

**Til § 41**

*§ 41* í lógaruppskotinum er nýggj og snýr seg um kærumøguleikar.

Sambært galdandi lóggávu skulu kærur um stjúkbarnaættleiðing ella familjuættleiðing viðgerast av Familieretsafdelingen í Ankestyrelsen sbrt. § 33 í galdandi ættleiðingarkunngerð. Avgerðir hjá Ríkisumboðsmanninum í samband við fremmandaættleiðing skulu kærast til Adoptionsnævnet sbrt. § 25 b, stk. 3 í galdandi ættleiðingarlóg. Avgerðir tiknar sambært §§ 9 og 10 í galdandi ættleiðingarlóg viðvíkjandi tvingsilsættleiðing, ið við lógaruppskotinum verða til *§§ 10 og 11*, kunnu leggjast fyri rættin sambært § 11 í galdandi lóg, ið við lógaruppskotinum verður til *§ 12.*

Við *§ 41* verða kæruásetingarnar savnaðar í einari áseting og á lógarstøði.

Sum ein avleiðing av yvirtøkuni kunnu avgerðir tiknar av Familjufyrisitingini sambært uppskotinum til *§ 41, stk. 1* kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum. Tó soleiðis, at avgerðir tiknar sambært *§§ 10* og *11*, ið viðvíkja tvingsilsættleiðingum framhaldandi kunnu leggjast fyri rættin sbrt. *§ 12*. Viðmerkjast skal eisini, at galdandi § 25 b verður strikað í samband við hesa løgtingslóg, sí almennu viðmerkingarnar og avgjørt er ikki at stovna nakað serstakt ættleiðingarráð í Føroyum, sí nærri nr. 1.4.2.3. Tískil verður eisini møguligt at kæra eina avgerð viðvíkjandi góðkenning sum ættleiðari til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum.

Sambært *stk. 2* í lógaruppskotinum, ið er heilt nýggj, kann málsviðgerðin í samband við avgerðir sambært *§§ 10* og *11*, ið viðvíkja tvingsilsættleiðingum, kærast til Kærunevndina í almanna-, familju- og heilsumálum.

Sambært *stk. 3* lógaruppskotinum kann landsstýrismaðurin áseta reglur um viðgerðina av kærum. Henda heimildaáseting er nýggj.

**Til § 42**

*§ 42* í lógaruppskotinum inniheldur ásetingar um ígildiskomu av ættleiðingarlógini og teimum ymisku ásetingunum í ættleiðingarlógini.

Í *§ 42, stk. 1* verður mælt verður til, at lógin kemur í gildi 29. juli 2018 – tá Føroyar yvirtaka økið persón-, familju- og arvarætt, íroknað ættleiðingarøkið, sí almennu viðmerkingarnar nr. 1.1.

Tilmælda ásetingin inniber, at tær lógarbroytingar, ið verða gjørdar í lógini, eisini verða nýttar til ættleiðingar og ættleiðingarmál, ið eru í gongd, tá lógin kemur í gildi.

Harafturat inniber ásetingin, at nýggju reglurnar um ættleiðing fyri samlivandi eisini verða nýttar til ikki liðugt viðgjørdar umsóknir um ættleiðing, sum ein umsøkjari, ið hevur ein samlivara, hevur latið inn, innan løgtingslógin er komin í gildi.

Nýggju reglurnar víðka nýtsluøkið hjá ættleiðingarlógini til eisini at umfata ógift samlivandi, ið ynskja at ættleiða saman. Reglurnar ávirka ikki einlig ella hjúnapør, ið ynskja at ættleiða saman. Nýggju reglurnar avmarka sostatt ikki tey rættindi, ið ein umsøkjari, ið hevur ein samlivara, hevur eftir galdandi reglum, burtursæð frá tilmæltu broytingini av § 5, stk. 1 í galdandi ættleiðingarlóg, ið eisini eitur *§ 5* í lógaruppskotinum.

Sambært *§ 42, stk. 2* í lógaruppskotinum inniber tilmælta broytingin av § 5, stk. 1 í galdandi ættleiðingarlóg, ið eisini eitur *§ 5, stk. 1* í lógaruppskotinum, at tann, sum er giftur ella samlivandi kann bert ættleiða saman við einum hjúnafelaga ella samlivara, undantikið um talan er um stjúkbarnaættleiðing, ella um hjúnafelagin ella samlivarin er burturblivin, ella av sinnissjúku ella líknandi ikki er førur fyri at virka við skili.

Sostatt er ikki nøkur forðing fyri at nýta nýggju reglurnar til umsóknir um ættleiðing, sum ein umsøkjari, ið hevur ein samlivara, hevur latið inn innan lógin kemur í gildi – burtursæð frá broyttu ásetingini í galdandi § 5, stk. 1, sí tilmældu skiftisreglu í *§ 42, stk. 2* í lógaruppskotinum. Ein umsøkjari, ið hevur latið umsókn inn, innan lógin er komin í gildi, vil harvið kunna ættleiða einsamallur, sjálvt um umsøkjarin hevur ein samlivara, ið ikki ættleiðir viðkomandi barn.

Ynskja umsøkjarin og samlivarin hjá viðkomandi at broyta eina umsókn um ættleiðing, ið er latin inn innan lógin er komin í gildi, so at tey kunnu ættleiða saman, skal hetta bert fráboðast Familjufyrisitingini. Tey tørva tískil ikki at lata nýggja umsókn um ættleiðing inn.

Sambært *§ 42, stk. 3* viðvíkjandi gildiskomu av kravinum um ættleiðingarfyrireikandi skeið í *§ 27, stk. 1* í lógaruppkotinum, verður mælt til, at kravið um ættleiðingarfyrireikandi skeið verður galdandi fyri umsøkjarar, ið lata umsókn inn eftir, at lógin er komin í gildi.

Í *§ 42 stk. 4* verður mælt til, at møguleikin hjá Familjufyrisitingini at avgera, at persónar, ið áður hava ættleitt eitt barn sambært *§ 27, stk. 2* í lógaruppkotinum, skulu á eitt ættleiðingarfyrireikandi skeið fyri at verða góðkend av nýggjum at ættleiða, verður galdandi fyri umsóknir, ið verða latnar inn eftir, at lógin er komin í gildi.

Í *§ 42, stk. 5* viðvíkjandi kravdari ráðgeving innan, at barnið, ið ættleitt verður, kemur heim til ættleiðaran í Føroyum, verður mælt til, at Familjufyrisitingin til 1. novembur 2018 fær høvi at víkja frá kravinum í *§ 28, stk. 1* í ættleiðingarlógini um, at ættleiðarar skulu móttaka ráðgeving beint innan, at barnið, ið ættleitt verður, kemur heim til ættleiðaran í Føroyum. Hetta undantakið er ætlað í førum, tá barnið kemur til Føroyar stutt eftir, at lógin kemur í gildi, og har tað er ógjørligt ella sera torført at veita ráðgeving áðrenn farið verður avstað at heinta ættleidda barnið.

Mælt verður eisini til í *§ 42, stk. 6*, at kravið í *§ 28, stk. 1,* um at ein ættleiðari skal móttaka ættleiðingarráðgeving eftir, at barnið, ið skal ættleiðast, er vorðið heimtikið, skal verða galdandi í førum, har barnið kemur heim til ættleiðararnar seinni enn 3 mánaðir áðrenn, at lógin er komin í gildi. Tá er atlit tikið til, at hjá familjum, ið ikki skulu móttaka ráðgeving, hevur barnið verið í heiminum í meira enn 3 mánaðir, tá lógin kemur í gildi. Um viðkomandi ættleiðarar ynskja ættleiðingarráðgeving, kunnu tey biðja um tað eftir tilmæltu áseting í *§ 28, stk. 2* í lógaruppskotinum.

**Til §§ 43-45**

*§§ 44-45* í lógaruppskotinum er bert umsettar til føroyskt og eru sostatt óbroyttar í mun til higartil galdandi §§ 30-32 í galdandi ættleiðingarlóg og er talan um ymiskar skiftis- og ígildiskomuásetingar av eldri ættleiðingarlóggávu.

**Til § 46**

Ásetingin mælir til, at anordning nr. 1169 frá 25. novembur 2006 um ígildiskomu av ættleiðingarlóg fyri Føroyar verður ógildað við gildiskomuni av hesari lóg.

Navn á stjórnarráði, dagfesting.

**Navn á landsstýrismanni**

landsstýrismaður

/ Navn á embætisfólki

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1:
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: